Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Dagfesting:	04.11.2025
Mál nr.:	24/15584
Málsviðgjørt:	ABD/SSJ
Ummælistíð:	02.09.2025 – 29.09.2025
Eftirkannað:	07.10.2025

Uppskot til

Løgtingslóg
um
ársroknskap
(Ársroknskaparlógin)

Partur I
Lógarinnar virkisøki, grundleggjandi krøv o.a.

Kapittul 1
Virkisøki o.a.

Fyritøkur, sum eru fevndar av løgtingslógini

§ 1. Løgtingslógin er galdandi fyri allar vinnurekandi fyritøkur, sbr. tó stk. 3.
Stk. 2. Ein fyritøka verður mett at vera vinnurekandi sambært hesi løgtingslóg, um hon selur ella veitir vørur, rættindi, pening, tænastur o.a., sum fyritøkan vanliga verður samsýnt fyri. Løgfrøðiligar eindir, ið eru skrásetingarskyldugar sambært vinnufelagalógini, vinnufyritøkulógini, anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om erhvervsdrivende fonde, ella sum annars eru vinnurekandi sambært lóg, eru tó altíð at meta sum vinnurekandi fyritøkur sambært hesi løgtingslóg. Hetta er galdandi, sama um fyritøkurnar heilt ella lutvíst eru undantiknar frá nevndu lógum, og uttan mun til virkishátt.
Stk. 3. Løgtingslógin er ikki galdandi fyri fyritøkur, sum:

1) eru fevndar av roknskaparreglum ásettum í ella við heimild í lóggávuni fyri fíggjarfyritøkur,
2) eru fevndar av roknskaparreglum ásettum í ella við heimild í løgtingslóg um landsins almenna roknskaparhald, v.m., ella
3) eru fevndar av roknskaparreglum ásettum í ella við heimild í løgtingslóg um kommunustýri.

Ársfrásøgnin

§ 2. Tær fyritøkur, sum eru nevndar í § 3, stk. 1, skulu fyri hvørt roknskaparár gera ársroknskap eftir hesi løgtingslóg. Uttan so at annað er ásett í §§ 11, 21, 25, 80, 120 ella 130, skal leggjast afturat ársroknskapinum:

1) ársroknskapurin hjá einum samtaki, ið fyritøkan stendur á odda fyri t.e. samtaksroknskapur,
2) leiðslufrágreiðing fyri fyritøkuna og fyri møgulig samtøk, sum fyritøkan stendur á odda fyri, og
3) ein leiðsluátekning.

Stk. 2. Harumframt kann fyritøkan leggja afturat møguligar ískoytisfrágreiðingar sambært § 17.

Stk. 3. Felagsheiti fyri teir í stk. 1 og 2 umrøddu roknskapir, frágreiðingar og átekningar er ársfrásøgn.

Stk. 4. Ein roknskapur, sum ein fyritøka bert setur upp til egna nýtslu, er ikki ein ársfrásøgn eftir hesi løgtingslóg. Ger ein fyritøka ein roknskap, sum ikki er ein ársfrásøgn eftir hesi løgtingslóg, skal heitið ársfrásøgn ikki nýtast. Roknskapurin skal harumframt verða soleiðis háttaður, bæði í sniði og í innihaldi, at hann ikki kann mistakast fyri eina ársfrásøgn eftir hesi løgtingslóg.

Fevndu virkishættirnir

§ 3. Vinnurekandi fyritøkur, sum eru nevndar í hesi áseting, skulu gera ársfrásøgn eftir reglunum í hesi løgtingslóg, tó ikki um tær eru undantiknar frá hesum eftir §§ 4-6:

1) partafeløg, smápartafeløg og partnarafeløg t.e. kommanditpartafeløg,
2) íognarfeløg og kommanditfeløg, har allir íognarar ávikavist komplementarar eru partafeløg, smápartafeløg, partnarafeløg t.e. kommanditpartafeløg, ella feløg við samsvarandi virkisháttti,
3) íognarfeløg ella kommanditfeløg, har allir íognarar ávikavist komplementarar eru fevndir av nr. 2,
4) vinnurekandi grunnar, sbr. § 1, stk. 2 í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om erhvervsdrivende, sbr. tó stk. 3-5,
5) fyritøkur við avmarkaðari ábyrgd sum ásett íí§ 3 vinnufyritøkulógini, um fyritøkur og feløg við avmarkaðari ábyrgd og § 4 um lutafeløg við avmarkaðari ábyrgd, uttan so at fyritøkan er undantikin sambært § 4, og
6) evropeisk lutafeløg t.e. SCE-feløg.

Stk. 2. Velur ein fyritøka, sum er fevnd av hesi løgtingslóg, men sum ikki hevur skyldu til at gera ársfrásøgn sambært stk. 1, sjálvboðið at gera ársfrásøgn, sum ikki einans er ætlað til fyritøkunnar egnu nýtslu, skal ársfrásøgnin í minsta lagi fylgja reglunum fyri roknskaparflokk A, sbr. § 7, stk. 1, nr. 1.

Undantak fyri fyritøkur, ið eru fevndar av vinnufyritøkulógini

§ 4. Fyritøkur, sum eru fevndar av § 3 í vinnufyritøkulógini, t.e. fyritøkur og feløg við avmarkaðari ábyrgd og § 4, t.e. lutafeløg við avmarkaðari ábyrgd, kunnu lata vera við at gera ársfrásøgn eftir hesi løgtingslóg, sbr. tó stk. 4-6, um fyritøkan fíggjarjavnadagin í tvey fylgjandi roknskaparár ikki fer upp um tvey av fylgjandi støddarmørkum:

1) Ein fíggjarjavna upp á 7 mió. kr.,
2) eina nettosølu upp á 14 mió. kr., og
3) eitt miðaltal av ársverkum upp á 10 í roknskaparárinum.

Stk. 2. § 7, stk. 3 og 4 er galdandi, tá ið støddarmørkini sambært stk. 1 verða roknað.

Stk. 3. Um ein fyritøka velur at nýta undantakið í stk. 1, skal fyritøkan senda Skráseting Føroya eina undantaksváttan sambært § 169.

Stk. 4. Undantakið í stk. 1 er ikki galdandi fyri fyritøkur, sum eru móðurfyritøka í einum samtaki, sum samtaksroknskapur skal gerast fyri eftir § 7, stk. 5, ella fyri fyritøkur, sum hava kapitalpartar, skuldarbrøv ella onnur virðisbrøv upptikin til handils á einum regulerøðum marknaði í Føroyum ella í einum ES/EBS-landi.

Stk. 5. Velur ein fyritøka, sum er fevnd av hesi løgtingslóg, men sum ikki hevur skyldu til at gera ársfrásøgn sambært stk. 1, sjálvboðið at gera ársfrásøgn, sum ikki einans er ætlað til fyritøkunnar egnu

nýtslu, skal ársfrásøgnin í minsta lagi fylgja reglunum fyri roknskaparflokk A, sbr. § 7, stk. 1, nr. 1.
Stk. 6. Ynskir fyritøkan, at Skráseting Føroya skal almannakunngera eina sjálvbodna ársfrásøgn sambært stk. 6, skal fyritøkan senda Skráseting Føroya ársfrásøgnina sum fylgiskjal til undantaksváttanina sambært stk. 3. Undantaksváttanin skal tó ikki sendast, um fyritøkan velur at lata ársfrásøgnina verða fevnda av reglunum fyri roknskaparflokk B, sbr. § 7, stk. 1, nr. 2.

Undantak fyri ávís íognarfeløg og kommanditfeløg

§ 5. Íognarfeløg og kommanditfeløg sambært § 3, stk. 1, nr. 2, kunnu lata vera við at gera ársfrásøgn, og kunnu í staðin lata Skráseting Føroya eina undantaksváttan sambært § 170, stk. 1, um:

1) roknskapurin við fulla konsolidering, pro rata-konsolidering, ella við innrokning og máting til roknskaparliga innara virðið, er partur av einum samtaksroknskapi, sum ein íognari, ein komplementarur ella ein móðurfyritøka hevur gjørt í staðin,
2) íognarin ella komplementarurin hevur heimstað í Føroyum, ella er fevndur av lóggávuni í einum ES-limalandi, einum EBS-limalandi, ella í einum landi, sum Føroyar hevur gjørt avtalu við,
3) samtaksroknskapurin er gjørdur eftir reglunum í hesi løgtingslóg ella, um íognarin, komplementarurin ella viðkomandi móðurfyritøka er útlendskt, eftir reglunum í Evropatingsins og Ráðsins direktivi 2013/34/EU, við seinni broytingum, sbr. skjal 3, og samtaksroknskapurin er grannskoðaður og almannakunngjørdur eftir reglunum í hesum direktivi, og
4) tað verður upplýst í samtaksroknskapinum at íognarfelagið ávikavist kommanditfelagið hevur latið vera við at gera ársfrásøgn vísandi til hesa áseting.

Stk. 2. Íognarfeløg og kommanditfeløg, sum eru fevnd av § 3, stk. 1, nr. 2, kunnu lata vera við at gera ársfrásøgn sjálv, og kunnu í staðin lata Skráseting Føroya eina undantaksváttan sambært § 170, stk. 2, um:

1) ein av felagsins íognarum ávikavist komplementarum hevur heimstað í Føroyum, og
2) íognarin ella komplementarurin gera ársfrásøgn fyri íognarfelagið ella kommanditfelagið, og lata hana grannskoða og almannakunngera eftir reglunum í hesi løgtingslóg, saman við síni egnu ársfrásøgn í eini felags ársfrásøgn, ella sum tvær serskildar ársfrásagnir.

Stk. 3. Íognarfeløg og kommanditfeløg, sum eru fevnd av § 3, stk. 1, nr. 2, og har eingin íognari ella komplementarur hevur heimstað í Føroyum, kunnu lata vera við at gera ársfrásøgn, og kunnu í staðin lata Skráseting Føroya eina undantaksváttan sambært § 170, stk. 3, um:

1) íognarin ávikavist komplementarurin er fevndur av lóggávuni í Føroyum, í einum ES-limalandi ella í einum EBS-limalandi, og
2) íognarin ella komplementarurin ger ársfrásøgn fyri íognarfelagið ella kommanditfelagið og letur hana grannskoða og almannakunngera í samsvari við lóggávuna sambært nr. 1, saman við síni egnu ársfrásøgn í eini felags ársfrásøgn, ella sum tvær serskildar ársfrásagnir.

Stk. 4. Íognarfeløg og kommanditfeløg, sum nýta undantøkini í stk. 2 og 3, skulu eftir áheitan upplýsa einum og hvørjum um navn, v-tal ella skrásetingarnummar og heimstað hjá tí fyritøku, sum hevur gjørt ársfrásøgnina.
Stk. 5. Stk. 1-3 eru ikki galdandi fyri íognarfeløg og kommanditfeløg, sum hava kapitalpartar, skuldaramboð ella onnur virðisbrøv upptikin til handils á einum regulerøðum marknaði í Føroyum ella í einum ES/EBS-landi.

Undantak fyri dótturfyritøkur við ongum virksemi

§ 6. Ein dótturfyritøka, sum ikki hevur havt nakað virksemi í roknskaparárinum, kann lata vera við at gera ársfrásøgn fyri viðkomandi ár, og kann í staðin lata Skráseting Føroya eina undantaksváttan sambært § 170, stk. 4, um:

1) roknskapur fyritøkunnar við fullari konsolidering, pro rata-konsolidering, ella við innrokning og máting til roknskaparliga innara virðið, er partur av einum samtaksroknskapi, sum ein móðurfyritøka ella ein hægri móðurfyritøka hevur gjørt,
2) móðurfyritøkan ella hægra móðurfyritøkan, er fevnd av lóggávuni í einum ES-limalandi ella EBS-limalandi,
3) samtaksroknskapurin er gjørdur eftir reglunum í hesi løgtingslóg ella, um viðkomandi móðurfelag er útlendskt, eftir reglunum í Evropatingsins og Ráðsins direktivi 2013/34/EU við seinni broytinum, sbr. skjal 3, og samtaksroknskapurin er grannskoðaður og almannakunngjørdur eftir nevndu reglum,
4) allir luttakarar í dótturfyritøkuni hava váttað, at teir eru samdir um, at hendan mannagongd verður nýtt fyri viðkomandi roknskaparár,
5) móðurfyritøkan hevur váttað, at hon ábyrgdast fyri skyldur dótturfyritøkunnar inntil dótturfyritøkan hevur latið Skráseting Føroya eina ársfrásøgn fyri eitt seinni roknskaparár, og ársfrásøgnin er móttikin og almannakunngjørd eftir reglunum í kapitli 22 og 24, og
6) at tað verður upplýst í umrødda samtaksroknskapinum, at dótturfyritøkan hevur latið vera við at gera ársfrásøgn vísandi til hesa áseting.

Stk. 2. Ein fyritøka, heruppií ein dótturfyritøka, verður mett einki virksemi at hava havt í roknskaparárinum, um fyritøkan ikki hevur rikið vinnuligt virksemi beinleiðis ella óbeinleiðis ikki eigur kapitalpartar í øðrum fyritøkum, og ikki hevur átikið sær váðar.

Roknskaparflokkar

§ 7. Reglurnar í hesi løgtingslóg um at gera ársfrásøgn verða býttar sundur í roknskaparflokkarnar A, B, C og D sambært parti II, III, IV og V. Tá ið avgerð skal takast um, hvønn roknskaparflokki ein fyritøka skal gera ársfrásøgn fyri, er hetta galdandi:

1) Fyritøkur, sum eru fevndar av løgtingslógini, men ikki hava skyldu til at gera ársfrásøgn sambært § 3, stk. 1, og sum kortini sjálvboðið gera ársfrásøgn sambært § 3, stk. 2, skulu í minsta lagi fylgja reglunum fyri roknskaparflokk A í parti II.
2) Smáar fyritøkur, sum hava skyldu til at gera ársfrásøgn sambært § 3, stk. 1, skulu í minsta lagi fylgja reglunum fyri roknskaparflokk B í parti III.
3) Miðalstórar og stórar fyritøkur, sum hava skyldu til at gera ársfrásøgn sambært § 3, stk. 1, skulu í minsta lagi fylgja reglunum fyri roknskaparflokk C í parti IV.
4) Landspartafeløg, sbr. tó § 303 í vinnufelagalógini, og fyritøkur, hvørs kapitalpartar, skuldarskjøl ella onnur virðisbrøv eru upptikin til handils á einum regulerøðum marknaði í Føroyum ella í einum ES/EBS-landi, og sum hava skyldu til at gera ársfrásøgn eftir § 3, stk. 1, skulu uttan mun til stødd fylgja reglunum fyri roknskaparflokk D í parti V, sbr. tó § 8.

Stk. 2. Tá ið avgerð verður tikin um, hvønn roknskaparflokk ein fyritøka skal gera ársfrásøgn fyri, verða hesi støddarmørk nýtt:

1) Smáar fyritøkur: Fyritøkur, sum tvey roknskaparár á rað fíggjarjavnadagin ikki fara upp um tvær av fylgjandi støddum:
   a) Ein fíggjarjavna upp á 55 mió. kr.,
   b) eina nettosølu upp á 111 mió. kr., og

c) eitt miðaltal av ársverkum upp á 50.

2) Miðalstórar fyritøkur: Fyritøkur, sum tvey roknskaparár á rað á fíggjarjavnadegnum ikki fara upp um tvær av fylgjandi støddum:
   a) Ein fíggjarjavna upp á 195 mió. kr.,
   b) eina nettosølu upp á 391 mió. kr., og
   c) eitt miðaltal av ársverkum upp á 250.
3) Stórar fyritøkur: Fyritøkur, sum ikki eru smáar ella miðalstórar fyritøkur.

Stk. 3. Tá ið støddirnar sambært stk. 2 skulu roknast, er hetta galdandi:

1) Fíggjarjavnin er samløgan av øllum ognarpostum.
2) Nettosølan er lýst í skjali 1, C, nr. 13. Er eitt roknskaparár styttri ella longri enn 12 mánaðir, verður nettosølan hækkað ella lækkað lutfalsliga, soleiðis at ein upphædd fæst, ið svarar til upphæddina fyri eitt 12-mánaða tíðarskeið.
3) Miðaltalið av ársverkum verður í mest møguligan mun roknað eftir teimum reglum, sum eru ásettar sambært § 142 í vinnufelagalógini.

Stk. 4. Fyritøkur, hvørs fíggjarligu inntøkur ella inntøkur frá íløguvirksemi í minsta lagi svara til nettosøluna sambært skjali 1, C, nr. 13, skulu, tá ið støddarmørkini verða roknað sambært stk. 2, nýta summin av nettosøluni, fíggjarligu inntøkunum og inntøkunum frá íløguvirksemi. Sum inntøkur frá íløguvirksemi verða roknaðar positivar virðisstillingar fevndar av § 43, stk. 1, umframt realiseraður vinningur í sambandi við, at íløgufastogn verður avhendað.

Stk. 5. Uttan mun til stk. 1 skulu móðurfyritøkur fyri samtøkur, sum skulu gera samtaksroknskap eftir § 130, í ársfrásøgnini fylgja reglunum fyri roknskaparflokk C, uttan so at móðurfyritøkan er fevnd av reglunum fyri roknskaparflokk D sambært stk. 1, nr. 4. Ger móðurfyritøkan ikki samtaksroknskap sambært §§ 132 ella 133, kann móðurfyritøkan tó í síni ársfrásøgn fylgja reglunum fyri roknskaparflokk B, um móðurfyritøkan lýkur treytirnar í stk. 2, nr. 1.

Stk. 6. Í staðin fyri at fylgja reglunum í tí broti, sum fyritøkan sambært stk. 1 og 5 skal fylgja, kann fyritøkan velja at fylgja øllum ella nøkrum av reglunum í einum ella fleiri hægri roknskaparflokkum, tó treytað av, at hesin leistur verður nýttur á miðvísan og reglufastan hátt.

Undantøk fyri dótturfeløg hjá landspartafeløgum

§ 8. Serligu reglurnar í hesi løgtingslóg fyri landspartafeløg eru ikki galdandi fyri partafeløg, sum eru dótturfeløg hjá landspartafeløgum.

Kapittul 2
Leiðslunnar skylda at gera ársfrásøgn

§ 9. Leiðslan í fyritøkuni, sambært skjali 1, A, nr. 6, skal gera ársfrásøgn fyri fyritøkuna.

Stk. 2. Hvør einstakur limur í ábyrgdarhavandi leiðslustovnunum ber ábyrgdina av, at ársfrásøgnin verður gjørd samsvarandi lóggávuni og møguligum ískoytiskrøvum til roknskapin, sum eru ásett í viðtøkum ella í avtalu. Harumframt ber hvør einstakur limur í evstu leiðsluni ábyrgdina av, at ársfrásøgnin um grannskoðan er kravd, kann grannskoðast og góðkennast rættstundis. Hvør einstakur limur í evsta leiðslustovninum hevur ábyrgdina fyri, at ársfrásøgnin verður latin Skráseting Føroya innan tær freistir, ið eru ásettar í § 162, stk. 1, sambært § 180.

§ 10. Tá ársfrásøgnin er gjørd, skulu allir limirnir í ábyrgdarhavandi leiðslustovni undirskriva hana og dagfesta undirskriftina. Limirnir í leiðsluni skulu undirrita eina leiðsluátekning, sbr. tó § 11, har teir vátta:

1) hvørt ársfrásøgnin er gjørd samsvarandi krøvunum í lóggávuni, møguligum krøvum sambært

standardum, og møguligum ískoytiskrøvum sambært viðtøkum ella avtalu, og
2) hvørt ársroknskapurin og ein møguligur samtaksroknskapur gevur eina rættvísandi mynd av fyritøkunnar og samtaksins ognum og skyldum, fíggjarjavna og úrsliti.

Stk. 2. Kravið um, at undirskriftin og dagfestingin av undirskriftini skulu verða givnar í sambandi við leiðsluváttanina, fellur burtur, um ársfrásøgnin er undirskrivað talgilt sambært § 183. Navnið hjá undirskrivaranum skal tó síggjast týðiliga í sambandi við leiðsluátekningina.

Stk. 3. Í leiðsluátekningini fyri fyritøkur, sum hava virðisbrøv, sum eru upptikin til handils á einum reguleraðum marknaði í Føroyum ella í einum ES/EBS-landi, og fyri landspartafeløg, sbr. tó § 303 í vinnufelagalógini, skal leiðslan vátta hvørt leiðslufrágreiðingin gevur eina rættvísandi frágreiðing um gongdina í fyritøkuni, og, um samtaksroknskapur er gjørdur, samtaksins virksemi og fíggjarviðurskifti, ársúrslit og fyritøkunnar fíggjarstøða og fíggjarstøðan sum heild fyri tær fyritøkur, sum eru fevndar av samtaksroknskapinum. Leiðslan skal haraumframt vátta, hvørt tað í leiðslufrágreiðingini verður greitt frá teimum mest týðandi váðunum og óvissunum, sum fyritøkan, og um samtaksroknskapur er gjørdur, samtakið hava í væntu. Í leiðsluátekningini fyri fyritøkuna skal navn og starv hjá hvørjum einstøkum limi í leiðsluni tilskilast.

Stk. 4. Ásetingin í stk. 3. er ikki galdandi fyri fyritøkur, sum einans geva út skuldarinstrument, sum eru upptikin til handils á einum reguleraðum marknaði í Føroyum ella í einum ES/EBS-landi, hvørs áljóðandi virði pr. eind er minst 100.000 evrur, ella hvørs áljóðandi virði pr. eind er minst 100.000 evrur á útgávudegnum, tá skuldarinstrumentið er givið út í einari aðrari peningseind enn evrur.

Stk. 5. Er ársroknskapurin ikki grannskoðaður sambært § 156, stk. 2, skulu limirnir í leiðsluni í leiðsluátekningini vátta, hvørt fyritøkan lýkur treytirnar fyri at lata vera við at lata ársroknskapin grannskoða.

Stk. 6. Hvur leiðslan lagt ískoytisfrágreiðingar afturat ársfrásøgnini, skulu limirnir í leiðsluni í leiðsluátekningini vátta, at frágreiðingarnar geva eina rættvísandi mynd samsvarandi alment viðurkendum leiðreglum fyri slíkar frágreiðingar.

§ 11. Er fyritøkunnar ábyrgdarhavandi leiðslustovnur bert ein einstakur limur, tá ársfrásøgnin verður góðkend, kann fyritøkan lata vera við at taka eina leiðsluátekning við í ársfrásøgnini, tó ikki, um fyritøkan skal gera ársfrásøgn fyri roknskaparflokk D. Leiðslan verður mett at hava góðkent ársfrásøgnina, tá ið ársfrásøgnin er latin inn til Skráseting Føroya, umvegis talgildu innlatingarskipanina hjá Skráseting Føroya.

Stk. 2. Um ársfrásøgnin hjá fyritøkuni ikki fevnir um eina leiðsluátekning sambært stk. 1, skulu tær í § 10, stk. 5 og 6 nevndu frágreiðingar verða givnar í leiðslufrágreiðingini.

§ 12. Sjálvt um ein limur í leiðsluni heilt ella lutvíst er ósamdur í einari ársfrásøgn ella mælir ímóti, at ársfrásøgnin verður góðkend við tí innihaldi, sum er avgjørt, kann leiðslulimurin ikki sýta fyri at undirskriva ársfrásøgnina.

Stk. 2. Leiðslulimur hevur rætt til at mótmæla í sambandi við, at ársfrásøgnin verður undirskrivað ella í sambandi við leiðsluátekningina. Mótmæli sambært 1. pkt. skal tó vera ítøkiligt og nøktandi grundgivið, og viðurskiftini týðandi, sbr. § 16, stk. 1, nr. 3.

Stk. 3. Vil leiðslan í fyritøkuni mótmæla einari niðurstøðu, sum eftirlitsmyndugleikin sambært hesi løgtingslóg hevur gjørt, og sum hevur týdning fyri ársfrásøgnina, skal mótmæli setast fram í seinasta lagi í sambandi við leiðsluátekningina.

Kapittul 3

Upplýsing um at velja grannskoðan frá fyri komandi roknskaparár

§ 13. Um ársroknskapurin er grannskoðaður, skal tað í sambandi við leiðsluátekningina sambært § 10 verða upplýst, um aðalfundurin ella samsvarandi í eini fyritøku, sum lýkur treytirnar í § 156, stk. 2, hevur tikið avgerð um, at ársroknskapurin fyri komandi roknskaparár ikki skal grannskoðast.
Stk. 2. Er ein leiðsluátekning ikki tikin við í ársfrásøgnini hjá fyritøkuni sambært § 11, stk. 1, skulu tær í stk. 1 nevndu upplýsingar gevast í leiðslufrágreiðingini.

Kapittul 4
Grundleggjandi krøv til ársfrásøgnina

Rættvísandi mynd

§ 14. Ársroknskapurin og ein møguligur samtaksroknskapur skulu geva eina rættvísandi mynd av fyritøkunnar og samtaksins ognum og skyldum, figgjarligu støðu, umframt úrsliti.
Leiðslufrágreiðingin skal innihalda eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.
Stk. 2. Um ásetingarnar í hesi løgtingslóg ikki eru nøktandi til at geva eina rættvísandi mynd sum nevnt í stk. 1, skulu fleiri upplýsingar takast við í ársfrásøgnini, ávikavist í samtaksroknskapinum.
Stk. 3. Um ásetingarnar í hesi løgtingslóg í serligum førum vildu verið í ósamsvari við kravið í stk. 1, 1. pkt., skal verða vikið frá hesum ásetingum, soleiðis at kravið um at geva eina rættvísandi mynd verður lokið. Eitt møguligt frávik skal á hvørjum ári upplýsast í notunum, har tað skal grundgevast ítøkiliga og nøktandi fyri tí, við upplýsing um, hvørja ávirkan frávikið hevur á fyritøkunnar ávikavist samtaksins ognir, skyldur, figgjarjavna og úrslit. Upplýsingin um frávikið frammanfyri skal í mest møguligan mun greiða frá, hvørja figgjarliga ávirkan frávikið væntast at hava.
Stk. 4. Krøvini í stk. 1-3 eru samsvarandi galdandi, tá ið standardar verða nýttir, sum eru ásettir innan fyri karmarnar av hesi løgtingslóg sambært § 159.

§ 15. Fyri at ársroknskapurin og samtaksroknskapurin kunnu geva eina rættvísandi mynd, og fyri at leiðslufrágreiðingin kann innihalda eina rættvísandi frágreiðing sambært § 14, skulu krøvini í stk. 2 og 3 verða lokin.
Stk. 2. Ársfrásøgnin skal greiðast úr hondum soleiðis, at hon stuðlar roknskaparbrúkarunum í teirra figgjarligu avgerðum. Roknskaparbrúkarar eru fólk, fyritøkur, felagsskapir, almennir myndugleikar, o.o., hvørs figgjarligu avgerðir vanliga kunnu væntast at verða ávirkaðar av eini ársfrásøgn, heruppií verandi og møguligir virkisluttakarar, kravánarar, starvsfólk, viðskiftafólk, áhugafelagsskapir, nærsamfelagið, stuðulsveitarar, myndugleikar o.o. Tær umrøddu avgerðirnar viðvíkja:
1) hvussu tilfeingið hjá roknskaparbrúkaranum verður staðsett,
2) hvussu leiðslan umsitur tilfeingið hjá fyritøkuni, og
3) hvussu fyritøkunnar tilfeingi verður býtt.

Stk. 3. Ársfrásøgnin skal greiðast úr hondum soleiðis, at hon lýsir tey viðurskifti, sum vanliga eru viðkomandi fyri roknskaparbrúkarar sambært stk. 2. Upplýsingarnar skulu harumframt vera álítandi sæð í mun til, hvat ein roknskaparbrúkari vanliga kann vænta sær.

Grundleggjandi fortreytir fyri ársfrásøgnini

§ 16. Ársfrásøgnin skal gerast samsvarandi hesum grundleggjandi fortreytum:
1) Ársfrásøgnin skal gerast við atliti til greidleika og einfeldni.
2) Atlitið til veruligu viðurskiftini skulu takast fram um formlig krøv, sum ikki hava veruligt innihald.
3) Øll viðkomandi viðurskifti skulu takast við í ársfrásøgnini, uttan so, at tey eru

av lítlum týdningi. Fleiri viðurskifti, sum hvør sær eru av lítlum týdningi, skulu takast við, um tey tilsamans mugu metast at vera týdningarmikil.
4) Raksturin av einum virksemi væntast at halda á fram, uttan so at raksturin ikki skal, ella ikki verður mettur at kunna halda fram. Verður virksemi avtikið, skulu flokking, uppseting, innrokning og máting lagast til avtøkuna.
5) Innrokning og máting skulu gerast við atliti at varni, heruppií skulu roknskaparligar metingar vera grundaðar og partleysar. Ein og hvør virðisbroyting skal innroknast, uttan mun til, um ársroknskapurin vísir vinning ella hall.
6) Transaktiónir, hendingar og virðisbroytingar skulu innroknast, tá ið tær koma fyri, uttan mun til nær goldið verður.
7) Sami leistur fyri innrokning og máting skal nýtast, tá ið umræður sama slag viðurskifti.
8) Hvør transaktión, hending og virðisbroyting skal innroknast og mátast fyri seg, eins og tey einstøku viðurskiftini ikki mugu mótroknast hvørt við øðrum.
9) Byrjanarjavnin fyri roknskaparárið skal svara til endajavnan fyri undanfarna roknskaparár.

Stk. 2. Roknskaparár, uppseting, flokkan, konsolideringsháttur, innrokningarháttur og mátistøði umframt nýtta peningseindin má ikki broytast frá ári til árs. Broytingar kunnu tó gerast, um so er, at broytingin elvir til eina betri og meira rættvísandi mynd, ella um broytingin er neyðug fyri at fylgja nýggjum reglum í sambandi við skifti til nýggjan roknskaparflokk, ella tá broyting er kravd vegna lógarbroytingar, nýggjar reglugerðir við heimild í lóg, ella í sambandi við nýggjar standardar sambært § 159.

§ 17. Ískoytisfrágreiðingar um eitt nú fyritøkunnar sosialu ábyrgd, vitan og starvsfólkaviðurskifti, umhvørvisviðurskifti, umframt etisk stevnumið og framhaldandi viðgerð av hesum, skulu geva eina rættvísandi frágreiðing innan fyri teir karmar, sum eru ásettir í vanliga viðurkendum leiðreglum fyri slíkar frágreiðingar.

Stk. 2. Ískoytisfrágreiðingar skulu lúka dygdarkrøvini í § 15, stk. 3. Harumframt skulu ískoytisfrágreiðingar lúka grundleggjandi fortreytirnar í § 16, stk. 1 og 2 við teimum linkingum, ið standast av náttúru málsins.

Stk. 3. Í ískoytisfrágreiðingini skal greiðast frá háttalagnum og mátistøðinum, sum hava verið nýtt, tá ískoytisfrágreiðingin er gjørd.

§ 18. Roknskaparárið skal fevna um 12 mánaðir, sum altíð skulu byrja og enda ein ávísan dag í árinum. Næsta roknskaparár byrjar dagin eftir fíggjarjavnadagin undanfarna roknskaparár.

Stk. 2. Fyrsta roknskaparskeið fevnir um eitt tíðarskeið, sum er styttri ella longri enn 12 mánaðir, tó í mesta lagi 18 mánaðir.

Stk. 3. Verður roknskaparárið broytt, kann skiftistíðarskeiðið ikki vera longri enn 12 mánaðir. Skiftistíðarskeiðið kann tó vera upp til 18 mánaðir, um neyðugt er at broyta roknskaparár fyri at fáa sama roknskaparár fyri fleiri fyritøkur, tá ið hetta er liður í:
1) at stovna samtaksviðurskifti,
2) at stovna luttøku í felags leiðslu í einari aðrari fyritøku, ella
3) samanlegging.

Stk. 4. Tað er ein treyt í sambandi við nýtslu av skiftistíðarskeiðinum á 18 mánaðir, at tilgongdin at fáa tey í stk. 3, 2. pkt., nr. 1-3 nevndu viðurskifti í lag, er byrjað í skiftistíðini. Hetta er tó ikki galdandi, um fyritøkan ikki hevur havt møguleika fyri at broyta roknskaparár innan fyri hetta tíðarskeið orsakað av viðurskiftum, sum fyritøkan ikki hevur ræði á.

Stk. 5. Avgerð um at leggja roknskaparárið um skal verða fráboðað Skráseting Føroya í seinasta lagi 6 mánaðir eftir, at roknskaparárið, sum ynski er um at broyta,

er lokið, tó í seinasta lagi 6 mánaðir eftir, at skiftistíðarskeiðið er lokið. Fyri landspartafeløg, sbr. tó § 303 í vinnufelagalógini, og fyritøkur, sum hava virðisbrøv, sum eru upptikin til handils á einum reguleraðum marknaði í Føroyum ella í einum ES/EBS-landi, er freistin tó 4 mánaðir. Verður fráboðanin móttikin, eftir at freistin í 1. ella 2. pkt. er liðin, fellur avgerðin burtur, og kann ikki skrásetast.
Stk. 6. Móðurfyritøkur og dótturfyritøkur og líknandi fyritøkur skulu tryggja, at dótturfyritøkan hevur sama roknskaparár sum móðurfyritøkan. Hetta er tó ikki galdandi, um tað ikki hevur verið møguligt at hava sama roknskaparár orsakað av viðurskiftum, sum móðurfyritøkan ella dótturfyritøkan ikki hava havt ræði á.

§ 19. Innrokning, máting og upplýsingar í peningseindum skulu tilskilast í donskum krónum ella evrum. Fyritøkan kann tó í staðin velja at tilskila upphæddirnar í øðrum fremmandum gjaldoyra, sum er viðkomandi fyri ávikavist fyritøkuna og samtakið.

Kapittul 5
Raðfylgja o.a. av staklutum í ársfrásøgnini

§ 20. Ársfrásøgnin skal innihalda teir staklutir, ið eru kravdir fyri hvønn roknskaparflokk, sbr. §§ 21, 25, 80 og 120, umframt samsvarandi staklutir fyri samtaksroknskapir. Greiðast skal frá nýttum roknskaparhátti undir einum, ella á tann hátt, at frágreiðingin verður býtt upp og tikin við í teimum viðkomandi notunum eftir einum miðvísum og reglufastum leisti.
Stk. 2. Leiðslufrágreiðingin fyri móðurfyritøkuna og samtakið kunnu skrivast í samandrátti, um tær upplýsingar, sum eru ymiskar fyri móðurvirkið og samtakið, standa hvør sær í samlaðu frágreiðingini.
Stk. 3. Ískoytisfrágreiðingar, sum viðvíkja ársfrásøgnini, skulu setast fyri seg samsvarandi lógarkravdu staklutunum.

Partur II
Roknskaparflokkur A

Kapittul 6
Um at gera ársfrásøgn

Almennar ásetingar

§ 21. Fyritøkur í roknskaparflokki A skulu gera eina ársfrásøgn, sum í minsta lagi skal innihalda eina leiðsluátekning, figgjarjavna, rakstrarroknskap og notur, heruppií frágreiðing um nýttan roknskaparhátt.
Stk. 2. Hevur ein góðkendur grannskoðari undirritað eina átekning ella eina váttan viðvíkjandi ársfrásøgnini, skulu ávikavist átekningin og váttanin verða partur av ársfrásøgnini, og ásetingarnar í §§ 14-20 eru galdandi.

Flokking og uppseting

§ 22. Fyritøkan skal taka tær ognir og skyldur við í ársroknskapinum, sum skulu innroknast fyri roknskaparflokkin, umframt eginognina í einum byrjanarjavna ta løtu, virksemið er byrjað. Er onki annað ásett í lóggávuni, verður virksemið hjá fyritøkuni mett at vera byrjað tá ið fyritøkan varð stovnað ella, um vinnuligt virksemi hevur verið í fyritøkuni frammanundan, tað tíðspunkt, har hetta virksemi skuldi verið talt uppí virksemi fyritøkunnar. Hevur fyritøkan rikið vinnuligt virksemi frammanundan stovningardegnum, verður virksemið tó mett at vera byrjað frá hesi løtu.
Stk. 2. Ognir og skyldur í byrjanarjavnanum skulu mátast eftir annaðhvørt yvirtøkuháttinum ella samanleggingarháttinum sambært §§ 143 og 144. Valdi hátturin skal nýtast miðvíst og reglufast fyri allar ognir og skyldur.
Stk. 3. Postarnir í rakstrarroknskapinum skulu bólkast eftir fyritøkunnar slagi og vavi. Fíggarjavnin skal tó í minsta lagi vísa teir viðkomandi høvuðspostar og rómaratalspostar, sum eru nevndir í skjali

2, skema 1. Uppsetingin skal harumframt vísa teir postar, sum eru neyðugir til tess at vísa innskot og lut í avlopi ella halli hjá luttakarunum í fyritøkuni.
Stk. 4. Innroknar ein fyritøka, sum er persónlig ogn hjá einum ella fleiri eigarum, ognir og skyldur umframt inntøkur og útreiðslur, sum ikki viðvíkja vinnuliga virkseminum, skulu hesi flokkast soleiðis, at tey týðiliga eru atskild frá vinnuliga virkseminum í fíggjarjavnanum og í rakstrarroknskapinum.

Innrokning og máting

§ 23. Fyritøkunnar ognir og skyldur umframt inntøkur og útreiðslur skulu innroknast og mátast miðvíst og reglufast samsvarandi vanliga viðurkendum mannagongdum við atliti at fyritøkunnar slagi og vavi.
Stk. 2. Ein fyritøka, sum er persónlig ogn hjá einum ella fleiri ognarum, kann lata vera við at innrokna ognir og skyldur hjá ognarunum, sum ikki viðvíkir vinnuliga virkseminum.

Upplýsingar

§ 24. Fyritøkan skal greiða frá teimum innrokningarháttum og teimum mátistøðum, sum eru nýtt í sambandi við postarnar í øllum staklutum í ársfrásøgnini.
Stk. 2. Fyritøkan skal serskilt upplýsa um:
1) eventualskyldur,
2) veðseting og aðra trygd í ognum,
3) rentur á innskotum í eginognina,
4) hvussu nógv, sum er býtt ella lutað út til eigararnar ella aðrar virkisluttakarar,
5) hvussu hallið er rindað, og
6) í hvønn mun útluting ella onnur avhendan er farin fram í reiðum peningi ella á annan hátt.

Stk. 3. Fyritøka, sum er persónlig ogn hjá einum einstøkum eigara, ella av hjúnafelagum í felag, og har eigarin ávikavist hjúnafelagarnir eiga ognir, skyldur, eventualskyldur ella veðsetingar, sum ikki viðvíkja vinnuliga virkseminum, skal upplýsast serskilt:
1) um hon letur vera við at innrokna viðkomandi ognir og skyldur,
2) um hon letur vera við at innrokna ella upplýsa um viðkomandi eventualskyldur,
3) um hon letur vera við at upplýsa um viðkomandi veðsetingar, og
4) hvussu fyrilit er tikið fyri eigarans og hjúnafelagsins innanhýsis ognarviðurskiftum.

Partur III
Roknskaparflokkur B

Kapittul 7
Um at gera ársfrásøgn

§ 25. Fyritøkur í roknskaparflokki B skulu gera eina ársfrásøgn, sum í minsta lagi skal innihalda eina leiðsluátekning, sbr. tó § 11, stk. 1, fíggjarjavna, rakstrarroknskap, notur, sbr. tó § 27, stk. 1, og eina leiðslufrágreiðing. Er ein grannskoðaraátekning ella onnur váttan latin í sambandi við ársfrásøgnina sambært §§ 156 ella 158, skulu grannskoðaraátekningin og váttanin takast við í ársfrásøgnini.
Stk. 2. Um upplýsingarnar frá einari móðurfyritøku eru tær somu sum samtaksins upplýsingar, kann móðurfyritøkan lata vera við at veita somu upplýsingar í egnum ársroknskapi og leiðslufrágreiðing.
Stk. 3. Fyrstu ferð ein fyritøka, sum áður hevur verið í roknskaparflokki A, ger ársfrásøgn eftir reglunum fyri roknskaparflokk B, kann fyritøkan velja at nýta hesar linkingar:
1) Tá ið ognir verða innroknaðar, sum sambært reglunum fyri roknskaparflokk A ikki skuldu verið innroknaðar, ella sum skuldu verið innroknaðar eftir einum øðrum mátistøði enn tí, sum er galdandi fyri roknskaparflokk B, kann virðið á ognini fíggjarjavnadagin undanfarna ár setast til kostprísin. Írokningarháttur og mátistøði fyri

ognina undanfarna ár skal upplýsast í notunum.
2) Fyri teir postar í ársroknskapinum, sum broytingar í innrokningarháttum og mátistøðinum ávirka, kunnu samanberingartøl eftir § 29 fyri tíðarskeiðið áðrenn roknskaparárið, verða gjørd upp eftir teimum hættum, ið higartil hava verið nýttir.

Stk. 4. Fyrstu ferð ein fyritøka ikki longur nýtir eitt ella fleiri undantøk í § 27, kann fyritøkan gera samanberingartøl fyri rakstrarroknskapin eftir § 29 fyri tíðarskeiðið áðrenn roknskaparárið, fyri teir postar, sum verða ávirkaðir av, at § 41 verður nýtt, eftir tí hátti, sum higartil hevur verið nýttir.

Undantak fyri smáfyritøkur

§ 26. Smáfyritøkur kunnu nýta undantøkini í § 27, sbr. tó stk. 3. Við smáfyritøkur er at skilja smáar fyritøkur í roknskaparflokki B, sum í tvey fylgjandi roknskaparár fíggjarjavnadagin ikki fara upp um tvey av fylgjandi støddarmørkum:
1) Ein fíggjarjavna upp á 3,5 mió. kr.,
2) eina nettosølu upp á 7 mió. kr., og
3) eitt miðaltal av ársverkum upp á 10 í roknskaparárinum.

Stk. 2. § 7, stk. 3 og 4 eru galdandi tá ið støddarmørkini sambært stk. 1 verða roknað.

Stk. 3. Uttan mun til, um krøvini viðvíkjandi støddarmørkunum í stk. 1 eru lokin, kunnu fylgjandi fyritøkur ikki nýta undantøkini í § 27:
1) Haldfyritøkur ella líknandi fyritøkur, sum hava kapitaláhugamál í øðrum fyritøkum, og sum útinna týðandi ávirkan á eina ella fleiri av hesum fyritøkum viðvíkjandi rakstrarligu og fíggjarligu leiðsluni.
2) Íløgufyritøkur ella líknandi fyritøkur, sum einans fáast við at seta pening sín í virðisbrøv, fastogn ella aðrar ognir, sum hava til endamáls at býta íløguváðan og at geva fyritøkuluttakarunum fíggjarligar ágóðar av úrslitinum av umsitingini av sínum ognum.
3) Fyritøkur, sum eru knýttar at fyritøkum, sum eru fevndar av nr. 2, sum hava fastan kapital, um tær atknýttu fyritøkurnar einans hava til endamáls at fáa til vegar fult inngoldnar kapitalpartar, sum eru givnir út av slíkum íløgufyritøkum.
4) Fyritøkur, sum fíggjarjavnadagin hava rættindi ella skyldur sambært avtalu, sum fyritøkan hevur gjørt viðvíkjandi avleiddum fíggjarligum amboðum.

§ 27. Smáfyritøkur sambært § 26, kunnu lata vera við at taka fylgjandi upplýsingar við í notunum til ársroknskapin:
1) Upplýsingar um nýttan roknskaparhátt sambært § 59.
2) Upplýsingar um skuld, sum fellur til gjaldingar meira enn 5 ár eftir fíggjarjavnadagin sambært § 69.
3) Upplýsingar um ávísar serligar postar sambært § 73, nr. 1 og 2.
4) Upplýsingar um miðaltalið av ársverkum í roknskaparárinum sambært § 74.

Stk. 2. Fyritøkur, sum nýta eitt ella fleiri av undantøkunum í stk. 1, skulu upplýsa um hetta í notunum.

Stk. 3. § 14, stk. 2 og 3 eru ikki galdandi fyri ársroknskapir, tá ið ein ella fleiri undantaksmøguleikar í stk. 1 eru nýttir.

Stk. 4. §§ 41-43 eru ikki galdandi fyri fyritøkur, sum nýta ein ella fleiri undantaksmøguleikar í stk. 1.

Flokking og uppseting

Almennar ásetingar

§ 28. Fíggjarjavni og rakstrarroknskapur skulu setast upp í skemayvirliti samsvarandi skjali 2, skema 1, 2, 3 ella 4.

Stk. 2. Postarnir í roknskapinum skulu standa serskilt og í tí raðfylgju, sum er ásett viðkomandi skema í skjali 2. Postarnir, sum eru frámerktir við arábaratølum 1, 2, 3 o.s.fr., kunnu býtast sundur. Nýggir arábaratalspostar kunnu

takast við, um innihaldið ikki frammanundan er fevnt av einum verandi posti.
Stk. 3. Arábaratalspostar kunnu dragast saman um hetta fremur greidleika.
Stk. 4. Uppseting og heitið á arábaratalspostum skulu tillagast, tá ið fyritøkunnar serligu viðurskifti gera tað neyðugt, sbr. tó stk. 6.
Stk. 5. Landsstýrisfólkið kann broyta skjal 2 til løgtingslógina. Landsstýrisfólkið kann harumframt, tá ið tørvur er á tí, gera serstøk skema fyri fyritøkur, hvørs bygnaður ella tørvur á serligum postum, ið hædd ikki er tikin fyri við reglunum í hesi løgtingslóg um at tillaga skema. Landsstýrisfólkið kann eisini gera serstøk skema tá ið broytingar í marknaðartreytum ella altjóða standardum gera hetta neyðugt.
Stk. 6. Landsstýrisfólkið kann áseta reglur, sum avmarka møguleikan fyri at víkja frá skema viðvíkjandi fíggjarjavna og rakstrarroknskapi sambært stk. 2, 2 og 3 pkt., og stk. 3 og 4, í tann mun hetta er neyðugt fyri at ársfrásagnir o.a. kunnu latast inn talgilt.

§ 29. Við hvønn post í fíggjarjavnanum og rakstrarroknskapinum skulu samsvarandi upphæddir verða tilskilaðar fyri undanfarna roknskaparár. Eru postarnir ikki beinleiðis sambæriligir við postarnar undanfarna ár, skulu síðstnevndu tillagast. Fyritøkan kann tó lata vera við at tillaga samanberingartøl, um orsøkin til, at parpostarnir ikki kunnu samanberast eru broytingar í ognum fyritøkunnar.
Stk. 2. Postar í fíggjarjavnanum og rakstrarroknskapinum, sum ikki vísa eina upphædd, skulu einans takast við, um posturin varð tikin við í undanfarna ársroknskapi.
Stk. 3. Stk. 1 og 2 eru galdandi í sambandi við upplýsingar í notunum, í tann mun samanberingartøl eru kravd í hesi løgtingslóg.

Fíggjarjavnin

§ 30. Fíggjarjavnin fevnir um innroknaðar ognir og skyldur, heruppií avsettar skyldur, og eginognin, sum er munurin millum hesar ognir og skyldur. Skuld er eginognin og innroknaðar skyldur samanlagt.

§ 31. Áogn undir ogn í umferð, sum fellur til gjaldingar meira enn eitt ár eftir, at roknskaparárið rennur út, verður mett at vera langfreistað. Hon skal bólkast serskilt fyri hvønn arábaratalspost, uttan so at samsvarandi upplýsingar verða givnar í notunum.
Stk. 2. Skyldur, sum falla til gjaldingar innan eitt ár eftir, at roknskaparárið er runnið, eru stuttfreistaðar. Aðrar skyldur eru langfreistaðar. Skyldurnar skulu bólkast í samsvari við hesi metingarstøði, fyri hvønn arábaratalspost, uttan so at samsvarandi upplýsingar verða givnar í notunum.

§ 32. Útreiðslur, sum eru goldnar í seinasta lagi fíggjarjavnadagin, men sum viðvíkja komandi ári, skulu bólkast sum tíðaravmarkingar undir ogn í umferð. Inntøkur, sum viðvíkja roknskaparinntøkum, men sum ikki falla til gjaldingar fyrr enn eftir fíggjajarvnadagin, skulu bólkast sum áogn.
Stk. 2. Gjaldingar, sum eru komnar inn í seinasta lagi fíggjarjavnadagin, men sum viðvíkja inntøkum í komandi árum, skulu bólkast sum tíðaravmarkingarpostar undir skyldum. Útreiðslur, sum viðvíkja roknskaparárinum, men sum verða goldnar í fyrsta lagi í komandi árum, skulu bólkast sum skuldarbindingar.

Rakstrarroknskapurin

§ 33. Rakstrarroknskapurin fevnir um innroknaðar inntøkur og útreiðslur.

§ 34. Undir postinum Framleiðslukostnaðir í virkisbýtta rakstrarroknskapinum verða innroknaðir teir kostnaðir, sum eru nýttir í framleiðsluni til tess at røkka søluni.
Stk. 2. Í postunum Framleiðslukostnaðir, Útbreiðslukostnaðir og

Fyrisitingarkostnaðir í tí virkisbýtta rakstrarroknskapinum roknast avskrivingar og niðurskivingar uppí, umframt starvsfólkakostnaðir, sum eru knýttir at nevnda virksemi.

§ 35. Leiðslunnar uppskot til avgerð um nýtslu av vinningi ella at rinda hall skal setast í tilknýti til rakstrarroknskapin. Leiðslunnar uppskot til vinningsbýti skal standa sum ein serligur postur í eginognini undir Fluttur vinningur ella hall sambært skjali 2, skema 1 ella 2.
Stk. 2. Hevur fyritøkan í roknskaparárinum lutað út serligt vinningsbýti, sbr. §§ 181 og182 í vinnufelagalógini, skal hetta standa serskilt í úrslitsbýtinum. Er serligt vinningsbýti útgoldið eftir at roknskaparárið er liðið, skal hetta standa í tilknýti til úrslitsbýtið.

§ 36. Fyritøkan kann skriva hesar postar í samandrátti og í staðin seta ein post, sum skal nevnast, Bruttovinningur ella Bruttohall:
1) Postarnir nr. 1-5 í skjali 2, skema 3, og
2) postarnir nr 1-3 og 6 í skjali 2, skema 4.

Stk. 2. § 14, stk. 2 er ikki galdandi fyri postar, sum eru skrivaðir í samandrátti sambært stk. 1.
Stk. 3. Fyrsta árið, ið fyritøkan ikki longur nýtir stk. 1, kann fyritøkan lata vera við at nýta samanberingartøl sambært § 29, fyri umrøddu postarnar.
Stk. 4. § 162, stk. 6, er galdandi tá ið ein fyritøka nýtir møguleikan í stk. 1.

Kapittul 8
Innrokning og máting

Almennar ásetingar

§ 37. Ognir verða innroknaðar í fíggjarjavnan, tá ið tað er sannlíkt, at fíggjarligir fyrimunir fara at koma fyritøkuni til góðar í framtíðini, og virðið á ognini kann gerast upp álítandi. Uttan mun til lýsingina í skjali 1, C, nr. 1, kann fyritøkan tó lata vera við at innrokna ognir, sum fyritøkan ikki eigur. Fyritøkan kann harumframt lata vera við at innrokna innanhýsis menningarverkætlanir og innanhýsis ment rættindi, heruppií patent og líknandi rættindi. Fyritøkan kann ikki innrokna aðra innanhýsis menta ogn.
Stk. 2. Uttan mun til stk. 1 kunnu eventualognir fyrst innroknast, tá ið ognin eftir øllum líkindum fer at elva til ein fíggjarligan fyrimun, sum fer at koma fyritøkuni til góðar í framtíðini.
Stk. 3. Skyldur skulu innroknast í fíggjarjavnan tá ið tað er sannlíkt, at fíggjarligir fyrimunir fara at fara frá fyritøkuni í framtíðini, og virðið á skylduni kann mátast álítandi. Innroknar fyritøkan ikki ognir, sum eru nevndar í stk. 1, 2. pkt. kunnu skyldur sum hoyra til heldur ikki innroknast, tað veri seg uttan mun til, hvussu skyldur eru allýstar í skjali 1, C, nr. 7.
Stk. 4. Tá ið ognir og skyldur verða innroknaðar og mátaðar, skal fyrilit havast fyri øllum viðurskiftum, heruppií váðar og hall havd í væntu, sum eru íkomin, áðrenn ársfrásøgnin er liðugt gjørd, og sum sanna ella avsanna viðurskifti, sum eru íkomin í seinasta lagi fíggjarjavnadagin.

§ 38. Partafeløg, smápartafeløg og partnarafeløg, ið veita lán, trygd ella aðra fíggjarliga hjálp sambært § 206, stk. 2, og § 214, stk. 1, í vinnufelagalógini, skulu umflokka eina upphædd svarandi til lánið, trygdina ella ta fíggjarligu hjálpina frá postinum, Fluttur vinningur ella hall, ella øðrum posti undir eginognini, ið kann verða nýttur til vinningsbýti, til postin Tiltakspeningur fyri útlán og trygdarveðsetingar. Hesin tiltakspeningur kann ikki verða elimineraður við virkisins undirskoti ella verða minkaður á annan hátt. Tiltakspeningurin skal tó minkast ella verða elimineraður í tann mun, lánið, trygdin ella fíggjarligi studningurin verður minkaður ella verður fingin av vegnum.
Stk. 2. Trygd, sum er veitt í ósamsvari við §§ 206 og 210 í vinnufelagalógini, er fevnd av stk. 1, um so er, at

trygdarveitingin er bindandi fyri felagið sambært § 215, stk. 3, í vinnufelagslógini.

§ 39. Partafeløg, smápartafeløg og partnarafeløg, har tann teknaði fyritøkukapitalurin ikki er fult inngoldin, skulu innrokna ikki inngoldnan kapital og ikki inngoldnan yvirkurs sum áogn, sbr. lýsing av ogn í skjali 1, C, nr. 1, sbr. stk. 2.
Stk. 2. Fyritøkan skal umflokka eina upphædd svarand til ikki inngoldnan kapital og yvirkurs frá postinum, Fluttur vinningur ella hall ella øðrum posti undir eginognini, ið kann verða nýttur til vinningsbýti, til postin, Tiltakspeningur fyri ikki indgoldnan fyritøkukapital og yvirkurs. Hesin tiltakspeningur kann ikki eliminerast við virkisins undirskoti ella verða minkaður á annan hátt. Tiltakspeningurin skal tó minkast ella eliminerast í tann mun, fyritøkukapitalurin og yvirkursurin verður inngoldin fyritøkuni.
Stk. 3. Íverksetarafeløg skulu árliga seta av í minsta lagi 25% av yvirskotinum hjá fyritøkuni til bundnan tiltakspening til at byggja upp kapitalgrundarlag fyritøkunnar, til hesin tiltakspeningur saman við felagskapitalinum tilsamans er í minsta lagi kr. 50.000,00. Hesin tiltakspeningur kann ikki verða strikaður við íverksetarafelagsins halli ella á annan hátt verða lækkaður. Tiltakspeningurin skal tó strikast ella lækkast í tann mun felagskapitalurin økist.

§ 40. Fyrstu ferð ognir og skyldur verða innroknaðar, skulu tær mátast til kostprís. Eftir fyrstu innrokning skulu ognir mátast til kostprís og skyldur til nettosøluvirði, um ikki annað er ásett í hesi løgtingslóg.
Stk. 2. §§ 143-145 eru galdandi í sambandi við, at verandi virksemi verður yvirtikið.

§ 41. Tá ið fíggjarligar ognir eru innroknaðar fyrstu ferð, skal fyritøkan leypandi virðisjavna fíggjarligar ognir og skyldur á handilsgoymsluni, ella í avleiddum fíggjarligum amboðum, til dagsvirðið, sbr. tó stk. 2, eftir hesum leisti:

1) Dagsvirðið verður mátað til søluvirðið, sum kann staðfestast fyri viðkomandi ogn ella skuld á einum vælvirkandi marknaði.
2) Kann søluvirðið ikki beinleiðis staðfestast fyri ognina ella skuldina, sbr. nr. 1, skal dagsvirðið mátast við støði í marknaðarsøluvirðinum fyri einstøku partarnar av ognini ella skuldini.
3) Er ongin vælvirkandi marknaður fyri partarnar av ognini ella skuldini, sbr. nr. 2, skal dagsvirðið í størst møguligan mun mátast til nærkaða søluvirðið við tí kapitalvirði, sum er viðkomandi fyri ognina ella skuldina, um hetta kann roknast samsvarandi vanliga viðurkendum virðisásetingarmyndlum og virðisásetingarháttum.
4) Ber ikki til at rokna nærkaða søluvirðið, sbr. nr. 3, skal ognin ella skuldin mátast til kostprís.

Stk. 2. Fyritøkan skal, eftir fyrstu innrokning, leypandi virðisjavna niðanfyrinevndu til amortiseraðan kostprís:

1) Útlán og áogn, sum stava frá fyritøkunnar egna virksemi, sum ikki liggja á handilsgoymsluni,
2) onnur fíggjarlig ogn, sum ikki er avleidd fíggjarlig amboð, og sum verða hildin, til tey ganga út, og
3) fíggjarligar skyldur, burtusæð frá teimum, sum eru nevndar í stk. 1, 1. pkt.

Stk. 3. Ásetingarnar í stk. 1 og 2 eru ikki galdandi fyri:

1) kapitalpartar í dótturfyritøkum,
2) kapitalpartar í fyritøkum við felags leiðslu og í leyst atknýttum fyritøkum,
3) egnar kapitalpartar,
4) eginognaramboð, sum fyritøkan hevur útgivið, til dømis tekningarrættindi og optiónir,
5) sáttmálar viðvíkjandi treytaðari samsýning fyri at fáa til vegar eina fyritøku ella virksemi í samband við fyritøkusamanlegging,
6) sáttmálar, sum eru grundaðir á rávørur, sum geva pørtunum rætt til at avrokna í

reiðum peningi ella í fíggjarligum amboðum, og sum tískil eru at meta sum avleidd fíggjarlig amboð, og sum eru gjørdir fyri at tryggja, og sum framhaldandi tryggja fyritøkunnar væntaða krav við atliti at keypi, sølu ella nýtslu, og á fyrsta sinni vórðu gjørdir við hesum fyri eyga, og væntast at verða avroknaðir við, at rávøran verður latin keyparanum, og

7) onnur fíggjarlig amboð við slíkum serligum eginleikum, at amboðið eftir vanliga viðurkendum framferðarháttum verður innroknað og mátað øðrvísi enn onnur fíggjarlig amboð.

Stk. 4. Uttan mun til stk. 1-3 kann fyritøkan lata vera við at máta kapitalpartar til dagsvirði, um kapitalpartarnir ikki verða handlaðir á einum virknum marknaði.
Stk. 5. Uttan mun til stk. 1-4 kann fyritøkan innrokna og máta fíggjarligar ognir og skuld samsvarandi altjóða roknskaparsstandardunum, sum eru samtyktir av Evropa-Kommissiónini samsvarandi Evropatingsins og Ráðsins fyriskipan nr. 1606/2002 frá 19. juli 2002 um at nýta altjóða roknskaparstandardar, við seinni broytingum, sbr. skjal 4. Nýtir fyritøkan hendan møguleika, skal fyritøkan veita tær upplýsingar um fíggjarligar ognir og skyldur, sum eru kravdar sambært nevndu standardum.

§ 42. Ognir og skyldur, ella partar av hesum, sum eru tryggjaði við einum trygdaramboði, sum skal mátast til dagsvirðið sambært § 41, stk. 1, kunnu mátast til dagsvirðið.

§ 43. Eftir at íløgufastognir fyrstu ferð eru innroknaðar, kunnu tær leypandi virðisjavnast til dagsvirðið.
Stk. 2. Fyritøkur, ið umskapa livandi djór ella plantur lívfrøðiliga við tí endamáli at selja, virka, nýta ella ala fleiri djór og plantur, kunnu, eftir at hesi eru innroknaði fyrstu ferð, leypandi virðisjavna hesar ognir til dagsvirðið.
Stk. 3. Ásetingarnar í § 41, stk. 1, nr. 2-4, eru eisini galdandi fyri stk. 1 og 2.

§ 44. Tá ið postar í fíggjarjavnanum verða umroknaðir úr fremmandum gjaldoyra til ta peningaeind, sum verður nýtt í ársfrásøgnini, verður gjaldoyrakursurin fíggjarjavnadagin at nýta fyri peningaligar ognir og skyldur. Fyri aðrar postar í fíggjarjavnanum verður gjaldoyrakursurin transaktiónsdagin nýttur. Fyri ognir og skyldur, sum ávikavist eru uppskrivaðar, niðurskrivaðar ella javnaðar, verður gjaldoyrakursurin á endurmetingartíðspunktinum tó nýttur í staðin.
Stk. 2. Er roknskapur gjørdur í fremmandum gjaldoyra fyri virksemi, og er virksemið ikki javnan innroknað í fyritøkunnar peningarensl, skulu postar í fíggjarjavnanum umroknast til gjaldoyrakursin fíggjarjavnadagin. Munurin skal innroknast beinleiðis í eginognina í einari dagsvirðisgoymslu.
Stk. 3. Viðvíkir umrokningin eftir stk. 1 ein peningaligan post, sum er ein partur av fyritøkunnar nettoíløgum í útlendskum eindum, skal munurin innroknast beinleiðis í eginognini í einari dagsvirðisgoymslu.

Støðisognir

§ 45. Kostprísurin fyri støðisogn skal innihalda allar útreiðslur, sum útveganin hevur havt við sær fram til tað tíðspunkt ognin er til reiðar at taka í nýtslu, ella sum beinleiðis hoyra til framleiddu ognina. Rentur av kapitali, sum er læntur fyri at fíggja framleiðsluna, og sum viðvíkir framleiðslutíðarskeiðnum, kunnu harumframt innroknast í kostprísin.

§ 46. Fyritøkan kann uppskriva materiellar og immateriellar støðisognir og kapitalpartar í dótturfyritøkum og leyst atknýttum fyritøkum til dagsvirðið. Immateriellar støðisognir kunnu tó einans uppskrivast, um tær verða handlaðar á einum virknum marknaði. Íløguognir kunnu tó ikki uppskrivast til dagsvirðið eftir 1. pkt.

Stk. 2. Uttan mun til § 41, stk. 1, 2.-4. pkt. kann endurútveganarvirðið ella nettosøluvirðið nýtast, um tað ikki ber til at fáa til vegar ein nærkaðan søluprís.
Stk. 3. Ein upphædd, sum svarar til uppskrivingina, skal innroknast beinleiðis í postin, Tiltakspeningur til uppskriving, undir eginognini. Hesin tiltakspeningur kann ikki verða elimineraður við fyritøkunnar halli ella minkast á nakran annan hátt, sbr. tó næsta punktum. Tiltakspeningurin skal upploysast ella minkast í tann mun uppskrivaða ognin:

1) verður seld ella fer úr virkseminum,
2) verður niðurskrivað vegna eitt lægri endurvinningarvirði sambært § 47,
3) er knýtt at útsettum skatti, sum skal setast av sambært § 53,
4) verður flutt aftur orsakað av broyttum roknskaparligum metingum sambært § 57, ella
5) minkar í virði vegna avskrivingar.

§ 47. Støðisogn, sum ikki javnan verður virðisjavnað til dagsvirði sambært §§ 41-43, skal niðurskrivast til eitt lægri endurvinningarvirði.
Stk. 2. Ber ikki til at áseta eitt endurvinningarvirði fyri ta einstøku ognina, skal ognin heildarmetast í minsta ognarbólkinum, har tað, samsvarandi einari heildarmeting, ber til at áseta álítandi endurvinningarvirði. Niðurskrivingar viðvíkjandi einum slíkum bólki av ognum verða býttar miðvíst á einstøku ognirnar.
Stk. 3. Tað í stk. 1 umrødda lægra endurvinningarvirðið kann ikki verða varðveitt tá ið grundgevingin fyri niðurskrivingini ikki longur er til staðar. Niðurskrivingar á goodwill kunnu tó ikki flytast aftur.

§ 48. Kostprísur, dagsvirði ella endurvinningarvirði fyri materiella ella immateriella støðisogn við avmarkaðari nýtslutíð skulu lækkast við avskrivingum, sum miða ímóti, at ognir verða avskrivaðar miðvíst í nýtslutíðini. Hetta er tó ikki galdandi fyri ognir, sum javnan verða virðisjavnaðar til dagsvirði sambært § 43.
Stk. 2. Avskrivingar skulu roknast við fyriliti fyri tí restvirði, sum ognin væntast at hava eftir lokna nýtslutíð.
Stk. 3. Í serligum førum, har ein fyritøka ikki er før fyri at gera eina neyva meting viðvíkjandi nýtslutíðini viðvíkjandi goodwill ella menningarútreiðslum, verður metta nýtslutíðin sett til 10 ár.

§ 49. Fyritøkan kann innrokna kapitalpartar í kapitaláhugamálum, dótturfyritøkum og leyst atknýttum fyritøkum til roknskaparliga innara virðið fyri nevndu fyritøkur. Um so er, skal fyritøkan nýta innara virðið viðvíkjandi øllum dótturfyritøkum, øllum leyst atknýttum fyritøkum, ella fyri øll sløg av fyritøkum samsvarandi ásetingunum í stk. 2-5, sbr. tó stk. 6.
Stk. 2. Fyritøkan skal innrokna og máta roknskaparliga innara virðið eftir egnum roknskaparhátti.
Stk. 3. Ásetingarnar í §§ 140-142 um samtaksroknskapir skulu nýtast samsvarandi, tó soleiðis at elimineringar viðvíkjandi leyst atknýttum fyritøkum einans eru galdandi lutfalsliga í mun til ognarpart fyritøkunnar. Ásetingin í § 137, stk. 2, skal nýtast samsvarandi. Ger ein dótturfyritøka ein samtaksroknskap, verður hetta nýtt sum grundarlag. Skrásetur dótturfyritøkan kapitalpartar í dótturfyritøkuni leyst atknýttum fyritøkum til roknskaparligt innara virði, kunnu hesi virði tó nýtast sum grundarlag.
Stk. 4. Fyritøkan skal uppskriva ella niðurskriva virðið á kapitalpørtum í mun til úrslitið og í mun til møguligar flytingar í roknskaparliga innara virðinum, sum ikki er partur av úrslitinum hjá kapitaláhugamálinum, dótturfyritøkuni ella hjá teimum leyst atknýttu fyritøkunum. Úrslitið og flytingarnar í roknskaparliga innara virðinum, sum ikki er partur av úrslitinum hjá kapitaláhugamálinum, dótturfyritøkuni ella hjá leyst atknýttu fyritøkunum, verður innroknað lutfalsliga

til teir partar, sum svara til kapitalpartarnar.
Stk. 5. Ein upphædd, sum svarar til heildarnettouppskrivingina sambært stk. 4, skal innroknast í postin, Tiltakspeningur av nettouppskrivning eftir innanvirðisháttinum, undir eginognini. Tiltakspeningurin kann ikki innroknast við eini negativari upphædd. Hesin tiltakspeningur kann burturbeinast við fyritøkunnar halli, men kann ikki minkast á annan hátt. Tiltakspeningurin skal tó uppløysast ella minkast, í tann mun teir uppskrivaðu kapitalpartarnir:

1) verða seldir, ella
2) verða fluttir aftur vegna broyttar roknskaparligar metingar, sbr. § 57, stk. 1.

Stk. 6. Ein fyritøka kann lata vera við at nýta innanvirðisháttin fyri kapitalpartar í einari dótturfyritøku, sum er fevnd av § 135, stk. 2, nr. 1-3, ella í einum kapitaláhugamáli ella í einari leyst atknýttari fyritøku, um tær neyðugu upplýsingarnar ikki eru kendar. Um so er, verða kapitalpartarnir máldir til kostprís, sbr. § 40. Kapitalpartar í fyritøkum, sum eru fevndar av § 135, stk. 2, nr. 3, kunnu tó mátast til dagsvirði eftir § 41, stk. 1, 2.-4. pkt. Fyri kapitaláhugamál ella leyst atknýttar fyritøkur kann virðisjavningin sambært stk. 4 harumframt fara fram grundað á seinasta ársroknskap fyri ta leyst atknýttu fyritøkuna, sjálvt um hon hevur eitt roknskaparár, sum víkur frá tí hjá fyritøkuni.

Ogn í umferð

§ 50. Kostprísurin fyri ogn í umferð skal innihalda allar útreiðslur, sum útveganin hevur havt við sær, ella sum beinleiðis hoyra til framleiddu ognina.
Stk. 2. Kostprísurin fyri ogn í umferð kann harumframt innihalda teir kostnaðir, sum eru beinleiðis knýttir at viðkomandi ogn í umferð, um kostnaðirnir viðvíkja framleiðslutíðarskeiðinum. Harumframt kunnu rentur av kapitali, sum er læntur fyri at fíggja framleiðsluna, og sum viðvíkir framleiðslutíðarskeiðnum, innroknast í kostprísinum.
Stk. 3. Útbreiðslukostnaðir kunnu ikki innroknast í kostprísin sambært stk. 1 og 2.

§ 51. Kostprísurin fyri vørugoymslur kann roknast við støði í vektaðum miðalprísum, eftir fyrst inn-fyrst út, t.e. FIFO-háttinum, ella við støði í einum øðrum líknandi hátti, sum endurspeglar virðið á fysisku vørugoymsluni fíggjarjavnadagin.

§ 52. Ognir í umferð, sum ikki leypandi verða virðisjavnaðar til dagsvirðið eftir §§ 41-43, skulu niðurskrivast til lægra nettosøluvirðið.
Stk. 2. Tað í stk. 1 umrødda lægra virðið kann ikki varðveitast, tá ið grundgevingin fyri niðurskrivingini ikki longur er til staðar.

Avsettar skyldur

§ 53. Skyldur, sum eru óvissar í mun til støddina ella gjaldkomutíð, skulu innroknast í fíggjarjavnan og rakstrarroknskapin sum avsettar skyldur. Sum avsettar skyldur verður roknað útsettur skattur, garantiskyldur og eftirlønarskyldur, sum eru ábyrgd fyritøkunnar. Avsettar skyldur til umskipan skulu innroknast, tá ið avgerð er tikin um umskipan og tilgongdin at útinnna umskipanina er byrjað.
Stk. 2. Avsettar skyldur, sum ikki viðvíkja inntøkuskattum, kunnu mátast til kapitalvirðið.

Rakstrarroknskapurin

§ 54. Í rakstrarroknskapinum verða allar inntøkur innroknaðar í stigum so hvørt sum tær verða forvunnar. Fyritøkan kann tó lata vera við at innrokna inntøkur so hvørt arbeiðið verður greitt úr hondum eftir framleiðsluháttinum. Inntøkur sambært § 41, stk. 1 og 2, § 42 og § 43, stk. 1 og 2, verða tó altíð mettar at verða forvunnar. Í rakstrarroknskapinum verður somuleiðis innroknað:

1) roknskaparpartar, sum stava frá dótturfyritøkum ávikavist leyst atknýttum fyritøkum, sum verða mátaðar til innara virði, sbr. § 49, sum serskildir postar,
2) allar útreiðslur, heruppií avskrivingar, niðurskrivingar, javningar og avsettar skyldur, og
3) afturførdar upphæddir, sum hava verið innroknaðar í rakstrarroknskapin vegna broyttar roknskaparligar metingar sambært § 57, stk. 1.

Stk. 2. Upphæddir, sum skyldast fylgjandi skulu ikki innroknast í rakstrarroknskapin, men skulu innroknast beinleiðis í eginognina:

1) Uppskrivingar og afturførdar uppskrivingar sambært § 46, og umflokkingar av upphæddum til avsettar skyldur, sum stava frá eini slíkari uppskriving.
2) Inntøkur og útreiðslur í sambandi við keyp og sølu av egnum kapitalpørtum.
3) Inntøkur og útreiðslur, heruppií afturførdar inntøkur og útreiðslur, sum stava frá ognum og skyldum, sum fyritøkan einans nýtir til at tryggja virðið á ognum og skyldum við, sum fyritøkan væntar at móttaka ella átaka sær.
4) Munir í upphæddum, sum eru íkomnar í sambandi við, at postar í fíggjarjavnanum eru umroknaðir í virksemi, sum ikki javnan verður innroknað í fyritøkunnar peningarensl sambært § 44, stk. 2, og munir í upphæddum, sum viðvíkja fyritøkunnar nettoíløgum í útlendskum eindum sambært § 44, stk. 3.
5) Broytingar viðvíkjandi háttinum ella grundarlagnum fyri innrokning ávikavist máting.
6) Broytingar viðvíkjandi nýttu peningaligu eindini sambært § 16, stk. 2.
7) Afturførdar upphæddir, sum skyldast munandi mistøkum sambært § 57, stk. 2.
8) Tryggingarfrøðiligur vinningur ella hall, sum eru liður í at gera upp eftirlønarskylduna.

Stk. 3. Fyri stórar fyritøkur sambært § 7, stk. 2, nr. 3, og fyri fyritøkur í roknskaparflokki D, skulu inntøkur og útreiðslur, sum sambært stk. 2, nr. 3 og 4 skulu innroknast beinleiðis í eginognina, innroknast til dagsvirðið, sum verður upployst, tá ið tær innroknaðu upphæddirnar verða seldar ella afturførdar.

Stk. 4. Innskot, útluting og onnur avhendan, sum fer fram sum liður í kapitalútvegan, afturført innskot av kapitali ávikavist býti av avlopi til virkisluttakararnar, skal ikki innroknast í rakstrarroknskapin, men skal innroknast beinleiðis í eginognina.

Stk. 5. Ásetingin í stk. 4 er eisini galdandi viðvíkjandi útlutanum til onnur enn eigararnar, tá ið útlutanin fer fram sambært fyritøkunnar viðtøkum.

§ 55. Inntøkur og útreiðslur, sum stava frá ognum og skyldum, hvørs virði er munagott tryggjað við øðrum ognum og skyldum, kann uttan mun til forboðið fyri mótrokning í § 16, stk. 1, nr. 8, mótroknast í inntøkum og útreiðslum, sum stava frá trygdaratgerðunum.

Stk. 2. Bruttovirðið á mótroknaðu upphæddini skal upplýsast í notunum.

Um at broyta roknskaparhátt

§ 56. Broytir fyritøkan roknskaparhátt, skulu teir postar í ársroknskapinum, sum verða ávirkaðir, broytast samsvarandi nýggja roknskaparháttinum við at innrokna ávirkanina, ið broytingin ber við sær, beinleiðis á eginognina primo í roknskaparárinum. Samanberingartøl skulu broytast samsvarandi nýggju mannagongdini.

Stk. 2. Broytir fyritøkan roknskaparhátt til tess at kunna uppskriva ognir eftir § 46, stk. 1, skal innrokning fara fram beinleiðis á eginognini. Uppskrivingar skulu

viðgerast eftir § 46, stk. 3. Samanberingartøl skulu ikki tillagast.
Stk. 3. Landsstýrisfólkið kann áseta reglur fyri fyritøkur, sum áður hava gjørt ársfrásøgn eftir einum øðrum regluverki enn hesi løgtingslóg, sum kunnu víkja frá reglunum í stk. 1 og 2 í tann mun tað er neyðugt fyri at lætta um í sambandi við skiftið til at nýta hesa løgtingslóg

Broytingar í roknskaparligum metingum ella vegna munandi mistøk

§ 57. Verða upphæddir broyttar, sum eru innroknaðar í einum eldri roknskaparári vegna broyttar roknskaparligar metingar, skal ávirkanin viðgerast á sama hátt sum tær upprunaligu metingarnar. Avskrivingar, sum eru gjørdar í undanfarnum árum, kunnu ikki afturførast.
Stk. 2. Inniheldur ársroknskapurin fyri eitt undanfarið roknskaparár munandi mistøk, skal peningaliga ávirkanin av rættingini innroknast beinleiðis á eginognina primo í roknskaparárinum, og samanberingartølini skulu tillagast.

§ 58. Notur í ársroknskapinum skulu standa í somu raðfylgju, sum teir postar í rakstrarroknskapinum og í fíggjarjavnanum, sum tær viðvíkja.

Kapittul 9
Upplýsingar

Notuupplýsingar

Nýttur roknskaparháttur

§ 59. Greiðast skal frá teimum innrokningarhættum og tí mátistøði, sum er nýtt viðvíkjandi postunum í fíggjarjavnanum, rakstrarroknskapinum, notunum og í leiðslufrágreiðingini. Harumframt skal skiljast, hvønn roknskaparflokk fyritøkan hevur gjørt ársfrásøgn fyri. Verða upphæddirnar tilskilaðar í einum øðrum gjaldoyra, sum ikki er danskar krónur ella evrur, sbr. § 19, 2, pkt., skulu fylgjandi upplýsast:

1) Kursurin á tilskilaða gjaldoyranum fíggjarjavnadagin í mun til danskar krónur, og
2) tann samsvarandi gjaldoyrakursurin fíggjarjavnadagin undanfarna roknskaparár.

Stk. 2. Frágreiðingin fyri viðkomandi postar skal í minsta lagi fevna um:

1) Innrokningarhátt og mátistøði fyri ognir og skyldur, heruppií í hvønn mun rentur verða innroknaðar í kostprísin, og eftir hvørjum hættum og grundarlagi uppskrivingar, niðurskrivingar, avskrivingar, og javningar verða gjørdar. Heruppií skal nevnast:
   a) Teir virðisásetingarmyndlar og virðisásetingarhættir, ið eru nýttir í sambandi við, at dagsvirðið er gjørt upp, tá ið ognir ella skyldur mátast til dagsvirðið sambært §§ 41-43, og dagsvirðið ikki kann mátast við støði í eygleiðingum á einum virknum marknaði.
   b) Avskrivingarháttur, metingar viðvíkjandi restvirði og nýtslutíð í sambandi við avskrivingar á støðisogn. Grundgevast skal fyri avskrivingartíðarskeiðinum fyri goodwill.
   c) Teir hættir, sum eru nýttir í sambandi við, at nettosølan er innroknað og mátað, uttan mun til at fyritøkan annars ikki upplýsir um nettosøluna sambært § 36.
2) Teir hættir, sum eru nýttir í sambandi við, at fremmant gjaldoyra er umroknað til ta valdu peningaeindina.
3) Hættirnir sambært § 55 til at tryggja virðið á ognum og skyldum, og hættirnir til at tryggja ogn og skuld, sum fyritøkan ávikavist væntar at móttaka og átaka sær.
4) Innrokningarhættirnir og grundarlagið fyri máting, sum er nýtt í sambandi við fyritøkusamanlegging.
5) Hvussu lutafeløg hava viðgjørt eftirgjaldingar frá, umframt afturgjaldingar til luthavar.

§ 60. Verða roknskaparligar metingar broyttar sambært § 57, skal greiðast frá broyttu metingunum, eins og upplýsast skal um peningaligu ávirkanina á ognir, skyldur, fíggjarligu støðuna og úrslitið, í tann mun hetta letur seg gera. Sama er galdandi, um innrokning og máting av ogn og skuld verður broytt vegna munandi mistøk.

§ 61. Er virksemissamansetingin hjá fyritøkuni broytt í roknskaparárinum, skulu upplýsingar gevast, sum gera tað møguligt at samanbera virksemi fyritøkunnar ár um ár. Fyritøkan kann tó lata vera við at geva slíkar upplýsingar, um samanberingartølini fyri fíggjarjavnan og rakstrarroknskapin verða lagað til tær broytingar, sum eru farnar fram í roknskaparárinum.
Stk. 2. Kunnu upphæddir í roknskaparárinum og í undanfarna ári ikki samanberast, ella eru upphæddirnar ikki tillagaðar, skal tilskilast, at til ber ikki at samanbera upphæddirnar ávikavist at upphæddirnar eru tillagaðar, og harumframt skal grundgevast ítøkilig og nøktandi fyri hesum.

Eginogn

§ 62. Stórar fyritøkur sambært § 7, stk. 2, nr. 3, og fyritøkur í roknskaparflokki D skulu gera eitt yvirlit, sum vísir flytingar í dagsvirðisgoymsluni sambært § 54, stk. 3, sum eru farnar fram í roknskaparárinum.

Ognir

§ 63. Uppskrivar fyritøkan støðisogn, sum ikki leypandi verður virðisjavnað til dagsvirðið sambært §§ 41-43, skal upplýsast um fylgjandi viðurskifti:
1) Roknskaparliga virðið í fíggjarjavnanum, sum vildi verið innroknaður, um uppskrivingarnar eftir § 46, stk. 1, ikki vórðu framdar.
2) Viðvíkjandi postinum, Tiltaksgrunnur fyri uppskrivingar, undir eginognini:
   a) Støddin primo í roknskaparárinum,
   b) tilgongd í roknskaparárinum,
   c) ársins afturføringar av uppskrivingum frá undanfarnum árum,
   d) ársins avskrivingar,
   e) fráfaringar í roknskaparárinum, og
   f) støddin ultimo í roknskaparárinum.
3) Innrokning og máting av skattliga virknaðinum, sum flytingarnar í uppskrivingargrunninum hava havt við sær sambært nr. 2.

§ 64. Fyri hvørt slag av ogn ella skuld, sum verður mátað til dagsvirðið sambært §§ 41-43, skal upplýsast um:
1) dagsvirðið ultimo í roknskaparárinum,
2) broytingar í dagsvirðinum, sum óbeinleiðis eru innroknaðar í rakstrarroknskapin, og
3) broytingar, sum eru innroknaðar í dagsvirðisgoymsluna sambært § 54, stk. 3 undir eginognini.

Stk. 2. Verða ogn ella skuld mátað til dagsvirðið sambært §§ 41-43, og verður dagsvirðið ikki mátað við støði í eygleiðingum á einum virknum marknaði, skal upplýsast um tær høvuðsfortreytir, sum eru nýttar í sambandi við, at dagsvirðið er roknað út.
Stk. 3. Upplýsingar sambært stk. 2 kunnu gevast samlað fyri eitt slag ella fyri ein bólk av ogn ella skuld, um høvuðsfortreytirnar, sum eru nýttar í sambandi við, at dagsvirðið er roknað út fyri ávikavist slag ella bólk av ogn ella skuld, sum ikki innanhýsis víkja munandi frá hvørjum øðrum.

§ 65. Fyri avleidd fíggjarlig amboð, sum leypandi verða mátað til dagsvirðið sambært § 41, stk. 1, skal upplýsast um amboðsins vav og slag, umframt um týdningarmiklar treytir, sum kunnu fáa týdning fyri upphæddina, tíðspunktið og trygdina fyri framtíðar peningastreymar.
Stk. 2. Upplýsingar sambært stk. 1 kunnu gevast samlað fyri einsháttað avleidd fíggjarlig amboð.

§ 66. Fyritøkan skal upplýsa um positivar og negativar munir í upphæddum, sum verða staðfestir í sambandi við, at kapitalpartar verða innroknaðir fyrstu ferð sambært § 49. Munirnir í upphæddum verða roknaðir út sambært § 142, sbr. §§ 143 og 144.

§ 67. Innroknar fyritøkan rentuútreiðslur sum ein liður í kostprísinum fyri ogn, skal rentuupphæddin upplýsast fyri hvønn post.

§ 68. Lutafeløg skulu greiða frá samlaðu eftirgjaldingunum frá ella afturgjaldingum til lutahavararnar.

Skyldur og eventualskyldur

§ 69. Fyritøkan skal upplýsa um tann partin av samlaðu skuldini, sum fellur til gjaldingar meira enn 5 ár eftir fíggjarjavnadagin.

§ 70. Fyritøkan skal upplýsa um samlaðu støddina av sínum eventualskyldum, sum ikki eru innroknaðar í fíggjarjavnanum, heruppií veðhaldsskyldur og borganarskyldur. Harumframt skal fyritøkan upplýsa um samlaðu støddina av øðrum skyldum, heruppií langtíðarleiguskyldur, sum ikki eru innroknaðar í fíggjarjavnanum.
Stk. 2. Hevur fyritøkan latið veð í ella veitt aðra trygd í ognum, skal fyritøkan upplýsa um hetta og tilskila vavið av samlaðu veðsetingunum og trygdarsetingunum, heruppií tilskila roknskaparliga virðið á ávikavist veðsettum ognum og teimum ognum, sum trygd er veitt í.
Stk. 3. Fyritøkan skal upplýsa serskilt um skyldur sínar sambært stk. 1 og um veðsetingar og aðrar trygdarsetingar sambært stk. 2, mótvegis ávikavist atknýttum og leyst atknýttum fyritøkum.

Flokking

§ 71. Arábaratalspostar, sum fyri at fremja greidleika eru skrivaðir í samandrátti, skulu setast fyri seg í notunum. Samsvarandi upphæddirnar fyri undanfarna roknskaparár skulu tilskilast.

§ 72. Um ogn ella skuld hoyra undir fleiri postar sambært skjali 2, skema 1 ella 2, skal samband teirra við aðrar postar upplýsast í notunum, ella í tilknýti til postarnar.

Rakstrarroknskapurin

§ 73. Fyritøkan skal upplýsa um støddina og slagið av inntøkupostum ella útreiðslupostum, sum eru serligir, grundað á teirra stødd ella slag. Heruppií skulu upplýsingar latast um ársins:
1) afturføringar av niðurskrivingum á ogn í umferð,
2) niðurskrivingar á ogn í umferð, sum eru størri enn vanligu niðurskrivingarnar,
3) niðurskrivingar á støðisognum, og
4) afturføringar av niðurskrivingum á støðisognum.

Miðaltalið av heiltíðarsettum starvsfólkum, nærskyldir partar o.a.

§ 74. Fyritøkur skulu upplýsa miðaltalið av heiltíðarsettum starvsfólkum í roknskaparárinum. Er miðaltalið av heiltíðarsettum í roknskaparárinum minni enn 1, skal hetta nevnast.
Stk. 2. Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um, hvussu miðaltalið av heiltíðarsettum starvsfólkum í roknskaparárinum skal roknast, heruppií áseta tímatalið, sum verður at nýta, tá ið miðaltalið verður roknað.
Landsstýrisfólkið kann í hesum sambandi undantaka ella gera serligar reglur fyri ávísar starvsgreinar.

§ 75. Vinnurekandi grunnar, sum sambært viðtøkum ella avtalu eru knýttir at einari aðrari vinnurekandi fyritøku, ella einum øðrum grunni, skulu greiða nærri frá hesum viðurskiftum.

§ 76. Fyritøkan skal upplýsa navn og heimstað hjá tí móðurfyritøku, sum ger samtaksroknskap fyri tað minsta samtakið, sum fyritøkan er partur í sum dótturfyritøka.

§ 77. Hvur ein fyritøka áogn til góðar hjá limum í leiðsluni, skal fyritøkan greiða frá samlaðu upphæddini og býtinum fyri hvønn leiðsluflokk. Fyri hvønn leiðsluflokk skulu tær týdningamiklastu treytirnar upplýsast, heruppií rentufótur og tær upphæddir, sum eru afturgoldnar í árinum. Harafturat skal fyri hvønn leiðsluflokk upplýsast um niðurskrivingar, avskrivingar, avkannan og partvísa avkannan viðvíkjandi innroknaðum upphæddum. Er lán tikið og afturgoldið í árinum, skal hetta upplýsast serskilt.
Stk. 2. Stk. 1 er eisini galdandi tá ið trygd er veitt nevnda persónskara, heruppií við veðseting, borgan, garanti, o.a.

Leiðslufrágreiðingin

§ 78. Í leiðslufrágreiðingini skal fyritøkan:
1) lýsa týdningarmiklasta virksemi sítt, og
2) greiða frá møguligum munandi broytingum í fyritøkunnar virksemi og búskaparligu viðurskiftum.

§ 79. Eigur ein fyritøka egnar kapitalpartar skal fyritøkan upplýsa um:
1) tal og áljóðandi virðið ella, fyri kapitalpartar uttan áljóðandi virði, bókaða parivirið har tilskilað er í prosentum, hvussu stórur partur av fyritøkukapitalinum eru egnir kapitalpartar,
2) tal og áljóðandi virði ella, fyri kapitalpartar uttan áljóðandi virði, bókaða parivirið har tilskilað er í prosentum, hvussu stórur partur av fyritøkukapitalinum eru egnir kapitalpartar, sum eru fingnir til vegar og eru avhendaðir í roknskaparárinum,
3) støddina av ávikavist samlaða keypspeninginum og sølupeninginum, og
4) orsøkina til, at fyritøkan hevur fingið egnar kapitalpartar til vegar í roknskaparárinum.

Stk. 2. Stk. 1 er harumframt galdandi fyri egnar kapitalpartar, sum fyritøkan hevur fingið sum trygd.

Partur IV
Roknskaparflokkur C

Kapittul 10
Um at gera ársfrásøgn

Almennar ásetingar

§ 80. Fyritøkur í roknskaparflokki C skulu gera eina ársfrásøgn, sum í minsta lagi skal innihalda eina leiðsluátekning, sbr. tó § 11, stk. 1, fíggjarjavna, rakstrarroknskap, eginognaruppgerð, peningastreymsuppgerð, notur og eina leiðslufrágreiðing.
Stk. 2. Er ein grannskoðaraátekning ella onnur váttan latin í sambandi við ársfrásøgnina sambært §§ 156, 159 og 160, skulu grannskoðaraátekningin og váttanin takast við í ársfrásøgnini.
Stk. 3. Ásetingarnar í §§ 14-20, § 22, stk. 1, 2 og 4, § 23, stk. 2, §§ 28-34 og 36-44, § 45, 1. og 3. pkt., §§ 46-49, § 50, stk. 1 og 3, og §§ 51-75, 79, 81 og 82-119 eru galdandi.
Stk. 4. Samríma ásetingarnar í §§ 28-34 og 36-44, § 45, 1. og 3. pkt., §§ 46-49, § 50, stk. 1 og 3, og §§ 51-75, 77, 79 og 81 ikki við §§ 82-119, skulu ásetingarnar í §§ 82-119 takast framum.
Stk. 5. Ynskir fyritøkan at gera ársfrásøgn sambært altjóða roknskaparstandardunum, eru § 161 umframt tær reglur, sum eru ásettar við heimild í § 163, galdandi.
Stk. 6. Um upplýsingarnar frá einari móðurfyritøku eru tær somu sum samtaksins upplýsingar, kann móðurfyritøkan lata vera við at veita somu upplýsingar í egnum ársroknskapi og leiðslufrágreiðing.
Stk. 7. Fyrstu ferð ein fyritøka, sum áður hevur verið í roknskaparflokki A ella B, ella sum ikki longur nýtir § 81, ger

ársfrásøgn eftir reglunum fyri roknskaparflokk C, kann fyritøkan velja at nýta hesar linkingar:

1) Í sambandi við innroknan av útreiðslum, ið bert óbeinleiðis kunnu setast í samband við framleiddar vørugoymslur sambært § 84, kann fyritøkan avmarka seg til bert at leggja hesar óbeinleiðis útreiðslur afturat vørugoymslum, sum verða framleiddar frá og við roknskaparárinum.
2) Immateriellar ognir, sum eru menningarverkætlanir sambært § 85, kunnu innroknast soleiðis, at einans tey viðurskifti, sum eru íkomin frá og við roknskaparárinum, verða tikin við.
3) Ognir, sum fyritøkan ikki eigur sambært § 86, kunnu innroknast soleiðis, at einans tey viðurskifti, sum eru íkomin frá og við roknskaparárinum, verða tikin við.
4) Framleiðsluhátturin sambært § 87, kann innroknast soleiðis, at einans tey viðurskifti, sum eru íkomin frá og við roknskaparárinum, verða tikin við.
5) Fyri teir postar í ársroknskapinum, sum broytingar í innrokningarháttum og mátistøðinum ávirka, kunnu samanberingartøl eftir § 29 fyri tíðarskeiðið áðrenn roknskaparárið, verða gjørd upp eftir teimum hættum, ið higartil hava verið nýttir.

Undantak fyri miðalstórar dótturfyritøkur

§ 81. Dótturfyritøkur, sum sambært § 7 eru miðalstórar fyritøkur, kunnu uttan mun til § 7, stk. 1, nr. 3, velja at gera ársfrásøgn sambært reglunum fyri roknskaparflokk B, sbr. part III, burtursæð frá ásetingunum í §§ 26 og 27, um:

1) roknskapur dótturfyritøkunna við fulla konsolidering er partur av einum samtaksroknskapi, sum móðurfyritøkan hevur gjørt,
2) móðurfyritøkan er fevnd av lóggávuni í einum ES-/EBS-limalandi, ella í einum landi, sum Føroyar hava gjørt avtalu við,
3) samtaksroknskapurin er gjørdur eftir reglunum í hesi løgtingslóg ella um viðkomandi móðurfyritøka er útlendsk eftir Evropatingsins og ráðsins direktivi 2013/34/EU, við seinni broytingum, sbr. skjal 3, og samtaksroknskapurin er grannskoðaður og almannakunngjørdur eftir reglunum í hesum direktivi,
4) allir luttakarar í dótturfyritøkuni hava váttað, at teir eru samdir um, at hendan mannagongd verður nýtt fyri viðkomandi roknskaparár,
5) móðurfyritøkan hevur váttað, at hon ábyrgist fyri skyldur dótturfyritøkunnar fram til dótturfyritøkan hevur latið Skráseting Føroya eina ársfrásøgn fyri eitt seinni roknskaparár, og ársfrásøgnin er móttikin og almannakunngjørd eftir reglunum í kapitli 22 og 24, og
6) at tað verður upplýst bæði í dótturfyritøkunnar ársfrásøgn og í umrødda samtaksroknskapinum, at dótturfyritøkan hevur latið vera við at gera ársfrásøgn vísandi til hesa áseting.

Stk. 2. Dótturfyritøkur, sum nýta undantakið í stk. 1, kunnu lata grannskoðanina av ársroknskapinum og einum møguligum samtaksroknskapi verða framda eftir váttanarstandardinum fyri smáar fyritøkur sambært § 156, stk. 1, 2. pkt.

Stk. 3. Dótturfyritøkur, sum nýta undantakið í stk. 1, skulu lata ársfrásøgnina inn saman við teimum skjølum, sum eru nevnd í § 171.

Um flokking og at seta upp

§ 82. Fyritøkan skal, í einari reglu í ávikavist rakstrarroknskapinum og í fíggjarjavnanum, serskilt nevna tað virksemi, ið skal avhendast, lokast ella gevast upp sum liður í einari heildarætlan, uttan so, at tað ikki kann útskiljast frá hinum virkseminum hjá fyritøkuni.

Stk. 2. Teir postar, sum eru samandrignir í einari reglu í ávikavist rakstrarroknskapinum og í

fíggjarjavnanum, skulu lýsast nágreiniliga í notunum.

§ 83. § 36 um undantak viðvíkjandi upplýsingum um nettosøluna, o.a. er ikki galdandi fyri stórar fyritøkur. Hesar fyritøkur skulu tískil í rakstrarroknskapinum vísa nettosøluna saman við teimum í skjali 2, skema 3, nevndu postum nr. 2-5, ella saman við teimum í skjali 2, skema 4, nevndu postum, nr. 2, 3 og 6.

Kapittul 11
Innrokning og máting

Fíggjarjavnin

§ 84. Fyritøkan skal í kostprísinum fyri tær vørugoymslur, sum fyritøkan hevur framleitt, innrokna tær útreiðslur, sum óbeinleiðis kunnu setast í samband við viðkomandi vøru, um útreiðslurnar viðvíkja framleiðslutíðarskeiðinum.

§ 85. Stórar fyritøkur skulu innrokna menningarverkætlanir, ið hava til endamáls at menna eina ávísa vøru ella eina ávísa mannagongd, sum fyritøkan hevur í hyggju at framleiða ella at nýta í framleiðsluni heruppií patent og aðrar immateriellar ognir, sum ein menningarverkætlan hevur elvt.
Stk. 2. Verða menningarverkætlanir sambært stk. 1 innroknaðar, skal ein upphædd sum svarar til innroknaðu menningarútreiðslurnar innroknast beinleiðis í postin, Tiltaksgrunnur fyri menningarútreiðslur, í eginpeninginum. § 46, stk. 3, 2. og 3. pkt. eru galdandi fyri hendan tiltaksgrunn.

§ 86. Fyritøkan skal innrokna tær ognir, sum koma undir allýsingina av ognum í skjali 1, C, nr. 1, uttan mun til, um fyritøkan hevur ognarrættindini til viðkomandi ognir.

Rakstrarroknskapurin

§ 87. Undantakið í § 54, stk. 1, 2. pkt. er ikki galdandi fyri fyritøkur í roknskaparflokki C.

Peningastreymsuppgerðin

§ 88. Í peningastreymsuppgerðini skulu inngjaldingar og útgjaldingar innroknast í tí løtu goldið er, uttan mun til, nær innrokning fer fram í rakstrarroknskapinum ella í fíggjarjavnanum.
Stk. 2. Pengastreymsyvirlitið skal í minsta lagi vísa pengastreymarnar í tíðarskeiðinum býttar á rakstrarvirksemi, íløguvirksemi og fíggingarvirksemi. Harumframt skal pengastreymsuppgerðin serskilt vísa broytingar í tøkum peningi, umframt tøkupeningin tá ið tíðarskeiðið er byrjað og endað.
Stk. 3. Samsvarandi upphæddirnar í postunum í undanfarna roknskaparári skulu tilskilast. Eru postarnir ikki beinleiðis sambæriligir við postarnar frá undanfarna ári, skulu hesir tillagast. Fyritøkan kann tó lata vera við at tillaga samanberingartøl í tann mun, tað ikki ber til at samanbera vegna broytingar í virksemi fyritøkunnar. Postar í peningastreymsuppgerðini, sum ikki innihalda nakra upphædd fyri roknskaparárið, skulu tó takast við, um ein slíkur postur var í ársfrásøgnini fyri undanfarna ár.
Stk. 4. Ein fyritøka kann lata vera við sjálv at gera eina peningastreymsuppgerð, tá ið hendan er fevnd av peningastreymsuppgerðini fyri samtakið.

Eginognaruppgerð

§ 89. Eginognaruppgerðin skal fyri hvønn post greiða frá:
1) støddini primo í roknskaparárinum,
2) tilgongdini í roknskaparárinum,
3) frágongdini í roknskaparárinum, og
4) støddini ultimo í roknskaparárinum.

Stk. 2. Innihaldið av árligu flytingunum í eginognaruppgerðini skal tilskilast í heitinum ella í notunum.

Stk. 3. Tilgongd og frágongd í postunum, Tiltaksgrunnur fyri uppskrivingar og Tiltaksgrunnur fyri menningarútreiðslur, umframt upphæddir, sum verða innroknaðar beinleiðis í eginognina sambært § 54, stk. 2, nr. 3 og 4, skulu tilskilast serskilt í uppgerðini sambært stk. 1.
Stk. 4. Leiðslunnar uppskot til avgerð um nýtslu av vinningi ella um at rinda hall skal tilskilast í uppgerðini.

Kapittul 12
Upplýsingar

Upplýsingar í notunum

Nýttur roknskaparháttur

§ 90. Umframt tær upplýsingar, ið eru kravdar sambært § 59, skal frágreiðingin um nýttan roknskaparhátt innihalda upplýsingar um innrokningarhættir og mátistøði fyri peningastreymsuppgerðina, heruppií upplýsingar um, hvat fyritøkan telur uppí sum tøkur peningur. Um fyritøkan hevur gjørt av at lata vera við at gera eina peningastreymsuppgerð sambært § 88, stk. 4, skal hetta upplýsast serskilt.
Stk. 2. Fyritøkan skal í leiðslufrágreiðingini upplýsa um teir hættir, sum eru nýttir í sambandi við uppgerð av teimum lyklatølum, sum eru tikin við í leiðslufrágreiðingini.

Fyritøkukapitalurin

§ 91. Um felagskapitalurin í einum kapitalfelagi er samansettur av fleiri flokkum, skulu hesir lýsast nærri sambært stk. 2 og 3.
Stk. 2. Talið av partabrøvum og smápartabrøvum og áljóðandi virðið skulu upplýsast fyri hvønn flokk. Fyri kapitalpartar uttan áljóðandi virði skal bókaða parivirðið upplýsast fyri hvønn flokk.
Stk. 3. Fyri partafeløg og partnarafeløg, t.e. kommanditpartafeløg, skulu nøgd og áljóðandi virði upplýsast. Fyri kapitalpartar uttan áljóðandi virði skal bókaða parivirðið upplýsast.
Stk. 4. Eru nýggir kapitalpartar teknaðir í einum partafelag, smápartafelag ella partnarafelag í roknskaparárinum, skulu tal og áljóðandi virði tilskilast.

Ognir

§ 92. Fyri hvønn post undir støðisogn skulu kostprísur, uppskrivingar, niðurskrivingar og avskrivingar upplýsast soleiðis:

1) Kostprísurin:
   a) Kostprísurin við endan av undanfarna roknskaparári uttan uppskrivingar, niðurskrivingar og avskrivingar,
   b) tilgongd í árinum, heruppií ábøtur,
   c) minkingar í árinum,
   d) flytingar í árinum til aðrar postar, og
   e) samlaði kostprísurin fíggjarjavnadagin.
2) Uppskrivingar:
   a) Uppskrivingar við roknskaparárslok undanfarna roknskaparár,
   b) ársins uppskrivingar,
   c) uppskrivingar frá undanfarnum árum, sum eru afturførdar í roknskaparárinum, og
   d) samlaðu uppskrivingarnar fíggjarjavnadagin.
3) Niðurskrivingar og avskrivingar:
   a) Niðurskrivingar og avskrivingar við roknskaparárslok,
   b) ársins niðurskrivingar,
   c) ársins avskrivingar,
   d) ársins niðurskrivingar og avskrivingar viðvíkjandi avhendaðum og burturbeindum ognum,
   e) niðurskrivingar fyri undanfarin ár, sum eru afturførdar í roknskaparárinum,
   f) samlaðu avskrivingarnar og niðurskrivingarnar á ognum, sum eru avhendaðar í árinum, ella sum ikki longur eru í rakstri, tá ið

avskrivingarnar ella niðurskrivingarnar eru afturførdar í árinum, og

g) samlaðu avskrivingarnar og niðurskrivingarnar fíggjarjavnadagin.

Stk. 2. Stk. 1 er galdandi við neyðugum tillagingum fyri hvønn post undir støðisogn, sum verður mátað til dagsvirðið sambært §§ 41-43 ella til innara virðið sambært § 49.

§ 93. Fyritøkan skal upplýsa um tær serligu fortreytir, sum liggja til grund fyri innrokning og máting av menningarverkætlanum og skattaognum.

§ 94. Hevur fyritøkan fíggjarliga støðisogn, sum verður mátað til kostprís, og eru viðkomandi ognir innroknaðar við einum virði, sum er hægri enn dagsvirðið, skal fyritøkan upplýsa um dagsvirðið, innroknaða virðið, og orsøkina til, at niðurskrivingar ikki eru gjørdar. Harumframt skal fyritøkan upplýsa um, hvørji skjalprógv liggja til grund fyri metingini um, at bókaða virðið fer at verða endurvunnið.

Stk. 2. Upplýsingarnar kunnu gevast samlað fyri einsháttaðar bólkar av støðisogn.

§ 95. Fyritøkan skal greiða frá teimum tíðaravmarkingum, sum eru ognir í fíggjarjavnanum sambært § 32, stk. 1.

Stk. 2. Víkir endurvinningarvirðið á einari vørugoymslu frá kostprísinum, sum er gjørdur upp samsvarandi §§ 50, 51 og 84, skal fyritøkan upplýsa munaupphæddina fyri hvønn post.

§ 96. Fyritøkan skal upplýsa hvørjar innroknaðar ognir fyritøkan ikki eigur, og við hvørjum virði ognirnar eru innroknaðar sambært § 86.

§ 97. Stórar fyritøkur skulu upplýsa um slag og virði á fyritøkunnar eventualognum.

Skyldur

§ 98. Fyritøkan skal greiða frá um:

1) tíðaravmarkingar, sum eru skyldur í fíggjarjavnanum sambært § 32, stk. 2, og
2) avsettar skyldur sambært § 53.

§ 99. Fyri hvønn post undir skuldarbindingum skal upplýsast um tann partin, sum fellur til gjaldingar meira enn 5 ár eftir fíggjarjavnadagin.

§ 100. Hevur fyritøkan tikið lán móti at útskriva umbýtilig skuldarbrøv, skal fyritøkan greiða frá fylgjandi viðurskiftum fyri hvørt lán:

1) útistandandi upphæddin,
2) umbýtingarkursurin,
3) ásetta freistin fyri umbýting til kapitalpartar, og
4) onnur møgulig rættindi í hesum sambandi.

Stk. 2. Er lán tikið móti lánsbrøvum ella øðrum skuldarbrøvum, sum geva rætt til rentu, hvørs støddheilt ella lutvíst er treytað av tí vinningi, sum fyritøkan kunnger, ella av ársins vinningi, skal útistandandi upphæddin og avtalaða rentan upplýsast fyri hvørt lán.

Stk. 3. Fyritøkan skal geva upplýsingar sambært stk. 1, 1. pkt., um onnur rættindi, sum fyritøkan letur, sum kunnu elva til fráferð av verandi kapitalpørtum, ella at nýggir kapitalpartar verða givnir út í fyritøkuni. Upplýsingarnar skulu gevast fyri hvørji rættindi sær.

Stk. 4. Hevur ein kravánari boða frá, at hann vil taka seg aftur til fyrimuns fyri allar aðrar kravánarar hjá fyritøkuni, við atliti til, at hinir kravánararnir skulu fáa fulnað fyri áogn sína hjá fyritøkuni, skal tað fyri hvørja skyldu, sum er fevnd av atgerðini, upplýsast um útistandandi upphædd, gjaldstíðspunkt og møguligar serligar treytir fyri atgerðini.

Avsettar skyldur

§ 101. Fyri útsettan skatt sambært § 53, skal í minsta lagi upplýsast um upphæddina:
1) við undanfarna roknskaparárslok,
2) innroknað í rakstrarroknskapin í roknskaparárinum,
3) innroknað beinleiðis í eginognina í roknskaparárinum, og
4) við fíggjarjavnatíðspunktið.

Eventualskyldur o.a.

§ 102. Hevur fyritøkan veitt veð ella aðra trygd í ognum, skal fyritøkan greiða frá vavinum av veðsetingum og roknskaparliga virðinum á veðsettum ognum, útgreinað fyri einstøku postarnar.

§ 103. Fyritøkan skal upplýsa um tiltøk, ið ikki eru innroknað í fíggjarjavnan, heruppií nýtslu av virkjum ella virksemi til eitt serligt fíggjarligt, løgfrøðiligt, skattligt ella roknskaparligt endamál, um so er, at upplýsing hesum viðvíkjani er neyðug fyri metingina av fíggjarligu støðuni hjá fyritøkuni.
Stk. 2. Upplýsingarnar sambært stk. 1 skulu lýsa slagið og handilsliga endamálið við tiltøkunum. Stórar fyritøkur skulu harumframt upplýsa um teir váðar og fyrimunir, ið eru knýttir at tiltøkum, og fíggjarligu ávirkanina av hesum.

§ 104. Upplýsingar um eventualskyldur sambært § 70, stk. 1, skulu gevast serskilt fyri borganarskyldur, veðhaldsskyldur og fyri aðrar eventualskyldur, sum ikki eru innroknaðar í fíggjarjavnan.
Stk. 2. Fyri langtíðarleiguavtalur, sum greitt verður frá sambært § 70, stk. 1, skulu skyldurnar sambært avtalunum upplýsast serskilt, um skyldurnar ikki eru innroknaðar í fíggjarjavnan.

Rakstrarroknskapurin

§ 105. Fyritøkan skal greiða frá inntøkum og útreiðslum, sum stava frá broytingum í roknskaparligum metingum sambært § 57.

§ 106. Fyritøkan skal upplýsa um leiðslunnar uppskot til avgerð um nýtslu av vinningi ella til at rinda hall. Leiðslunnar uppskot til vinningsbýti skal standa sum ein serligur postur í eginognini undir Fluttur vinningur ella hall, sambært skjali 2, skema 1 ella 2.
Stk. 2. Hevur fyritøkan lutað út serligt vinningsbýti í roknskaparárinum, skal hetta upplýsast. Er serligt vinningsbýti lutað út eftir, at roknskaparárið er liðið, skal hetta somuleiðis upplýsast.
Stk. 3. Letur fyritøkan upplýsingar sambært stk. 1 ella 2, nýtist fyritøkan ikki at lata tær upplýsingar, sum eru kravdar sambært § 35.

§ 107. Stórar fyritøkur skulu greiða frá hvussu nettosølan er býtt á virkisøkir og landafrøðilig økir, um virkisøkini og landafrøðiligu økini víkja frá hvørjum øðrum sínámillum. Í sambandi við býtið skal hædd takast fyri, hvussu sølan av vørum og tænastum, sum eru partur av vanliga rakstrinum hjá fyritøkuni, er skipað. Fyritøkan kann lata vera við at greiða frá viðurskiftunum um so er, at hetta kann elva til munandi skaða fyri fyritøkuna. Letur fyritøkan vera við at greiða frá viðurskiftunum, skal grundgevast fyri hesum. § 14, stk. 2, er ikki galdandi fyri upplýsingar, sum eru undantiknar sambært 3. pkt.
Stk. 2. Stórar fyritøkur skulu greiða frá samlaðu ómaksløninni í roknskaparárinum, sum er goldin tí góðkenda grannskoðanarvirki, sum útinnir lógarkravda grannskoðan, og til grannskoðanarvirkisins dótturfyritøkur. Upplýsingin skal útgreinast í samsýning fyri lógarkravda grannskoðan av ársroknskapinum, samsýning fyri aðrar váttanaruppgávur við trygd, samsýning fyri skattaráðgeving og samsýning fyri aðrar tænastur. Fyri tær í 1. pkt. nevndu upphæddirnar skal greiðast frá samsvarandi upphæddum fyri undanfarna roknskaparár.
Stk. 3. Fyritøkan kann lata vera við at lata upplýsingar sambært stk. 2, um so er, at

roknskapurin hjá fyritøkuni við fullari konsolidering er partur av einum samtaksroknskapi, har upplýsingin verður givin fyri samtakið sum heild, og samtaksroknskapurin er gjørdur av einum móðurfelag, ið hoyrir undir føroyska lóggávu ella lóggávuni í einum ES/EBS-landi.

Nærskyldir partar o.a.

§ 108. Fyritøkan skal serskilt greiða frá samlaðu trygdarveðsetingini sambært § 102, fyri møguligar dótturfyritøkur og samlaðu trygdarveðsetingarnar fyri møguligar aðrar atknýttar fyritøkur.

§ 109. Fyritøkan skal upplýsa navn, heimstað og virkishátt fyri hvørt kapitaláhugamál, dótturfyritøku og leyst atknýtta fyritøku, og fyri hvørt íognarfelag ella kommanditfelag, sum fyritøkan er íognari ella komplementarur í.
Stk. 2. Fyritøkan skal harumframt, fyri hvørt kapitaláhugamál, dótturfyritøku og leyst atknýtta fyritøku, upplýsa um:
1) hvussu stóran part fyritøkan eigur, og
2) støddina av eginognini og úrslitið sambært seinastu góðkendu ársfrásøgnini.

Stk. 3. Fyritøkan kann lata vera við at lata upplýsingar sambært stk. 2, nr. 2, um:
1) viðkomandi kapitaláhugamál ella leyst atknýtta fyritøka ikki almannakunnger eina ársfrásøgn,
2) roknskapurin hjá viðkomandi dótturfyritøku ella leyst atknýttu fyritøku við fullari konsolidering er partur av fyritøkunnar samtaksroknskapi, ella
3) fyritøkan innroknar kapitalpartar í viðkomandi kapitaláhugamáli, dótturfyritøku ella leyst atknýttari fyritøku til roknskaparliga innara virði tess.

Stk. 4. Fyritøkan kann lata vera við at lata upplýsingar sambært stk. 1 um tað kann elva til munandi skaða fyri fyritøkuna sjálva ella fyri tær fyritøkur, sum eru umrøddar í stk. 1. Verður undantakið í 1. pkt. nýtt, skal hetta upplýsast.

§ 110. Fyritøkan skal upplýsa navn og heimstað hjá teimum móðurfyritøkum, sum gera samtaksroknskap fyri ávikavist størsta og minsta samtakið, sum fyritøkan er dótturfyritøka í. Harumframt skal upplýsast, hvar samtaksroknskapirnir fyri viðkomandi útlendsku móðurfyritøkur kunnu heintast.

§ 111. Fyritøkan skal lata upplýsingar sambært § 79 fyri kapitalpartar í fyritøkuni, sum eru í varðveitslu hjá einari dótturfyritøku sum ogn ella trygd, ella sum ein dótturfyritøka hevur fingið til vegar ella hevur avhendað í roknskaparárinum.

§ 112. Fyritøkunnar starvsfólkakostnaðir skulu útgreinast í lønum, eftirlønum og øðrum útreiðslum til sosiala trygging, uttan so, at hetta er tikið við í rakstrarroknskapinum.

§ 113. Fyritøkan skal upplýsa um samlaðu samsýningina o.a. fyri roknskaparárið, sum er goldin verandi og fyrrverandi limum í leiðsluni fyri at røkja starv sítt í fyritøkuni, býtt á hvønn leiðslustovn, eisini um ongin samsýning verður veitt. Er ongin leiðslustovnur útnevndur, skulu somu upplýsingar latast fyri eigararnar. Harumframt skal fyritøkan greiða frá samlaðu pensjónsskyldunum til nevndu persónar.
Stk. 2. Eru serligar skipanir avtalaðar ella ásettar, sum hava til endamáls at eggja limunum í leiðsluni at røkka ávísum málum ella líknandi, heruppií við at geva rætt til optiónir, tíðaravmarkað tekningarrættindi ella annað, skal tað upplýsast, hvat slag av leiðslulimum eru fevndir av skipanini, hvørjar veitingar skipanin fevnir um, og hvat er neyðugt til tess at meta um virðið á hesum.
Stk. 3. Upplýsingar og upphæddir, sum eru nevndar í stk. 1 og 2 skulu harumframt útgreinast samsvarandi fyri undanfarna roknskaparárið.

Stk. 4. Um upplýsingar sambært stk. 1 ella 2 vildu elvt til, at upphæddir fyri ein einstakan lim í leiðslubólkinum gerast sjónlig, kunnu upphæddirnar í staðin:
1) upplýsast samlað fyri tveir bólkar, ella
2) undantakast um bert ein bólkur móttekur samsýning, o.a., pensión ella serligar skipanir, sum nevnt í stk. 2.

§ 114. Eru transaktiónir farnar fram millum fyritøkuna og hennara nærskyldu partar, sbr. stk. 2, skal fyritøkan upplýsa um slagið av sambandinum millum fyritøkuna og teir nærskyldu partarnar og lata tær upplýsingar um transaktiónir og millumverandi, sum eru neyðugar fyri at skilja møguligu ávirkanina á ársroknskapin. Upplýsingarnar skulu í minsta lagi fevna um:
1) Fyri transaktiónir: slag og støddí upphæddum.
2) Fyri uppgerðir: støddí upphæddum og treytirnar fyri hesum.
3) Ársins niðurskrivingar viðvíkjandi áogn frá nærskyldum pørtum.
4) Samlaðu niðurskrivingarnar á verandi áogn.

Stk. 2. Nærskyldir partar verða allýstir samsvarandi allýsingini í altjóða roknskaparstandardinum IAS 24, sum Kommissiónin hevur samtykt samsvarandi fyriskipanini hjá Evropatinginum og Ráðnum um nýtslu av altjóða roknskaparstandardum, og broytingum í allýsingini, sum Kommissiónin hevur samtykt samsvarandi nevndu fyriskipan. Landsstýrisfólkið kann seta reglurnar í IAS 24 viðvíkjandi allýsing av nærskyldum í gildi við kunngerð við tilvísing til heiti, nummar og dagfesting fyri, nær tær eru undirritaðar av skikkaðum myndugleikum.
Stk. 3. Tær í stk. 1 nevndu upplýsingar kunnu undantakast, um so er, at transaktiónirnar eru farnar fram millum fyritøkuna og eina ella fleiri av teimum dótturfyritøkum, sum fyritøkan eigur einsamøll.
Stk. 4. Upplýsingar um einstakar transaktiónir sambært stk. 1 kunnu bólkast eftir teirra eyðkennum, uttan so, at serligar upplýsingar eru neyðugar fyri at skilja avleiðingarnar, av transaktiónum við nærstandandi pørtum, fyri fíggjarligu støðuna hjá fyritøkuni.
Stk. 5. Stk. 1, 3 og 4 eru ikki galdandi fyri vinnurekandi grunnar sambært anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om erhvervsdrivende fonde.
Stk. 6. Upplýsingar sambært stk. 1 kunnu avmarkast til at fevna um transaktiónir, sum ikki eru framdar sambært vanligum marknaðartreytum. Nýtir fyritøkan 1. pkt. skal hetta upplýsast.

§ 115. Fyritøkan skal greiða frá slagi av týdningarmiklum hendingum, sum eru farnar fram eftir roknskaparárslok, og fíggjarligu ávirkanina av hesum. Frágreiðingin skal gevast í notunum.

Leiðslufrágreiðingin

§ 116. Leiðslufrágreiðingin skal:
1) lýsa fyritøkunnar høvuðsvirksemi,
2) lýsa møguligar óvissur í sambandi við innrokning ella máting, so vítt til ber útgreinað í upphæddir,
3) lýsa óvanlig viðurskifti, sum kunnu hava ávirkað innrokning ella máting, so vítt til ber útgreinað í upphæddir,
4) greiða frá gongdini í virkseminum og búskaparligu viðurskiftunum í fyritøkuni,
5) lýsa væntaðu menningina hjá fyritøkuni, heruppií serligar fortreytir og óvíss viðurskifti, sum leiðslan hevur grundað lýsingina á,
6) greiða frá vitanartilfeinginum í fyritøkuni, um hetta hevur serligan týdning fyri vinningin í framtíðini,
7) lýsa ávirkanina, sum fyritøkan hevur á umhvørvi úteftir og átøk til at fyribyrgja, avmarka, minka um ella at bøta um skaðar á hetta,
8) greiða frá granskingarverkætlanum og menningarverkætlanum í ella vegna fyritøkuna, og
9) umrøða deildir í útlondum.

Stk. 2. Um tað er týðandi fyri at kunna meta um fyritøkunnar ognir, skyldur,

fíggjarligu støðu og úrslit, skal leiðslufrágreiðingin greiða frá fyritøkunnar nýtslu av fíggjarligum amboðum í mun til:

1) fyritøkunnar mál og politikk viðvíkjandi at stýra fíggjarligum váðum, heruppií trygging av størri bólkum av væntaðum transaktiónum í framtíðini, har trygging verður nýtt, og
2) hvussu og í hvønn mun fyritøkan er útsett fyri váðum í sambandi við møguligar broytingar í prísum, kredittvirði, gjaldføri og peningastreymum.

§ 117. Stórar fyritøkur skulu í leiðslufrágreiðingina skoyta upp í eina frágreiðing um samfelagsábyrgd, sbr. stk. 2-8. Við fyritøkunnar samfelagsábyrgd er at skilja, at fyritøkur sjálvboðið taka við sømdum fyri eitt nú mannarættindum, sosialum viðurskiftum, umhvørvisviðurskiftum og veðurlagsviðurskiftum og harumframt stríðast móti mutri í teirra handilsmannagongdum og handilsvirksemi. Hevur fyritøkan gjørt av ikki at hava ein politikk fyri eitt ella fleiri økir, skal frágreiðingin innihalda eina greiða grundgeving fyri frávalinum.

Stk. 2. Frágreiðingin skal innihalda upplýsingar um:

1) Fyritøkunnar politikk viðvíkjandi samfelagsábyrgd, m.a. møgulig aðalkrøv, leiðreglur ella meginreglur fyri samfelagsábyrgd, sum fyritøkan nýtir.
2) Hvussu fyritøkan fremur sín politikk viðvíkjandi samfelagsábyrgd í verki, heruppií møguligar skipanir og mannagongdir í hesum sambandi.
3) Tað fyritøkan metir er rokkið orsakað av fyritøkunnar arbeiði í sambandi við samfelagsábyrgd í roknskaparárinum, og harumframt møguligar vónir um arbeiðið í framtíðini.

Stk. 3. Um fyritøkan hevur politikk viðvíkjandi tí at virða mannarættindini og viðvíkjandi tí at minka um veðurlagsárinið í sambandi við virksemi fyritøkunnar, skal frágreiðingin sambært stk. 1 nágreiniliga innihalda upplýsingar um henda politikk. Um fyritøkan hevur slíkan politikk, skal stk. 2 samsvarandi nýtast. Hevur fyritøkan ikki slíkan politikk, skal tað verða upplýst í leiðslufrágreiðingini.

Stk. 4. Frágreiðingin skal latast í sambandi við leiðslufrágreiðingina. Fyritøkan kann tó ístaðin gera av at lata frágreiðingina:

1) í eini ískoytisfrágreiðing til ársfrásøgnina, sbr. § 17, sum víst verður til í leiðslufrágreiðingini, sbr. stk. 5, 1. pkt., ella
2) á heimasíðuni hjá fyritøkuni, sum víst verður til í leiðslufrágreiðingini, sbr. stk. 5, 2. pkt.

Stk. 5. Landsstýrisfólkið kann áseta reglur um skyldu at almannakunngera frágreiðingina um samfelagsábyrgd í einari ískoytisfrágreiðing til ársfrásøgnina, og um skyldur hjá grannskoðara í mun til tær upplýsingar, sum verða almannakunngjørdar í henni, sbr. stk. 4, nr. 1. Landsstýrisfóllkið ásetur reglur um, hvussu frágreiðingin um samfelagsábyrgd skal almannakunngerast á heimasíðuni hjá fyritøkuni, m.a. reglur um dagføring av upplýsingunum á heimasíðuni og um skyldurnar hjá grannskoðara í sambandi við tær upplýsingar, sum verða almannakunngjørdar á heimasíðuni, sbr. stk. 4, nr. 2.

Stk. 6. Fyri fyritøkur, sum skulu gera samtøkuroknskap, er tað nøktandi, at upplýsingarnar sambært stk. 1-3 verða givnar fyri samtøkuna sum heild.

Stk. 7. Ein dótturfyritøka, sum er partur av eini samtøku, kann lata vera við at taka upplýsingarnar við í sína egnu leiðslufrágreiðing, um:

1) móðurfyritøkan lýkur upplýsingarkrøvini sambært stk. 1-3 fyri samtøkuna sum heild, ella
2) móðurfyritøkan hevur gjørt framburðarfrásøgn í sambandi við, at hon tekur undir við ST-viðtøkuni Global Compact ella Meginreglum ST fyri ábyrgdaríløgur.

Stk. 8. Ein fyritøka, sum hevur orðað eina framburðarfrásøgn í sambandi við, at hon tekur undir við Global Compact ST ella

Meginreglur ST fyri ábyrgdaríløgur, kann lata vera við at veita tær upplýsingar, sum eru nevndar í stk. 1 og 2. Tað sama er galdandi fyri tær upplýsingar, sum skulu veitast sambært stk. 3, um framburðarfrásøgnin fevnir um mannarættindi og veðurlag. Fyritøkan skal upplýsa í leiðslufrágreiðingini, at hon nýtir hesa undantøku, og tilskila, hvar frásøgnin er alment atkomulig.

§ 118. Leiðslufrágreiðingin skal lýsa ársins úrslit samanhildið við væntaðu gongdina sambært seinast almannakunngjørdu ársfrásøgnini og grundgeva fyri frávikum í úrslitinum í mun til hesa.

§ 119. Leiðslufrágreiðingin skal innihalda eitt yvirlit yvir:

1) ársins nettosølu, úrslitið frá vanligum rakstri, úrslitið frá fíggjarligum postum, ársins úrslit, fíggjarjavna, íløgur í materiella støðisogn, eginogn og tey lyklatøl, sum eru neyðug sæð í mun til fyritøkunnar viðurskifti, og
2) tey í nr. 1 nevndu tøl fyri undanfarna roknskaparár.

Stk. 2. § 29, stk. 1, 2 og 3. pkt. og § 61, stk. 1 og 2 eru galdandi fyri yvirlitið sambært stk. 1, sbr. tó stk. 3. Fyri miðalstórar fyritøkur er § 36 galdandi í mun til nettosøluna í stk. 1, nr. 1.
Stk. 3. Uttan mun til stk. 2 kann fyritøkan tó lata vera við at tillaga samanberingartøl fyri 2.- 4. undanfarnu roknskaparár í yvirlitinum sambært stk. 1, um fyritøkan hevur broytt roknskaparpraksis. Um so er skulu upplýsingar latast um hetta í sambandi við yvirlitið har umrøðast skal yvirskipað, hvørja ávirkan broytta roknskaparpraksis hevur haft á samanberingartølini.
Stk. 4. Ein fyritøka, sum er móðurfyritøka í einum samtaki, kann lata vera við at vísa tað í stk. 1 nevnda yvirlitið í ársroknskapinum, um fyritøkan ger samtaksroknskap har yvirlitið eftir stk. 1 verður givið fyri samtakið.

Partur V

Roknskaparflokkur D

Kapittul 13
Um at gera ársfrásøgn

Almennar ásetingar

§ 120. Fyritøkur í roknskaparflokki D skulu gera eina ársfrásøgn, sum í minsta lagi skal innihalda eina leiðsluátekning, fíggjarjavna, rakstrarroknskap, eginognaruppgerð, peningastreymsuppgerð, notur og eina leiðslufrágreiðing.
Stk. 2. Tá ið ein ársroknskapur og ein møguligur samtaksroknskapur eru grannskoðaðir, skal grannskoðaraátekningin o.a., takast við í ársfrásøgnini.
Stk. 3. Ásetingarnar í §§ 14-20, § 22, stk. 1, 2 og 4, § 23, stk. 2, §§ 28-34 og 36-44, § 45, 1. og 3. pkt., §§ 46-49, § 50, stk. 1 og 3, §§ 51-75, 77 og 82-105, § 107, stk. 1 og 2, og §§ 108-119 og 121-129 eru galdandi, sbr. tó § 160.
Stk. 4. Samríma ásetingarnar í §§ 28-34 og 36-44, § 45, 1. og 3. pkt., §§ 46-49, § 50, stk. 1 og 3, og §§ 51-75, 77, og 79 ikki við §§ 82-106, § 107, stk. 1 og 2, og §§ 108-119, skulu ásetingarnar í §§ 82-106, § 107, stk. 1 og 2, og §§ 108-119 takast framum.
Stk. 5. Samríma ásetingarnar í §§ 28-34 og 36-44, § 45, 1. og 3. pkt., §§ 46-49, § 50, stk. 1 og 3, §§ 51-75, 77, 79 og 82-106, § 107, stk. 1 og 2, og §§ 108-119 ikki við ásetingarnar í §§ 121-129, skulu ásetingarnar í §§ 121-129 takast framum.
Stk. 6. Har reglurnar í §§ 82-106, § 107, stk. 1 og §§ 108-119 ikki eru tær somu fyri miðalstórar fyritøkur og stórar fyritøkur, skal ein fyritøka í roknskaparflokki D, uttan mun til fyritøkunnar egnu støddd, fylgja reglunum fyri stórar fyritøkur.
Stk. 7. Um upplýsingarnar frá einari móðurfyritøku eru tær somu sum samtaksins upplýsingar, kann móðurfyritøkan lata vera við at veita somu upplýsingar í egnum ársroknskapi og leiðslufrágreiðing.

Flokking og uppseting

§ 121. Uttan mun til fyritøkunnar stødd skal rakstrarroknskapurin vísa nettosøluna saman við teimum í skjali 2, skema 3, nevndu postum nr. 2-5, ella saman við teimum í skjali 2, skema 4, nevndu postum, nr. 2, 3 og 6.

Upplýsingar

§ 122. Fyritøkan skal upplýsa navn og bústað ella heimstað, umframt neyvu eigararættindini og atkvøðurættindini fyri ein og hvønn, sum eigur partabrøv í fyritøkuni, tá ið atkvøðurættindini, ið eru knýtt at partabrøvunum í minsta lagi svara til 5% av atkvøðurættindunum hjá partabrævakapitalinum ella tá ið áljóðandi virðið er í minsta lagi 5% av partabrævakapitalinum, tó í minsta lagi 100.000 kr.

§ 123. Móðurfyritøkan skal upplýsa, um so er, at ársfrásagnir hjá øllum dótturfyritøkunum hjá móðurfyritøkuni ikki verða grannskoðaðar av í minsta lagi einum góðkendum grannskoðara hjá móðurfyritøkuni, einum útlendskum samstarvsfelaga ella av einari viðurkendari altjóða grannskoðanarfyritøku.

§ 124. Uttan mun til § 113, stk. 3, skal fyritøkan geva tær í § 113, stk. 1 og 2 umrøddu upplýsingar um samsýning o.a. til leiðslulimir.

Leiðslufrágreiðingin

§ 125. Upplýsast skal um tey leiðslustørv, sum limir í leiðsluni hava í øðrum vinnufyritøkum, tó ikki fyri tey dótturfeløg, sum eitt partafelag ella partnaðarfelag eigur 100%. Er viðkomandi bæði limur í leiðsluni hjá einum øðrum móðurfelagi og í einum ella fleiri av tess dótturfeløgum, sum móðurfelagið eigur 100%, er tað uttan mun til 1. pkt. nóg mikið at upplýsa navnið á móðurfelagnum og talið av tess dótturfeløgum, har viðkomandi er limur í leiðsluni.
Stk. 2. Eru upplýsingar um væntaðu gongdina almannakunngjørdar í árinum, skulu upplýsingar sambært § 118 gevast í mun til seinastu almannakunngjørdu lýsingina.

§ 126. Ein fyritøka, sum hevur ein ella fleiri partabrævaflokkar við atknýttum atkvøðurættindum, sum eru upptikin til handils á einum reguleraðum marknaði í Føroyum ella í einum ES/EBS-landi, skal skoyta upp í leiðslufrágreiðingina upplýsingar, sum skapa gjøgnumskygni um fyritøkunnar viðurskifti við tí endamáli at fremja fría umferð av fyritøkunnar partabrøvum. Upplýsingarnar skulu fevna um:

1) Viðurskiftini viðvíkjandi fyritøkunnar kapitalbygnaði og eigaraviðurskiftum, heruppií:
   a) talið av partabrøvum við atknýttum atkvøðurættindum og teirra áljóðandi virði,
   b) partin av partabrøvum við atknýttum atkvøðurættindum, sum ikki eru upptikin til handils á einum reguleraðum marknaði í Føroyum ella í einum ES/EBS-landi,
   c) útgreining av teimum ymisku partabrævaflokkunum sum ásett í § 91, stk. 1, um fyritøkan hevur fleiri partabrævaflokkar, og
   d) upplýsingar um eigaraviðurskiftini og atkvøðulut, o.a. sum ásett í § 122.
2) Upplýsingar, sum fyritøkan er vitandi um:
   a) rættindi og skyldur, sum knýta seg til hvønn partabrævaflokk,
   b) avmarkingar í umsetiligheitini í mun til partabrøvini, og
   c) atkvøðurættindaavmarkingar.
3) Reglur viðvíkjandi at útnevna og at skifta leiðslulimir út og viðvíkjandi broytingum í viðtøkunum.
4) Heimildir hjá leiðsluni, serliga viðvíkjandi møguleikanum at geva

partabrøv út sambært § 155 í vinnufelagalógini, ella at ogna sær egin partabrøv eftir § 198 í vinnufelagalógini.

5) Týðandi avtalur, sum fyritøkan hevur gjørt, og sum verða virknar, broytast ella ganga út, um ræðið á fyritøkuni broytist sum liður í einum yvirtøkutilboði, umframt virknaðinum av hesum. Fyritøkan kann lata vera við at upplýsa um viðurskiftini sambært 1. pkt., um almannakunngering av upplýsingunum elvir til munandi skaða fyri fyritøkuna, tó ikki um fyritøkuni greidliga er álagt at lata slíkar upplýsingar víðari eftir aðrari lóggávu. Letur fyritøkan vera við at lata upplýsingar sambært 2. pkt. skal hetta nevnast.
6) Avtalur millum fyritøkuna og hennara leiðslu ella starvsfólk, sum geva hesum rætt til endurgjald, um tey fara úr starvi ella verða søgd úr starvi uttan grund ella um teirra starv verður lagt niður sum liður í einum yvirtøkutilboði.

Stk. 2. Fyritøkur, sum eru fevndar av stk. 1, kunnu lata vera við at geva upplýsingar sambært § 91, stk. 1 og § 122 í notunum.

§ 127. Ein fyritøka, sum hevur virðisbrøv, sum eru upptikin til handils á einum reguleraðum marknaði í Føroyum ella í einum ES/EBS-landi, skal hava eina frágreiðing við um virkisleiðslu, ið skal umfata:

1) Upplýsingar um, hvørt fyritøkan er umfatað av einum kodeksi fyri virkisleiðslu, og um so er, við ávísingum til tað kodeks, fyritøkan er umfatað av.
2) Tilskilan av, hvar tað kodeks, sum er nevnt í nr. 1, er atkomuligt fyri almenninginum.
3) Tilskilan av, hvørjum pørtum av kodeksinum, ið er nevnt í nr. 1, fyritøkan ger frávik frá, og hví fyritøkan hevur gjørt av at gera frávik frá pørtum av kodeksinum.
4) Tilskilan av orsøkunum til, at fyritøkan ikki nýtir kodeksið, sum er nevnt í nr. 1, um so er, at fyritøkan hevur gjørt av ikki at nýta kodeksið.
5) Tilvísingar av øðrum møguligum kodeksum fyri virkisleiðslu, sum fyritøkan hevur gjørt av at nýta sum ískoyti til ella í staðin fyri tað kodeks, sum er nevnt í nr. 1, ella sum fyritøkan av fríum vilja nýtir, við tilskilan av somu upplýsingum, sum í nr. 2 og 3.
6) Lýsing av høvuðspørtunum í innaru eftirlitsskipanunum og váðastýrisskipanunum í sambandi við tilgongdina viðvíkjandi latan av roknskapinum.
7) Lýsing av samansetingini í nevndunum og stjórnunum í fyritøkuni, nevndir og funktiónirnar hjá hesum.

Stk. 2. Ein fyritøka, sum er fevnd av stk. 1, og sum einans hevur onnur virðisbrøv enn partabrøv, sum eru upptikin til handils á einum reguleraðum marknaði í Føroyum ella í einum ES/EBS-landi, kann lata vera við at lata tær í stk. 1, nr. 1-5 og 7, nevndu upplýsingarnar, uttan so, at viðkomandi fyritøka hevur partabrøv til handils á einum multilateralum handilsfasiliteti í Føroyum ella í einum ES/EBS-landi. 1. pkt. er ikki galdandi fyri landspartafeløg.

Stk. 3. Frágreiðingin sambært stk. 1, skal latast saman við upplýsingunum í leiðslufrágreiðingini, ið eru nevndar í § 126, sí tó stk. 4.

Stk. 4. Skráseting Føroya kann gera av, at frágreiðingin sambært stk. 1, ikki skal takast við í leiðslufrágreiðingina, um leiðslufrágreiðingin hevur eina tilvísing til heimasíðuna hjá fyritøkuni, har frágreiðingin er almannakunngjørd.

Stk. 5. Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur viðvíkjandi teimum viðurskiftum, sum eru nevnd í stk. 4, heruppií, viðvíkjandi dagføring av teimum upplýsingum, sum verða almannakunngjørdar á heimasíðuni.

§ 128. Landspartafeløg skulu hava eina frágreiðing um virkisleiðslu, sbr. tó § 303 í vinnufelagalógini, ið umfatar:

1) Upplýsingar um, hvørt fyritøkan nýtir eitt kodeks fyri virkisleiðslu, ella í noktandi føri, hvussu støða fyritøkunnar annars er til góða virkisleiðslu.
2) Tilskilan av, hvar tað kodeksið, sum er nevnt í nr. 1, er atkomuligt fyri almenninginum.
4) Tilskilan av, hvørjum pørtum av kodeksinum, ið er nevnt í nr. 1, fyritøkan ger frávik frá, og hví fyritøkan hevur gjørt av at gera frávik frá pørtum av kodeksinum.
5) Tilskilan av orsøkunum til, at fyritøkan ikki nýtur kodeksið, sum er nevnt í nr. 1, um so er, at fyritøkan hevur gjørt av ikki at nýta kodeksið.

Stk. 2. § 149, stk. 1, nr. 6 og 7 og stk. 4 eru samsvarandi galdandi fyri landspartafeløg, sbr. tó § 303 í vinnufelagalógini.

Serligar reglur fyri partafeløg, sum fylgja reglunum fyri landspartafeløg

§ 129. Landsstýrisfólkið kann áseta reglur sum gera undantak frá teimum serligu reglum, ið eru galdandi fyri landspartafeløg, sbr. § 303 í vinnufelagalógini, um hetta er neyðugt til tess at tryggja samstøðu millum hesar reglur og tær tilsvarandi reglur, sum verða ásettar fyri kapitalfeløg, sum hava virðisbrøv, sum eru upptikin til handils á einum reguleraðum marknaði í Føroyum ella í einum ES/EBS-landi.

Partur VI
Samtaksroknskapur og samanleggingarroknskapur o.a.

Kapittul 14
Skylda at gera samtaksroknskap

§ 130. Móðurfyritøkur, sum eru fevndar av § 3, stk. 1, skulu gera samtaksroknskap eftir ásetingunum í kapitli 15, sbr. tó § 160, uttan so at annað er ásett í §§ 131-133.

Stk. 2. Undantakið í § 131 er ikki galdandi fyri móðurfyritøkur í roknskaparflokki D, ella um ein dótturfyritøka hjá viðkomandi móðurfyritøku er í roknskaparflokki D. Undantakið í § 133 er heldur ikki galdandi fyri móðurfeløg, sum hava virðisbrøv, sum eru upptikin til handils á einum reguleraðum marknaði í Føroyum ella í einum ES/EBS-landi.

§ 131. Ein móðurfyritøka kann lata vera við at gera samtaksroknskap, sbr. tó § 130, stk. 2, um samtaksfyritøkurnar fíggjarjavnadagin í tvey fylgjandi roknskaparár ikki tilsamans fara upp um fylgjandi støddarmørk:

1) Ein fíggjarjavna upp á 55 mió. kr.,
2) eina nettosølu upp á 111 mió. kr., og
3) eitt miðaltal av ársverkum upp á 50 í roknskaparárinum.

Stk. 2. Tá ið støddarmørkini í stk. 1 verða gjørd upp, skulu samtaksfyritøkur, sum sambært § 135, stk. 2 kunnu haldast uttanfyri konsolideringina, ikki takast við.

Stk. 3. § 7, stk. 3 og 4, eru galdandi fyri samlaða samtakið. Fíggjarjavnin og nettosølan skulu tó gerast upp sambært § 140 og § 141.

Stk. 4. Í staðin fyri at nýta rokniháttin í stk. 3, 2. pkt., kann móðurfyritøkan rokna fíggjarjavnan, nettosøluna og miðaltalið av ársverkum í roknskaparárinum, sum samløga av øllum fíggjarjavnum, nettosølum og ársverkum. Í sambandi við uppgerðina av fíggjarjavnanum og nettosøluni skulu støddirnar á upphæddunum í stk. 1, nr. 1 og 2 hækkast við 20%.

Stk. 5. Møguleikin at nýta ásetingina í stk. 1 verður einans broyttur, um fyritøkurnar fíggjarjavnadagin tilsamans fara upp um, ella ikki longur fara upp um, tvey av teimum trimum støddarmørkunum, í tvey fylgjandi roknskaparár.

§ 132. Ein móðurfyritøka, hvørs dótturfyritøkur sambært § 135 kann haldast uttanfyri konsolideringina, kunnu lata vera við at gera ein samtaksroknskap.

Stk. 2. Ein móðurfyritøka, sum er ein vinnurekandi grunnur, kann lata vera við at gera samtaksroknskap, um:

1) grunnurin einans hevur eina dótturfyritøku,
2) grunnurin sjálvur einans í avmarkaðan mun rekur vinnuligt virksemi, og
3) grunnurin, burtursæð frá umbýtiligum skuldarbrøvum og vinningsbýti, sum ikki er goldið, ella útlutan, ikki hevur áogn hjá, ella hevur sett trygd fyri dótturfyritøkuna.

Stk. 3. Harumframt kann ein móðurfyritøka, sum er ein vinnurekandi grunnur, lata vera við at gera samtaksroknskap, um:

1) grunnurin hevur fleiri dótturfyritøkur og ein av hesum hevur gjørt ein samtaksroknskap, har móðurgrunnurin er undantikin,
2) samtaksroknskapurin er gjørdur samsvarandi hesi løgtingslóg, Evropatingsins og Ráðsins direktivi 2013/34/EU, við seinni broytingum, sbr. skjal 3, ella reglum, sum í minsta lagi kunnu javnmetast við ásetingarnar fyri samtaksroknskapir í nevnda direktivi, og samtaksroknskapurin er grannskoðaður av persónum, sum eru góðkendir sambært lóggávuni í tí landi, sum viðkomandi dótturfyritøka er heimahoyrandi í,
3) grunnurin sjálvur einans í avmarkaðan mun rekur vinnuligt virksemi,
4) grunnurin, burtursæð frá umbýtiligum skuldarbrøvum og vinningsbýti, sum ikki er goldið, ella útlutan, ikki hevur áogn hjá, ella hevur sett trygd fyri eina dótturfyritøku,
5) tað verður upplýst í ársfrásøgn grunsins, at grunnurin hevur latið vera við at gera samtaksroknskap vísandi til hetta undantak, og
6) grunnurin sendir Skráseting Føroya tann í nr. 1 nevnda grannskoðaða samtaksroknskap saman við egnari ársfrásøgn.

§ 133. Ein móðurfyritøka kann lata vera við at gera samtaksroknskap, sbr. tó § 130, stk. 2, um hon sjálv er dótturfyritøka hjá einari hægri móðurfyritøku, sum er fevnd av lóggávuni her í landinum, í Føroyum, í einum ES/EBS-landi ella í einum øðrum landi, sum Føroyar hava gjørt avtalu við, og:

1) Hægra móðurfyritøkan:
   a) hevur ognarhald upp á í minsta lagi 90% av kapitalpørtunum í lægri móðurfyritøkuni og minnilutaluttakarar mótvegis leiðsluni í hesi móðurfyritøku hava góðkent, at hon ikki ger samtaksroknsap, ella
   b) hevur ognarhald upp á minni enn 90% av kapitalpørtunum í lægri móðurfyritøkuni, og leiðslan í hesi móðurfyritøku ikki teir seinastu 6 mánaðirnar fyri roknskaparárslok hevur móttikið krav frá minnilutaluttakarum, sum eiga í minsta lagi 10% av fyritøkukapitalinum, um, at gera samtaksroknskap.
2) Hægra móðurfyritøkan ger samtaksroknskap og konsoliderøða leiðslufrágreiðing samsvarandi lóggávuni í tí landi, har tann hægra móðurfyritøkan er heimahoyrandi, og samtaksroknskapurin er grannskoðaður av persónum, sum eru góðkendir sambært lóggávuni í hesum landi.

Stk. 2. Ein móðurfyritøka kann harumframt lata vera við at gera samtaksroknskap, sbr. tó § 130, stk. 2, um hon sjálv er dótturfyritøka hjá einari hægri móðurfyritøku, sum er fevnd av lóggávuni í einum landi, sum ikki er fevnt av tí í stk. 1 umrøddu lóggávu, og:

1) evsta leiðslan í lægri móðurfyritøkuni ikki teir seinastu 6 mánaðirnar fyri roknskaparárslok hevur móttikið krav frá minnilutaluttakarum, sum eiga í minsta lagi 10% av fyritøkukapitalinum, um, at gera samtaksroknskap,
2) hægra móðurfyritøkan ger samtaksroknskap, og har tað er viðkomandi, konsoliderøða leiðslufrágreiðing við støði í Evropatingsins og Ráðsins direktivi 2013/34/EU, ella í reglum, sum í minsta lagi kunnu javnmetast við

reglurnar fyri konsolideraðar ársroknskapir í Evropatingsins og Ráðsins direktivi 2013/34/EU, ella teimum altjóða roknskaparstandardunum, sum eru samtyktir av Evropakommissiónini samsvarandi Evropatingsins og Ráðsins fyriskipan nr. 1606/2002 um at nýta altjóða roknskaparstandardar, ella reglur, sum Evropakommissiónin hevur mett at vera javnmettar við reglurnar fyri konsolideraðar ársroknskapir í teimum altjóða roknskaparstandardunum, og

3) samtaksroknskapurin er grannskoðaður av persónum, sum eru góðkendir samsvarandi lóggávuni í tí landi, har tann hægra móðurfyritøkan er heimahoyrandi.

Stk. 3. Fyri tey í stk. 1 og 2 umrøddu undantøkini krevst harumframt at:

1) lægra móðurfyritøkan og hennara dótturfyritøkur verða tiknar við í samtaksroknskapinum hjá hægru móðurfyritøkuni við fullari konsolidering, sbr. tó § 135,
2) lægra móðurfyritøkan í sínum ársroknskapi kunnger, at hon hevur latið vera við at gera samtaksroknskap eftir stk. 1 ella 2, og upplýsir navn, heimstað og møguligt skrásetingarnummar ella annað eyðkenningarnummar fyri hægru móðurfyritøkuna, og
3) lægra móðurfyritøkan sendir Skráseting Føroya tann í stk. 1 ella 2 nevnda samtaksroknskap, leiðslufrágreiðing og tilhoyrandi grannskoðaraátekning umframt tær upplýsingar, sum Skráseting Føroya mátti kravt sambært § 172.

§ 134. Fyri samtøkur, sum eftir eliminering sambært § 141, eru innanfyri støddarmørkini fyri miðalstórar fyritøkur sambært § 7, stk. 2-4, skal samtaksroknskapurin í minsta lagi gerast samsvarandi ásetingunum fyri miðalstórar fyritøkur í roknskaparflokki C.

Stk. 2. Fyri samtøkur, sum eftir eliminering sambært § 141, eru innanfyri støddarmørkini fyri stórar fyritøkur sambært § 7, stk. 2-4, skal samtaksroknskapurin í minsta lagi gerast samsvarandi ásetingunum fyri stórar fyritøkur í roknskaparflokki C. 1. pkt. er galdandi fyri samtøk, sum eftir eliminering sambært § 141, eru innanfyri støddarmørkini fyri smáar fyritøkur sambært § 7, stk. 2-4, men sum kunnu lata vera við at gera samtaksroknskap sambært § 131.

Stk. 3. Er móðurfyritøkan í roknskaparflokki D, skal samtaksroknskapurin gerast sambært reglunum fyri roknskaparflokk D uttan mun til samtaksins støddd.

Stk. 4. Ger ein móðurfyritøka, sum kann lata vera við at gera samtaksroknskap, kortini ein samtaksroknskap, sum ikki einans er ætlaður til fyritøkunnar egnu nýtslu, eru ásetingarnar um samtaksroknskapir í kapitli 15 galdandi. Móðurfyritøkan kann tó velja at nýta ásetingarnar fyri ársroknskapir í roknskaparflokki B fyri samtaksroknskapin, um móðurfyritøkan kann lata vera við at gera samtaksroknskap sambært § 131. Kapitalpartar í leyst atknýttum fyritøkum skulu tó í samtaksroknskapinum innroknast og mátast til innara virðið hjá hesum fyritøkum við at nýta ásetingarnar í § 48, stk. 2-6.

Kapittul 15
Samtaksroknskapsins innihald

Hvat konsolideringin fevnir um

§ 135. Uttan so, at annað er ásett í hesi grein, skulu roknskapirnir fyri allar samtaksfyritøkurnar takast við í samtaksroknskapinum við fulla konsolidering.

Stk. 2. Ein samtaksfyritøka kann haldast uttanfyri konsolideringina, um:

1) hon er ein dótturfyritøka og týðandi og varandi forðingar í stóran mun

avmarka móðurfyritøkuni í at útinna síni rættindi yvir dótturfyritøkunnar ognum og leiðslu,
2) hon er ein dótturfyritøka, og neyðugu upplýsingarnar ikki kunnu fáast til vegar innan fyri rímiliga freist ella uttan óvanliga stórar útreiðslur,
3) hon er ein dótturfyritøka, sum ikki áður hevur verið tikin við í samtaksroknskapin við konsolidering, og móðurfyritøkan einans eigur kapitalpartarnar í dótturfyritøkuni við tí fyri eyga at avhenda hana, ella
4) hon er ein vinnurekandi móðurgrunnur, sum bert í avmarkaðan mun sjálv rekur vinnuligt virksemi og ikki, burtusæð frá umbýtiligum skuldarbrøvum og vinningsbýti, sum ikki er goldið, ella útlutan, hevur áogn hjá, ella hevur sett trygd fyri eina dótturfyritøku.

Almenn krøv til samtaksroknskapin

§ 136. Samtaksroknskapurin skal vísa ognir og skyldur hjá teimum konsolideraðu fyritøkunum, teirra fíggjarligu støðu og úrslit, sum um tær tilsamans vóru ein einstøk fyritøka.

§ 137. Samtaksroknskapurin skal hava sama fíggjarjavnadag sum móðurfyritøkunnar ársroknskapur.
Stk. 2. Liggur fíggjarjavnadagurin hjá einari dótturfyritøku, sum er konsoliderað, í mesta lagi tríggjar mánaðir undan móðurfyritøkunnar fíggjarjavnadag, kann dótturfyritøkan takast við í konsolideringini við støði í sínum ársroknskapi.
Stk. 3. Liggur fíggjarjavnadagurin hjá einari dótturfyritøku, sum er konsoliderað, meira enn tríggjar mánaðir undan móðurfyritøkunnar fíggjarjavnadag, ella eftir móðurfyritøkunnar fíggjarjavnadag, skal dótturfyritøkan takast við í samtaksroknskapin við støði í einum serligum roknskapi, gjørdur samsvarandi hesi løgtingslóg móðurfyritøkunnar fíggjarjavnadag.

Samandráttur

§ 138. Í sambandi við konsolideringina kunnu roknskapirnir skrivast í samandrátti, soleiðis at einsháttaðar inntøkur og útreiðslur og ognir og skyldur verða lagdar saman. Tær tillagingar skulu gerast, sum eru neyðugar vegna serlig viðurskifti, sum galda fyri samtaksroknskapir, sæð í mun til árroknskapir.
Stk. 2. Samtaksfyritøkur, har samtaksviðurskiftini eru sett á stovn í roknskaparárinum, mugu einans takast við í samandrátti við inntøkum og útreiðslum frá teimum transaktiónum og viðurskiftum, sum eru ikomin eftir ta løtu, samtaksviðurskiftini vórðu sett á stovn.
Stk. 3. Samtaksfyritøkur, har samtaksviðurskiftini eru hildin uppat í roknskaparárinum, mugu einans takast við í samandrátti við inntøkum og útreiðslum frá teimum transaktiónum og viðurskiftum, sum eru ikomin fram til ta løtu, samtaksviðurskiftini eru hildin uppat.

Flokking

§ 139. Samtaksroknskapsins fíggjarjavni, rakstrarroknskapur og peningastreymsuppgerð skulu setast upp samsvarandi ásetingunum fyri árroknskapir í roknskaparflokki C sambært § 80, uttan so, at annað er áett í 2. pkt. ella í stk. 2-4. Um móðurfyritøkan skal fylgja ásetingunum fyri árroknskapir í roknskaparflokki D sambært § 120, skal samtaksroknskapurin eisini fylgja hesum ásetingum, uttan so, at annað er ásett í stk. 2-4.
Stk. 2. Kapitalpartar í, áogn hjá ella skuld til dótturfyritøkur, sum ikki eru konsolideraðar, ávikavist kapitaláhugamál, setast sum serskildir postar í samtaksroknskapsins fíggjarjavna.
Stk. 3. Konsolideraða eginognin kan verða sett upp soleiðis, at einans teir postar verða vístir, sum eru neyðugir til tess at fáa eina rættvísandi mynd, sum nevnt í § 14, stk. 1.
Stk. 4. Minnilutaáhugamálsins lutfalsligi partur av dótturfyritøkunnar eginogn skal

setast upp sum ein serskildur høvuðspostur millum, Eginogn og Skyldur . Minnilutaáhugamálsins lutfalsligi partur av fyritøkunnar úrsliti verður settur upp sum ein serskildur postur í rakstrarroknskapinum.

Innrokning og máting

§ 140. Tær ognir og skyldur, inntøkur og útreiðslur, sum eru fevndar av konsolideringini, skulu innroknast og mátast eftir einsháttaðum leisti samsvarandi ásetingunum fyri ársroknskapir í roknskaparflokki C sambært §§ 37-57, 80 og 84-87. Kapitalpartar í leyst atknýttum fyritøkum skulu tó innroknast og mátast eftir innaravirðisháttinum sambært § 49, stk. 2-6.
Stk. 2. Í samtaksroknskapinum verða, so vítt møguligt, nýttir somu hættir fyri innrokning og grundarlag fyri máting, sum í móðurfyritøkunnar ársroknskapi. Nýta konsolideraðar dótturfyritøkur aðrar hættir og grundarløg í teirra egna ársroknskapi, skal ein nýggjur roknskapur gerast við tí fyri eyga at gera samtaksroknskap, har innroknað og mátað verður samsvarandi teimum hættum og grundarløgum, sum eru nýtt í móðurfyritøkunnar egna ársroknskapi.
Stk. 3. Vikið kann vera frá stk. 2, 2. pkt. í serligum førum.

Eliminering

§ 141. Fylgjandi postar skulu eliminerast:
1) Áogn og skyldur millum konsolideraðar fyritøkur,
2) inntøkur og útreiðslur, sum eru úrslitið av transaktiónum millum konsolideraðar fyritøkur, og
3) vinningur og hall, sum eru úrslitið av transaktiónum millum konsolideraðar fyritøkur, sum eru partur av postanna bókaða virði.

Um at stovna samtøku

§ 142. Tá ið onki annað er ásett, verður stovnan av samtøkuviðurskiftum millum tvær fyritøkur viðgjørd eftir yvirtøkuháttinum sambært § 143.
Stk. 2. Eru fyritøkurnar við stovnanina av samtakinum báðar undirlagdar einari móðurfyritøku í einum samtaki, ella eru báðar fyritøkurnar annars undirlagdar avgerandi ávirkanina hjá sama áhugamáli, bæði fyri og eftir samanleggingina, og er hendan avgerandi ávirkanin ikki einans fyribils, kann stovnanin av samtakinum viðgerðast eftir samanleggingarháttinum sambært § 143.

Um yvirtøku av fyritøkum

§ 143. Verða samtaksviðurskiftini stovnaði við yvirtøku av einari fyritøku, skulu ognir og skyldur í yvirtiknu fyritøkuni innroknast og mátast til dagsvirðið yvirtøkudagin í samtaksroknskapinum, hóast tey undan yvirtøkuni ikki vórðu tikin við í fyritøkunnar fíggjarjavna.
Stk. 2. Tá ið metast skal um, hvør fyritøka er útvegandi fyritøkan, er byrjanarstøðið tey veruligu viðurskiftini. Um tað ikki er eyðsæð, hvør veruligi útvegarin er, kann formligi útvegarin roknast sum útvegari.
Stk. 3. Kapitalpartar hjá konsolideraðum fyritøkum í einari konsolideraðari dótturfyritøku, mátað til kostprís,verða útjavnaðir við lutfalsliga partinum hjá konsolideraðu fyritøkunum í dótturfyritøkunnar nettoognum, mátað til dagsvirðið sambært stk. 1.
Stk. 4. Ein positiv munarupphædd, sum er íkomin sambært stk. 3, verður viðgjørd sum goodwill sambært § 48. Ein negativ munarupphædd verður inntøkuført í rakstrarroknskapinum.
Stk. 5. Kapitalpartar í einari móðurfyritøku, sum ein konsoliderað fyritøka hevur ognarhald á, verða ikki útjavnaðir, men verða viðgjørdir sum egnir kapitalpartar.

Um samanlegging av fyritøkum

§ 144. Eftir samanleggingarháttinum verður samtaksroknskapur gjørdur fyri tað tíðarskeið, sum samanleggingin er farin fram í, sum um samanlegging var farin fram í fyrsta roknskapartíðarskeiði, sum er partur av roknskapinum.
Stk. 2. Fyritøkan kann tó í staðin velja at meta samanleggingina sum verandi framda við útveganartíðspunktið.
Stk. 3. Munurin millum tær upphæddir, sum verða goldnar sum fyritøkukapitalur, og møguligan yvirkurs við møguligari samsýning í reiðupeningi og roknskaparliga innara virðið í dótturfyritøkuni verður ávikavist lagdur afturat og drigin frá týðiliga í tí tiltakspeningi, sum kann nýtast til at rinda hall.

Pro rata-konsolidering

§ 145. Ein fyritøka, sum fyritøkan stjórnar saman við einari ella fleiri øðrum fyritøkum, kann takast við í samtaksroknskapinum við pro rata-konsolidering.
Stk. 2. Postarnir í felags stjórnaðu fyritøkuni verða tiknir við lutfalsliga í mun til partin hjá konsolideraðu fyritøkunum í fyritøkunnar eginogn og úrsliti. Annars eru ásetingarnar um konsolidering o.a. í §§ 135-143 galdandi við neyðugum tillagingum.

Notuupplýsingar

Frágreiðing um nýttan roknskaparhátt

§ 146. Samtaksroknskapsins frágreiðing um nýttan roknskaparhátt og noturnar skulu upplýsa um samtakið, sum um tær konsolideraðu fyritøkurnar saman vóru ein fyritøka. §§ 59-61 og 90 eru samsvarandi galdandi fyri upplýsingar í samtaksroknskapinum um samtakið. Í staðin fyri upplýsingar um upphæddir hjá einstøku fyritøkuni verða vístar uphæddir fyri konsolideraðu fyritøkurnar tilsamans, konsolideraða eftir sama hátti, sum er galdandi fyri samtaksroknskapin.

Stk. 2. Frágreiðingin um nýttan roknskaparhátt skal eisini fevna um:
1) Hvørt ein samtaksfyritøka ikki er tikin við, saman við einari ítøkiligari og nøktandi grundgeving.
2) Hvørt fíggjarjavnadagurin hjá einari konsolideraðari dótturfyritøku ikki er tann sami sum hjá móðurfyritøkuni sambært § 137, stk. 2, 1. pkt. Eru týdningarmiklar hendingar farnar fram millum teir báðar fíggjarjavnadagarnar, sum hava havt ávirkan á dótturfyritøkunnar ognir og skyldur, fíggjarligu støðu ella úrslit, skal greiðast frá hesum.
3) Hvørt aðrir hættir fyri innrokning ella mátistøði eru nýttir samanborið við móðurfyritøkunnar ársroknskap, umframt eina ítøkiliga og nøktandi grundgeving fyri at nýta aðrar hættir sambært § 139, stk. 2 og 3.

Stk. 3. Í einum serskildum parti av frágreiðingini um nýttan roknskaparhátt skal greiðast frá:
1) Um fyritøkan hevur nýtt undantakið í § 135, stk. 2, nr. 4. Í hesum føri skal samtaksins úrslit og eginogn upplýsast.
2) Írestandi positivum og negativum munarupphæddum sambært §§ 143 og 144 umframt teimum hættum, sum eru nýttir í sambandi við uppgerðina. Eru broytingar í munarupphæddunum í mun til undanfarna ár, skal greiðast frá hesum.

Aðrar upplýsingar í notunum

§ 147. Fylgjandi krøv galda samsvarandi fyri samtaksroknskapin:
1) Upplýsingar um nettosøluna býtt á virkisøkir og landafrøðilig økir sambært § 107, stk. 1.
2) Upplýsingar um ómaksløn til góðkendan grannskoðara sambært § 107, stk. 2.
3) Upplýsingar um serligar inntøkupostar ella útreiðslupostar sambært § 73.
4) Upplýsingar um leiðslunnar uppskot til avgerð um at nýta fyritøkunnar vinning ella at rinda hall sambært § 106.

5) Upplýsingar um ognir sambært §§ 63-67, 92-94 og 97.
6) Upplýsingar um eventualognir sambært § 97.
7) Upplýsingar um fyritøkukapitalin sambært § 91.
8) Upplýsingar um skyldur sambært §§ 99-101.
9) Upplýsingar um eventualskyldur, o.a. sambært §§ 70 og 102-104.
10) Upplýsingar um nærskyldar partar, o.a. sambært §§ 74, 77, 110 og 111 og § 114, stk. 1, 2, 4, 5 og 6.
11) Upplýsingar um týdningarmiklar hendingar, sum eru farnar fram eftir roknskaparárslok sambært § 115.

Stk. 2. Kravið um upplýsingar um áogn, um trygdir hjá og trygdir vegna leiðslulimir í § 77 og kravið um upplýsingar um samsýning, o.a. í § 113 eru samsvarandi galdandi fyri samlaðu upphæddirnar til umrøddu sløg av leiðslulimum og fyritøkuluttakarum í móðurfyritøkuni, sum eru fevndir av hesum ásetingum, og sum samtaksfyritøkurnar tilsamans hava veitt hesum persónum.

Stk. 3. Kravið í § 124 er samsvarandi galdandi fyri upplýsingar um veitingar sambært § 113 sambært stk. 2 omanfyri, um móðurfyritøkan er fevnd av reglunum fyri roknskaparflokk D.

Stk. 4. Upplýsingar skulu latast um broytingar í minnilutaáhugamálsins lutfalsliga parti av dótturfyritøkunnar eginogn.

Stk. 5. Upplýsingarnar sambært stk. 1 skulu latast í somu raðfylgju sum teir postar í rakstrarroknskapinum og figgjarjavnanum, sum tær viðvíkja.

Stk. 6. Miðaltalið av ársverkum í pro rata-konsolideraðum fyritøkum skal upplýsast serskilt.

Stk. 7. Upplýsingar skulu latast um broytingar í tiltakspeningi, sum fylgja av, at § 144 verður nýtt, umframt navn og heimstað hjá teimum fyritøkum, sum í árinum eru innroknaðar og mátaðar sambært § 144.

§ 148. Fyri ávikavist hvørja konsolideraða og ikki-konsolideraða dótturfyritøku skal upplýsast:

1) navn og heimstaður,
2) hvussu stórum parti av eginogn samtaksfyritøkurnar tilsamans hava ognarhald á,
3) grundarlagið fyri samtaksviðurskiftunum sambært skjali 1, B, nr. 4, uttan so at ásett er í nevnda nr. 4, punkt 1, meirilutin av atkvøðurættindunum og samtaksfyritøkunnar partur av dótturfyritøkunnar fyritøkukapitali og atkvøðurættindum er tann sami,
4) ein ítøkilig og nøktandi grundgeving, um fyritøkan er hildin uttanfyri konsolideringina sambært § 135, stk. 2, og
5) um tann í § 144 umrøddi háttur fyri kapitaljavnan er nýttur.

Stk. 2. Fyri hvørja leyst atknýtta fyritøku skal upplýsast:

1) navn og heimstaður,
2) hvussu stórum parti av eginognini tær konsolideraðu fyritøkurnar hava ognarhald á, og
3) grundarlagið fyri felags stjórnini.

Stk. 3. Fyri hvørja fyritøku, hvørs roknskapur er við í pro rata-konsolideringini sambært § 145 skal upplýsast:

1) navn og heimstaður,
2) hvussu stórum parti av eginognini tær konsolideraðu fyritøkurnar hava ognarhald á, og
3) grundarlagið fyri felags stjórnini.

Stk. 4. Fyri hvørt kapitaláhugamál, sum ikki er ein leyst atknýtt fyritøka, skal upplýsast:

1) navn og heimstaður,
2) hvussu stórum parti av eginognini tær konsolideraðu fyritøkurnar hava ognarhald á, og
3) støddin av eginognini og úrslitinum sambært seinastu góðkendu ársfrásøgnini.

Stk. 5. Eitt kapitaláhugamál kann lata vera við at lata upplýsingarnar sambært stk. 4,

nr. 3, um so er, at kapitaláhugamálið ikki hevur almannakunngjørt eina ársfrásøgn.
Stk. 6. Harumframt skal upplýsast um navn, heimstað og virkisháttt fyri hvørt íognarfelag ella kommanditfelag, sum eru íognarar ella komplementarar í teimum konsolideraðu fyritøkunum.
Stk. 7. Fyritøkan kann lata vera við at lata upplýsingar sambært stk. 1-6 um hetta kann elva til munandi skaða á fyritøkuna sjálva ella fyri tær í stk. 1-6 nevndu fyritøkur. Letur fyritøkan vera við at lata upplýsingar vísandi til hetta undantak, skal tað nevnast.

Leiðslufrágreiðingin

§ 149. Leiðslufrágreiðingin fyri samtakið skal upplýsa um samtakið, sum um samtaksfyritøkurnar saman vóru ein fyritøka. Í staðin fyri upplýsingar um upphæddir hjá einstøku fyritøkuni verða vístar uphæddir fyri konsolideraðu fyritøkurnar tilsamans, konsoliderað eftir sama hátti, sum er galdandi fyri samtaksroknskapin.
Stk. 2. §§ 78, 79 og 116-119 eru galdandi. Fyritøkan kann tó lata vera við at lata upplýsingar sambært § 116, stk. 1, nr. 7.
Stk. 3. Er móðurfyritøkan fevnd av reglunum fyri roknskaparflokk D, eru §§ 125 og 127 samsvarandi galdandi fyri samtaksins leiðslufrágreiðing, sbr. tó stk. 7.
Stk. 4. Fyrstu ferð ein móðurfyritøka, sum hevur latið vera við at gera samtaksroknskap sambært §§ 131-133, ger samtaksroknskap, kann fyritøkan uttan mun til ásetingina í § 119, stk. 1, nr. 2, lata vera við at vísa samanberingartøl fyri 2.-4. undanfarna roknskaparár.
Stk. 5. Móðurfyritøkunnar og samtaksins leiðslufrágreiðing kann skrivast í samandrátti um tað uttan trupulleika ber til at finna tær upplýsingar, sum eru kravdar sambært hesi løgtingslóg, og sum ikki eru vorðnar óneyðugar orsakað av tí, at tær eru skrivaðar í samandrátti, sbr. tó § 25, stk. 4, § 80, stk. 6 og § 120, stk. 9.
Upplýsingarnar sambært § 127 fyri ávikavist móðurfyritøkuna og samtakið verða givnar undir einum. 2. pkt. er samsvarandi galdandi fyri landspartafeløg sambært § 128, sbr. tó § 303 í vinnufelagalógini.

Kapittul 16
Samanleggingarroknskapir o.a.

§ 150. Í tann mun tað sambært lóggávuni ella avtalu verður gjørd ein uppgerð yvir samandráttin viðvíkjandi ognum og skyldum hjá fyritøkum, sum verða lagdar saman, eru ásetingarnar í §§ 136-144, tó burtursæð frá § 139, stk. 3, samsvarandi galdandi í mun til byrjanarjavnan fyri tær samanløgdu, framhaldandi ella fyri ta fyritøku, sum er stovnað sum liður í samanleggingini. Ásetingarnar fyri móðurfyritøkuna eru galdandi í mun til framhaldandi fyritøkuna, og ásetingarnar fyri dótturfyritøkuna eru samsvarandi galdandi fyri uppathaldandi fyritøkuna.
Stk. 2. Uttan so, at annað er ásett í lóggávuni ella í avtalu, skal samtaksroknskapurin fevna um ein byrjanarjavna fyri samanløgdu, framhaldandi ella fyri ta fyritøku, sum er stovnað sum liður í samanleggingini saman við ultimojavnanum fyri tær samanløgdu fyritøkurnar og ein uppgerð viðvíkjandi teimum flytingum, sum eru neyðugar sum liður í samanleggingini ella teimum atgerðum, sum skulu gerast sum liður í samanleggingaravtaluni. Tær notur, sum eru neyðugar fyri at geva eina rættvísandi mynd av framhaldandi fyritøkuni ella av tí fyritøku, sum er stovnað sum liður í samanleggingini, skulu skoytast uppí byrjanarjavnan, umframt møguligar ískoytisfrágreiðingar, sum avgerð er tikin um í samanleggingaravtaluni.

§ 151. Ásetingarnar í § 150 eru, við neyðugum tillagingum, samsvarandi galdandi, tá ið ein fyritøka yvirtekur ognir og skyldur í sambandi við kloyving.

Partur VII

Ársfrásagnir fyri part av árinum fyri landspartafeløg og fyritøkur, sum hava virðisbrøv, sum eru upptikin til handils á einum reguleraðum marknaði í Føroyum ella í einum ES/EBS-landi

Kapittul 17
Hálvársfrásøgn fyri landspartafeløg

Almennar ásetingar

§ 152. Landspartafeløg skulu gera hálvársfrásøgn, sum skal fevna um fyrstu seks mánaðarnir í felagsins roknskaparári, sbr. tó § 303 í vinnufelagalógini. Er felagið ein móðurfyritøka, skal hálvársfrásøgnin gerast, sum um tær konsolideraðu fyritøkurnar saman vóru ein fyritøka.
Stk. 2. Landspartafeløg kunnu harumframt gera samsvarandi frágreiðingar fyri onnur tíðarskeið.

Innrokning og máting

§ 153. Hálvársfrásøgnin skal gerast samsvarandi somu grundleggjandi krøvum, sum eru galdandi fyri ársfrásøgnina sambært kapitli 4.
Stk. 2. Hálvársfrásøgnin skal innihalda upplýsingar fyri nevnda undanfarna hálvárstíðarskeið svarandi til tær upplýsingar, sum eru kravdar sambært § 119, stk. 1, nr. 1. Út frá hvørjum tali skal setast samsvarandi talið fyri sama tíðarskeið undanfarna ár. § 29, stk. 1, 2. og 3. pkt. og § 61 eru samsvarandi galdandi.

Leiðslufrágreiðingin

§ 154. Hálvársfrásøgnin skal innihalda fylgjandi upplýsingar:
1) eina frágreiðing um gongdina í virkseminum og viðurskiftunum hjá fyritøkuni,
2) eina frágreiðing um væntaðu gongdina í fyritøkuni,
3) eina frágreiðing um serligar fortreytir, sum leiðslan hevur lagt til grund fyri frágreiðingina um væntaðu gongdina, og
4) upplýsingar um týðandi avgerðir, sum fyritøkunnar evsta leiðsla hevur tikið í viðkomandi hálvárstíðarskeiði.

Kapittul 18
Ársfrásagnir fyri part av árinum fyri fyritøkur, sum hava virðisbrøv, sum eru upptikin til handils á einum reguleraðum marknaði í einum ES/EBS-landi

§ 155. Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um,
1) at fyritøkur í roknskaparflokki D, sum hava virðisbrøv, sum eru upptikin til handils á einum reguleraðum marknaði í Føroyum ella í einum ES/EBS-landi, skulu gera ársfrásøgn fyri fyrstu 6 mánaðirnar í hvørjum roknskaparári, t.e. hálvársfrásøgn.
2) innihaldið í hálvársfrásøgnini, og um hvussu upplýsingarnar skulu vísast fram, og
3) at sjálvbodnar ársfrásagnir fyri ein part av árinum, sum verða gjørdar av fyritøkum fyri eitt tíðarskeið, sum er styttri enn 6 mánaðir, skulu gerast eftir somu reglum, sum eru galdandi fyri hálvársfrásagnir.

Stk. 2. Harumframt kann landsstýrisfólkið áseta reglur um ársfrásagnir fyri ein part av árinum, sum verða gjørdar av fyritøkum í roknskaparflokki A og sum hava virðisbrøv upptikin til handils á einum reguleraðum marknaði í Føroyum ella í einum ES/EBS-landi.
Stk. 3. Ásetingarnar í stk. 1 og 2 eru ikki galdandi fyri fyritøkur, sum einans geva út skuldarinstrument, sum eru upptikin til handils á einum reguleraðum marknaði í Føroyum ella í einum ES/EBS-landi, hvørs áljóðandi virði pr. eind er minst 100.000 evrur, ella hvørs áljóðandi virði pr. eind er minst 100.000 evrur á útgávudegnum, tá skuldarinstrumentið er givið út í einari aðrari peningseind enn evrur.

Partur VIII
Grannskoðan o.a. av ársfrásøgnini

Kapittul 19
Grannskoðan o.a.

§ 156. Fyritøkur, sum hava skyldu at gera ársfrásøgn eftir reglunum fyri roknkaparflokk B, C ella D, skulu lata sín ársroknskap og ein møguligan samtaksroknskap grannskoða av einum ella fleiri góðkendum grannskoðarum, sbr. tó stk. 2. Fyritøkur í roknskaparflokki B kunnu tó velja at lata grannskoðanina sambært 1. pkt. verða framda eftir váttanarstandardi Skráseting Føroya fyri smærri fyritøkur, t.e. víðkað gjøgnumgongd, sbr. tó stk. 3 og 4, um fyritøkan fíggjarjavnadagin í tvey fylgjandi roknskaparár ikki fer upp um tvey av fylgjandi støddarmørkum:

1) Ein fíggjarjavna upp á 15 mió. kr.,
2) eina nettosølu upp á 30 mió. kr., og
3) eitt miðaltal av heiltíðarsettum starvsfólkum upp á 15.

Stk. 2. Fyritøkur í roknskaparflokki B kunnu lata vera við at lata ársfrásøgn sína grannskoða, um fyritøkan fíggjarjavnadagin í tvey fylgjandi roknskaparár ikki fer upp um tvey av fylgjandi støddarmørkum:

1) Ein fíggjarjavna upp á 1,25 mió. kr.,
2) eina nettosølu upp á 2,5 mió. kr., og
3) eitt miðaltal gjøgnum roknskaparárið av heiltíðarsettum starvsfólkum upp á 12.

Stk. 3. Undantakið í stk. 2 er ikki galdandi fyri fyritøkur, sum hava skyldu til at gera ársfrásøgn sambært stk. 1, 1. pkt. um fyritøkan í tvey fylgjandi roknskaparár fer upp um ein fíggjarjavna á 50 mió. kr.

Stk. 4. Ásetingin í stk. 1, 2. pkt., og undantakið í stk. 2, eru ikki galdandi fyri vinnurekandi grunnar sambært § 3, stk. 1, nr. 3.

Stk. 5. Ásetingin í stk. 1, 2. pkt. og undantakið í stk. 2 eru ikki galdandi fyri fyritøkur, sum hava kapitaláhugamál í øðrum fyritøkum, og sum hava týðandi ávirkan á rakstrarligu ella fíggjarligu leiðsluna í einum ella fleiri av hesum fyritøkunum, um fyritøkan og tær fyritøkur, sum fyritøkan hevur kapitalpartar í og hevur týðandi ávirkan á, tilsamans fíggjarjavnadagin í tvey fylgjandi roknskaparár ikki fer upp um tvey av fylgjandi støddarmørkunum í ávikavist § 7, stk. 2, nr. 1, og stk. 1, nr. 1-3. Útrokningareglurnar í § 132 verða nýttar samsvarandi upp á útrokningina eftir 1. pkt.

Stk. 6. § 7, stk. 3 og 4 eru galdandi tá ið støddarmørkini sambært stk. 1, 3. pkt. og stk. 2 og 5 verða roknað.

Stk. 7. Har tað í lóggávuni er loyvt, at upplýsingar, sum skulu latast í ársroknskapinum ella samtaksroknskapinum, kunnu setast í onnur skjøl, o.a., har víst verður til ársroknskapin ella samtaksroknskapin, fevnir grannskoðanarskyldan sambært stk. 1, 1. pkt., eisini um viðkomandi upplýsingar í slíkum skjølum o.a. Grannskoðanarskyldan sambært stk. 1, 1. pkt. fevnir ikki um leiðslufrágreiðingina ella ískoytisfrágreiðingar til ársfrásøgnina sambært § 2, stk. 1 og 2. Góðkendi grannskoðarin skal tó ummæla leiðslufrágreiðingina. 2. og 3. pkt. eru galdandi fyri tær upplýsingar, sum verða tiknar við í leiðslufrágreiðingini, og fyri tær upplýsingar, sum sambært hesi løgtingslóg ella eftir reglum, sum eru ásettar við heimild í hesi løgtingslóg, alternativt sum eru almannakunngjørdar onnur støð, har víst verður til leiðslufrágreiðingina.

Stk. 8. Landsstýrisfólkið kann áseta krøv um grannskoðan av ískoytisfrágreiðingum til ársfrásøgnina fyri allar ella fyri nakrar fyritøkur í roknskaparflokki C og D.

§ 157. Ásetingin í § 156, stk. 2, kann ikki verða nýtt av einari fyritøku, tá fyritøkan sjálv, ein atknýtt fyritøka ella tann, sum hevur avgerandi ávirkan á fyritøkuna, hevur góðtikið uppskot til sekt, ella sum liður í revsimáli er dømdur fyri brot á vinnufelagalóggávuna, roknskaparlóggávuna, hvítvasklóggávuna, skattalóggávuna ella avgjaldslóggávuna. Ein fyritøka, sum er fevnd av 1. pkt. kann

ikki velja grannskoðan frá í tí roknskaparári, har endaligur dómur er sagdur ella har tað endaliga sektaruppskotið er samtykt, og fyri tey 2 eftirfylgjandi roknskaparárini.
Stk. 2. Hevur ein persónur, sum vil koma inn sum leiðslulimur í einari fyritøku, innan fyri tey seinastu 2 árini verið álagdur trotabúsbann eftir reglunum í anordning om ikrafttræden for Færøerne af konkursloven, kann fyritøkan ikki nýta undantakið í § 156, stk. 2, frá og við tí roknskaparári, sum leiðslulimurin er komin inn í fyritøkuna, og til og við tað roknskaparár, sum hevur fíggjarjavnadag seinast 2 ár eftir, at trotabúsbannið hjá leiðsluliminum er gingið út. Fer leiðslulimurin úr fyritøkuni innan eina freist, sum Skráseting Føroya ásetir, er 1. pkt. ikki galdandi.
Stk. 3. Skráseting Føroya kann taka avgerð um, at ásetingin í § 156, stk. 1 og 2 ikki er galdandi fyri eina fyritøku fyri inniverandi og fyri tey 2 fylgjandi roknskaparár, um Skráseting Føroya í sambandi við eftirlit við ársfrásøgnini sambært § 193, stk. 1, staðfestir munandi villur ella manglar í mun til vinnufelagalóggávuna ella roknskaparlóggávuna, ella um Skráseting Føroya í sambandi við eftirlit eftir bókhaldslógini hevur staðfesti munandi villur ella manglar í bókhaldinum hjá fyritøkuni.

§ 158. Einans grannskoðarar, sum eru góðkendir sambært grannskoðaralógini, kunnu geva váttanir í sambandi við ársroknskapir og samtaksroknskapir, sum eru fevndir av § 156, stk. 1, 1. pkt. og stk. 5, og ummæla leiðslufrágreiðingina, o.a. sambært § 156, stk. 6, 3. og 4. pkt. Ásetingin í 1. pkt. er samsvarandi galdandi, um ein fyritøka, sum er undantikin frá grannskoðanarskylduni velur at lata ársfrásøgn sína grannskoða, ella velur at lata ein góðkendan grannskoðara gera annað arbeiði, har ein váttan verður givin í sambandi við ársroknskapin, heruppií ein váttan um roknskaparhjálp.
Stk. 2. Í sambandi við grannskoðan av ársroknskapum, sum skulu gerast samsvarandi reglunum fyri roknskaparflokk D, skal í minsta lagi ein grannskoðari vera løggildur grannskoðari.

Partur IX
Roknskaparlóggávan í Føroyum

Kapittul 20
um at gera roknskaparstandardar, o.a.

§ 159. Landsstýrisfólkið kann gera standardar, sum útfylla og skulu leggjast afturat hesi løgtingslóg. Standardarnir kunnu, innan fyri teir karmar, sum eru ásettir í Evropatinsings og Ráðsins direktiv 2013/34/EU, sbr. skjal 3, fevna um frávik frá teimum ásetingum, sum eru fevndar av undantaksskylduni eftir § 14, stk. 3, og har frávikið má metast at vera neyðugt til tess at kunna nýta ásetingina á praktiskan og skynsaman hátt. Standardarnir skulu áseta, hvørjir bólkar av fyritøkum skulu fylgja standardunum.
Stk. 2. Landsstýrisfólkið kann gera avtalu við ein ella fleiri óheftar felagsskapir um, at hesir heilt ella fyri ein part skulu hava tær uppgávur um hendur, sum eru nevndar í stk. 1. Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um, hvussu arbeiðið verður gjørt og skipað, heruppií um, at almennir myndugleikar skulu hava møguleika fyri at úttala seg um, ella gókenna standardar, sum verða gjørdir. Landsstýrisfólkið kann áleggja einum felagsskapi, sum avtala er gjørd við sambært 1. pkt., at gera serligar standardar fyri økir, har tað vísir seg at vera serligur tørvur á nærri reglum.
Stk. 3. Skráseting Føroya kann útnevna eitt Roknskaparráð, sum Skráseting Føroya kann ráðføra seg við um almenn roknskaparviðurskifti, og sum kunnu styðja stovninum í sambandi við tær í stk. 1 nevndu uppgávur. Skrivstovuhaldið verður lagt til Skráseting Føroya.

§ 160. Fyritøkur, sum ikki hava skyldu at nýta altjóða roknskaparstandardarnar sambært Evropatingsins og Ráðsins

fyriskipan nr. 1606/2002 um at nýta altjóða roknskaparstandardar, við seinni broytingum, sbr. skjal 4, kunnu frítt velja at gera ársroknskap ella samtaksroknskap eftir teimum nevndu standardum, sbr. tó stk. 2.
Stk. 2. Fyritøkur, sum hava virðisbrøv, sum eru upptikin til handils á einum reguleraðum marknaði í Føroyum ella í einum ES/EBS-landi, og sum einans gera ársroknskap, hava tó skyldu til at nýta teir í stk. 1 nevndu standardar í ársroknskapinum.
Stk. 3. Fyritøkur, sum sambært stk. 1 ella 2 fylgja teimum standardum, sum eru nevndir í stk. 1, skulu fylgja øllum teimum góðkendu standardunum. Í teimum førum, har hendan løgtingslóg løgskipar somu viðurskifti sum standardarnir, skulu fyritøkurnar nýta hesar standardar, heldur enn ásetingarnar í hesi løgtingslóg.
Stk. 4. Landsstýrisfólkið kann seta altjóða roknskaparstandardarnar í gildi fyri Føroyar, umframt artikkul 2 í Evropatingsins og Ráðsins fyriskipan nr. 2023/1803 um at samtykkja ávísar altjóða roknskaparstandardar samsvarandi Evropatingsins og Ráðsins fyriskipan nr. 1606/2002, sbr. skjal 4. Landsstýrisfólkið kann harumframt áseta nærri reglur, sum eru neyðugar til tess at nýta altjóða roknskaparstandardarnar og fyriskipanina, sum er nevnd í stk. 1, sbr. skjal 4.

§ 161. Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um, at víkjast kann frá ávísum ásetingum í hesi løgtingslóg, tá ið hetta er neyðugt fyri at nýta altjóða roknskaparstandardar, sum serliga eru tillagaðir tørvinum hjá smáum og miðalstórum fyritøkum.

Partur X
Almannakunngering og kanning av ársfrásøgnum

Kapittul 21
Um at lata ársfrásøgn o.a. inn til Skráseting Føroya

Um at lata ársfrásøgnina inn

§ 162. Fyritøkur í roknskaparflokki B, C og D skulu, uttan óneyðugt drál eftir at ársfrásøgning er góðkend, lata ársfrásøgnina inn til Skráseting Føroya sambært § 3, stk. 1 og § 7. Skráseting Føroya skal hava móttikið ársfrásøgnina í seinasta lagi 6 mánaðir eftir at roknskaparárið er liðið, tó er freistin 4 mánaðir fyri fyritøkur í roknskaparflokki D. Víkjast kann ikki frá hesum freistum, sbr. tó §§ 164 og 165.
Stk. 2. Góðkenda ársfrásøgnin skal í minsta lagi innihalda teir lutir, som eru kravdir fyri hvønn roknskaparflokk, umframt møguliga grannskoðaraátekning ella aðra váttan frá góðkendum grannskoðara sambært § 156, stk. 1 og 6, og § 158, stk. 1. Ynskir fyritøkan at almannakunngera ískoytisfrágreiðingar sum nevnt í § 2, stk. 2, skal hetta latast inn saman við teimum kravdu lutunum í ársfrásøgnini, soleiðis at kravdu lutirnir og ískoytisfrágreiðingarnar saman framstanda sum eitt skjal nevnt Ársfrásøgn.
Stk. 3. Ársfrásagnir og onnur skjøl, sum skulu latast inn til Skráseting Føroya sambært hesi løgtingslóg, skulu verða orðað á føroyskum ella á donskum, sbr. tó § 188.
Stk. 4. Letur ein fyritøka Skráseting Føroya eina sjálvbodna ársfrásøgn sambært § 4, stk. 7, 1. pkt., og er hendan grannskoðað, skal fyritøkan tryggja sær, at grannskoðaraátekningin er partur av skjalinum.
Stk. 5. Hevur Skráseting Føroya almannakunngjørt eina ársfrásøgn sambært § 184, kann ársfrásøgnin ikki verða umgjørd ella broytt við nýggjari ársfrásøgn uttan við loyvi frá Skráseting Føroya.
Stk. 6. Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um, at fyritøkur, sum ikki hava upplýst um nettosøluna í rakstrarroknskapinum sambært § 36, stk. 1, kortini skulu lata Skráseting Føroya upplýsingar um nettosøluna í seinasta lagi samstundis við, at ársfrásøgnin verður latin Skráseting Føroya. Landsstýrisfólkið kann

harumframt áseta nærri reglur um, á hvønn hátt upplýsingarnar skulu latast Skráseting Føroya, um tagnarskyldu, o.a. Ásetir landsstýrisfólkið slíkar reglur, verða upplýsingarnar um nettosøluna ikki almannakunngjørdar, og tær eru undantiknar rættinum til innlit sambært løgtingslóg um innlit í fyrisitingina.

Um hvussu fyritøkur undir avtøku ella endurskipanarviðgerð skulu lata ársfrásøgn inn

§ 163. Fyritøkur í likvidatión skulu lata ársfrásøgn inn til Skráseting Føroya sambært § 162 fram til likvidatiónin er komin at enda við, at fyritøkan er upploys.
Stk. 2. Fyritøkan skal harumframt lata Skráseting Føroya endaliga likvidatiónsroknskapin, um tað er ásett í serlóggávu, sum er galdandi fyri fyritøkuna.

§ 164. Skráseting Føroya kann, hóast freistina í § 162, stk. 1, 2. pkt., loyva, at ársfrásøgnin hjá einari fyritøku undir endurskipanarviðgerð verður latin inn soleiðis, at Skráseting Føroya móttekur ársfrásøgnina í seinasta lagi 1 mánað eftir, at endurskipanarviðgerðin er endað. Verður farið út um hesa freist, eru §§ 177-179 samsvarandi galdandi, tó so, at avgjaldið verður roknað 1 mánað eftir at endurskipanarviðgerðin er endað.
Stk. 2. Fer fyritøkan í trotabúsviðgerð, er ásetingin í § 165 galdandi.

§ 165. Fyritøkur undir trotabúsviðgerð skulu ikki lata ársfrásøgn til Skráseting Føroya.
Stk. 2. Verður fyritøkan endurupptikin sambært reglunum í anordning om ikrafttræden for Færøerne af konkursloven, skal fyritøkan lata ársfrásagnirnar inn fyri tíðarbilið frá fíggjarjavnadegnum sambært seinastu innlatnu ársfrásøgnini til endan av fyritøkunnar síðsta roknskaparári innan trotabúsviðgerðin helt uppat, soleiðis at Skráseting Føroya hevur móttikið ársfrásøgnina í seinasta lagi ein mánað eftir at trotabúsviðgerðin er endað.
Stk. 3. Í staðin fyri tær í stk. 2 nevndu ársfrásagnir kann Skráseting Føroya loyva fyritøkuni at senda ein byrjanarjavna, sum er gjørdur pr. tann dag, trotabúsviðgerðin er endað. Ársroknskapir og møguligir samtaksroknskapir, sum eru fevndir av teimum í stk. 2 nevndu ársfrásøgnum ella byrjanarjavnanum sambært hesum stykki, skulu verða grannskoðaðir, um fyritøkan er undir grannskoðanarskyldu sambært § 156, stk. 1, 1. pkt. Er fyritøkan frítikin frá grannskoðanarskylduni, eru § 10, stk. 6, § 13 og § 158, stk. 1, 2. pkt., samsvarandi galdandi.
Stk. 4. Verður farið út um innlatingarfreistina í 1. pkt. eru §§ 177-179 samsvarandi galdandi, tó so, at avgjaldið verður roknað ein mánað eftir, at trotabúsviðgerðin er endað.

§ 166. Aðrar royndir at endurskipa fyritøkuna enn tær, sum eru nevndar í §§ 164-165 frítaka ikki fyritøkuni frá skylduni at lata ársfrásøgn inn, innan freistin í § 162, stk. 1 er liðin.

Um hvussu útlendskar fyritøkur við einari deild í Føroyum skulu lata ársfrásøgn inn

§ 167. Deildarleiðarin í einari deild, sum er skrásett hjá Skráseting Føroya, og sum er ein deild í einari útlendskari fyritøku, skal lata grannskoðaðu ársfrásøgnina fyri útlendsku fyritøkuna inn, soleiðis at Skráseting Føroya hevur móttikið ársfrásøgnina í seinasta lagi 6 mánaðir eftir, at roknskaparárið er liðið. Víkjast kann ikki frá hesi freist, og roknskapurin fyri deildina kann ikki latast inn í staðin.
Stk. 2. Innlatna ársfrásøgnin skal í minsta lagi framstanda soleiðis, sum hon er gjørd og almannakunngjørd samsvarandi reglunum í tí landi, sum fyritøkan er heimahoyrandi í.
Stk. 3. Ársfrásagnir fyri útlendskar fyritøkur nýtast ikki at vera grannskoðaðar, um fyritøkan er fevnd av lóggávuni í einum ES/EBS-landi og grannskoðan av

ársfrásøgnini ikki er kravd sambært tí lóggávu, sum er galdandi fyri fyritøkuna í viðkomandi ES/EBS-landi.

§ 168. Er útlendska fyritøkan ein dótturfyritøka, kann deildarleiðari í staðin fyri tað í § 167 nevndu ársfrásøgn lata móðurfyritøkunnar egna samtaksroknskap inn til Skráseting Føroya sambært § 170, stk. 5, um:

1) dótturfyritøkan og móðurfyritøkan eru fevndar av lóggávuni her í landinum, í einum ES/EBS-landi, ella í einum landi, sum Føroyar hava gjørt avtalu við,
2) samtaksroknskapurin er gjørdur samsvarandi Evropatingsins og Ráðsins direktivi 2013/34/EU, sbr. skjal 3, við seinni broytingum og tað er grannskoðað og almannakunngjørt eftir nevndu reglum, sbr. tó § 167, stk. 3,
3) tað annars er í samsvari við ta lóggávu, sum er galdandi fyri fyritøkuna,
4) roknskapirnir fyri fyritøkuna og hennara dótturfyritøkur við fulla konsolidering eru partur av, ella við at innrokna og máta til roknskaparliga innara virðið, í móðurfyritøkunnar samtaksroknskapi,
5) allir luttakararnir hava váttað, at teir eru samdir um, at hendan mannagongd verður nýtt fyri viðkomandi roknskaparár,
6) móðurfyritøkan hevur váttað, at hon ábyrgist fyri skyldur dótturfyritøkunnar fram til dótturfyritøkan hevur latið Skráseting Føroya eina ársfrásøgn fyri eitt seinni roknskaparár, og ársfrásøgnin er móttikin og almannakunngjørd eftir reglunum í kapitli 22 og 24 ella at tað er almannakunngjørt, at deildin er fráme ldað ella strikað úr skránni hjá Skráseting Føroya, og
7) at móðurfyritøkan í sínari ársfrásøgn upplýsir, at dótturfyritøkan hevur latið vera við at gera ársfrásøgn vísandi til nýttu undantaksásetingina.

Stk. 2. Er tann útlendska fyritøkan ikki fevnd av tí í stk. 1 nevndu lóggávu, kann deildarleiðarin í staðin fyri ársfrásøgnina fyri ta útlendsku fyritøkuna senda Skráseting Føroya móðurfyritøkunnar samtaksroknskap sambært § 170, stk. 6, um:

1) samtaksroknskapurin er gjørdur samsvarandi tí í stk. 1, nr. 2, umrødda direktivi, ella eftir reglum, sum í minsta lagi kunnu javnmetast við ásetingarnar í nevnda direktivi, og sum er grannskoðað av persónum, sum eru góðkendir sambært lóggávuni í tí landi, sum móðurfyritøkan er heimahoyrandi í, og
2) treytirnar í stk. 1, nr. 3-7, eru loknar.

Um at lata undantaksváttan og onnur skjøl o.a. inn fyri fyritøkur sambært §§ 4-6, § 81, § 133 og § 168

§ 169. Fyritøkur, sum nýta undantakið í § 4 skulu lata Skráseting Føroya eina undantaksváttan har leiðslan:

1) upplýsir at viðkomandi untantak verður nýtt, og
2) stendur inni fyri, at treytirnar fyri at nýta undantakið eru loknar.

Stk. 2. Untantaksváttan skal sendast Skráseting Føroya fyri hvørt roknskaparár. Váttanin skal verða móttikin innan freistin í § 162, stk. 1, 2. pkt. er liðin. Verður farið út um hesa freist, eru §§ 177-179 samsvarandi galdandi.

§ 170. Fyritøkur, sum nýta undantakið í § 5, stk. 1, skulu lata Skráseting Føroya undantaksváttanina sambært § 169 saman við:

1) samtaksroknskapinum sambært § 5, stk. 1,
2) einari ávísing til samtaksroknskapin, sum er innihald í einari ársfrásøgn, sum Skráseting Føroya hevur móttikið til almannnakunngering, ella
3) formligt vátta skjalprógvi fyri, at váttaður samtaksroknskapur er almannakunngjørdur samsvarandi tí lóggávu, sum er galdandi fyri útlendsku fyritøkuna.

Stk. 2. Fyritøkur, sum nýta undantakið í § 5, stk. 2 skulu lata Skráseting Føroya untantaksváttanina sambært § 169 saman við:
1) ársfrásøgnini sambært § 5, stk. 2, ella
2) einari ávísing til ta ársfrásøgn, sum fyritøkunnar roknskapur er partur av, og sum Skráseting Føroya hevur móttikið til almannakunngering.

Stk. 3. Fyritøkur, sum nýta undantakið í § 5, stk. 3, skulu lata Skráseting Føroya undantaksváttanina sambært § 169 saman við:
1) ársfrásøgnini sambært § 5, stk. 3, ella
2) formligt váttaðum skjalprógvi fyri, at samtaksroknskapurin er almannakunngjørdur samsvarandi tí lóggávu, sum er galdandi fyri útlendsku fyritøkuna.

Stk. 4. Fyritøkur, sum nýta undantakið í § 6, stk. 1, skulu lata Skráseting Føroya undantaksváttanina sambært § 169 saman við:
1) samtaksroknskapinum sambært § 6, stk. 1, ella
2) einari ávísing til samtaksroknskapin, sum er innihald í einari ársfrásøgn, sum Skráseting Føroya hevur móttikið til almannakunngering.

Stk. 5. Harumframt skulu tær váttanir, sum eru nevndar í § 6, stk. 1, nr. 4 og 5 latast Skráseting Føroya. Síðstnevnda váttan skal tó einans latast fyri fyrsta roknskaparár, sum undantakið er tikið í nýtslu.

Stk. 6. Verður undantakið í § 168 nýtt, skal deildarleiðarin lata Skráseting Føroya undantaksváttanina sambært § 169 saman við:
1) samtaksroknskapinum sambært § 168, stk. 1 ella 2, og
2) teimum váttanum, sum eru nevndar í § 168, stk. 1, nr. 5 og 6, tó so, at síðstnevnda váttan einans skal latast fyri fyrsta roknskaparár, sum undantakið er tikið í nýtslu.

§ 171. Dótturfyritøkur, sum nýta undantakið í § 81, stk. 1, skulu lata Skráseting Føroya ársfrásøgnina sambært § 162, saman við:
1) samtaksroknskapinum sambært § 81, stk. 1, ella
2) eini ávísing til samtaksroknskapin, sum er innihald í einari ársfrásøgn, sum Skráseting Føroya hevur móttikið til almannnakunngering.

Stk. 2. Tær váttanir, sum eru nevndar í § 81, stk. 1, nr. 4 og 5, skulu latast Skráseting Føroya.

Stk. 3. Váttanir sambært stk. 2 skulu latast fyri tað fyrsta roknskaparárið, sum váttaninar verða givnar fyri.

§ 172. Fyritøkur, sum lata Skráseting Føroya samtaksroknskapin fyri hægru móðurfyritøkuna í samtakinum sambært § 133, skulu lata Skráseting Føroya tær ískoytisupplýsingar, sum Skráseting Føroya mátti kravt við atliti til almannakunngering, tó so, at Skráseting Føroya ikki kann krevja fleiri upplýsingar enn tær, sum skuldu verið innihildnar í einum samtaksroknskapi eftir hesi løgtingslóg, tó burtursæð frá upplýsingum eftir § 197.

Um at lata hálvársfrásøgn fyri landspartafeløg

§ 173. Landspartafeløg skulu lata hálvársfrásøgn sína inn til Skráseting Føroya soleiðis, at hálvársfrásøgnin er móttikin í seinasta lagi 3 mánaðir eftir, at viðkomandi 6-mánaðar tíðarskeið er liðið, sbr. tó § 303 í vinnufelagalógini.

Stk. 2. Um hálvársfrásøgnin ikki verður latin inn rættstundis, kann Skráseting Føroya áleggja tvingilsbøtur sambært § 199, stk. 1, nr. 1.

Um ársfrásagnir fyri ein part av árinum fyri fyritøkur, sum hava virðisbrøv, sum eru upptikin til handils á einum regulerað marknaði í Føroyum ella í einum ES/EBS-landi

§ 174. Landsstýrisfólkið kann áseta reglur um at lata inn til, og um almannakunngering av hálvársfrásagnum fyri fyritøkur, sum hava virðisbrøv, sum

eru upptikin til handils á einum reguleraðum marknaði í Føroyum ella í einum ES/EBS-landi, hjá Skráseting Føroya. Sama er galdandi fyri ársfrásagnir fyri ein part av árinum, sum verða gjørdar sjálvboðið fyri eitt tíðarskeið, sum er styttri enn 6 mánaðir sambært § 155, stk. 1. Landsstýrisfólkið kann heruppií áseta, at limunum í leiðsluni kunnu verða álagdar tvingsilsbøtur, um ársfrásøgnin fyri ein part av árinum eftir 1. ella 2. pkt. ikki verður latin Skráseting Føroya rættstundis.

Um fyritøkunnar egnu almannakunngering av ársfrásøgnini

§ 175. Almannakunnger fyritøkan sjálv ársfrásøgnina í sínari heild, skal ársfrásøgnin hava sama snið og verða sett upp á sama hátt sum grannskoðaða ársfrásøgnin, tað veri seg uttan mun til, um grannskoðan er lógarkravd ella er sjálvboðin.
Stk. 2. Almannakunnger fyritøkan eina ársfrásøgn, sum ikki er fullfíggjað, skal tað tilskilast greidliga, at ársfrásøgnin er stytt, og at ein fullfíggjað ársfrásøgn er tøk hjá Skráseting Føroya, ella um ársfrásøgnin ikki er tøk hjá Skráseting Føroya, at ársfrásøgnin ikki er latin inn til Skráseting Føroya. Grannskoðaraátekningin nýtist ikki at vera tikin við í styttu almannakunngeringini, men tað skal tilskilast í almannakunngeringini um so er, at ein góðkendur grannskoðari hevur tikið fyrivarni ella hevur gjørt ískoytisviðmerkingar í grannskoðaraátekningini.

§ 176. Um lóggávan loyvir, at upplýsingar, sum skulu latast í ársfrásøgnini alternativt kunnu vera í øðrum skjølum o.a. enn ársfrásøgnini, skulu hesi skjøl o.a. vera tøk fyri roknskaparbrúkararnar samstundis sum ársfrásøgnin.

Um ársfrásøgnin ella undantaksváttanin ikki er móttikin, ella er móttikin ov seint

§ 177. Hevur Skráseting Føroya ikki móttikið ársfrásøgnina, ella undantaksváttanina tá ið freistin í § 162, stk. 1, 2. pkt., er liðin, sendir Skráseting Føroya boð til fyritøkunnar evstu leiðslu við áheitan um at lata ársfrásøgnina ella undantaksváttanina inn til Skráseting Føroya. Tað sama er galdandi fyri boð við áheitan, sum verða send deildarleiðarum, um ársfrásøgnin fyri eina útlendska fyritøku, sum er skrásett sum ein deild her í landinum, ikki er móttikin, tá ið freistin í § 167, stk. 1, er liðin.
Stk. 2. Í boðunum verður ásett ein freist at lata ársfrásøgnina ella undantaksváttanina inn til Skráseting Føroya, sum ikki kann vera styttri enn 8 gerandisdagar frá dagfestingini av boðunum. Móttekur Skráseting Føroya ársfrásøgnina ella undantaksváttanina innan hesa freist, ger Skráseting Føroya ikki meira í sambandi við seinkingina.
Stk. 3. Í boðunum verður harumframt ásett ein freist upp á 4 vikur frá dagfestingini av boðunum. Eftir hetta kann Skráseting Føroya, um ársfrásøgnin ella undantaksváttanin ikki er móttikin innan hendan freist er liðin, taka avgerð um at heita á skiftirættin um at upploysa fyritøkuna samsvarandi teimum reglum, sum eru galdandi fyri fyritøkuna. Viðvíkja boðini einari deild hjá einari útlendskari fyritøku, kann Skráseting Føroya, um ársfrásøgnin ikki er móttikin innan umrødda freistin í 1. pkt. er liðin, taka avgerð um at strika deildina úr skránni samsvarandi tí lóggávu, sum er galdandi fyri deildina. Um ársfrásøgnin ella undantaksváttanin fyri eitt íognarfelag ella kommanditfelag sambært § 3, stk. 1, nr. 2, ikki er móttikin innan freistin í 1. pkt. er liðin, kann Skráseting Føroya taka avgerð um at strika íognarfelagið ella kommanditfelagið úr skránni yvir virkin feløg eftir reglunum í vinnufyritøkulógini.

§ 178. Verður ársfrásøgnin ella undantaksváttanin móttikin eftir, at freistin upp á í minsta lagi 8 gerandisdagar frá dagfestingini av boðunum við áheitanini

sambært § 177, stk. 2, er liðin, kann Skráseting Føroya áleggja ávikavist hvørjum limi í fyritøkunnar evstu leiðslu og hvørjum deildarleiðara tvingsilsavgjald.
Stk. 2. Avgjaldið verður roknað frá tí, at freistin í § 162, stk. 1, 2. pkt. er liðin.
Stk. 3. Avgjaldið er 500 kr. fyri ávikavist hvønn leiðslulim og deildarleiðara fyri 1. byrjaða mánað, tilsamans 2.000 kr. fyri 2. byrjaða mánað, og tilsamans 3.000 kr. fyri 3. byrjaða mánað. Avgjaldið kann í mesta lagi vera 3.000 kr. pr. leiðslulim ávikavist deildarleiðara.
Stk. 4. Samlaða avgjaldið verður lækkað í tann mun ávikavist viðkomandi leiðslulimur og deildarleiðari í sama tíðarskeiði hevur rindað tvingsilsbøtur sambært § 199, stk. 1, nr. 1, fyri ikki at hava latið ársfrásøgn ella undantaksváttan inn til Skráseting Føroya.
Stk. 5. Avgjaldið sambært stk. 1, sum kann innheintast við panting, fer í landskassan.

§ 179. Í heilt serligum førum kann Skráseting Føroya heilt ella lutvíst frítaka ein leiðslulim ella ein deildarleiðara frá at rinda avgjaldið sambært § 178, um viðkomandi kann veita prógv fyri at hava roynt at latið ársfrásøgnina, o.a. inn , og at seinkingin tískil ikki kann ábyrgjast viðkomandi persóni.
Stk. 2. Tað frítekur ikki í sjálvum sær ein leiðslulim frá ábyrgd, at tey viðurskiftir, sum elva til ábyrgdina, standast av gerðum ella óvirkni hjá fyritøkunnar starvsfólkum, ráðgevum ella øðrum.

Um hvussu freistir verða roknaðar

§ 180. Tá tað í hesi løgtingslóg ella í reglum, sum eru ásettar við heimild í hesi løgtingslóg er ásett, at ein gerð skal verða framd í seinasta lagi eitt ávíst tal av døgnum, vikum, mánaðum ella árum eftir, at ein nærri ásett hending hevur verið, verður freistin at fremja gerðina roknað frá degnum eftir, at henda hending hevur verið sambært stk. 2-4.

Stk. 2. Er freistin sambært stk. 1 ásett í vikum, er freistin at fremja gerðina farin vikudagin eftir tann dag, tá hendingin var.
Stk. 3. Er freistin sambært stk. 1 ásett í mánaðum, er freistin at fremja gerðina farin mánaðardagin eftir tann dag, tá ásetta hendingin var. Um ásetta hendingin var seinasta dagin í mánaðinum, ella um freistin gongur út ein mánaðardag, sum ikki er til, er freistin altíð seinasta dagin í mánaðinum, líkamikið hvussu langur mánaðurin er.
Stk. 4. Er freistin sambært stk. 1 ásett í árum, er freistin at fremja gerðina farin ársdagin eftir tann dag, tá ásetta hendingin var.
Stk. 5. Um freistin gongur út í einum vikuskifti, á einum halgidegi, grundlógardag, jólaaftansdag ella nýggjársaftan skal gerðin fremjast í seinasta lagi fyrsta gerandisdag eftir hetta.

Kapittul 22
Talgilt samskifti

§ 181. Landsstýrisfólkið kann áseta reglur um, at skrivligt samskifti til og frá Skráseting Føroya um viðurskifti, sum eru fevnd av hesi løgtingslóg ella av reglum, ásettar við heimild hesi løgtingslóg, skal fara fram talgilt.
Stk. 2. Landsstýrisfólkið kann áseta neyvari reglur um talgilt samskifti, m.a. um at nýta ávísar kt-skipanir, serstøk talgild snið og talgilda undirskrift, o.a.
Stk. 3. Eini talgild boð verða mett at vera komin fram, tá ið tann, ið er móttakari, kann koma at boðunum.

§ 182. Landsstýrisfólkið kann áseta reglur um, at Skráseting Føroya kann boða frá avgerðum og geva út onnur skjøl eftir hesi løgtingslóg ella eftir reglum, við heimild í hesi løgtingslóg uttan undirskrift, undirskrift endurgivnari við maskinu ella á samsvarandi hátt, ella við at nýta tøkni, sum tryggjar eintýdda eyðmerking av tí, sum hevur boðað frá avgerðini ella hevur givið skjalið út. Slíkar avgerðir og skjøl

eru javnsett við avgerðir og skjøl við persónligari undirskrift.
Stk. 2. Landsstýrisfólkið kann seta reglur um, at avgerðir, ið einans eru tiknar við støði í elektroniskari dátuviðgerð, og onnur skjøl, kunnu gevast út soleiðis, at einans Skráseting Føroya er tilskilað sum sendari.

§ 183. Har tað eftir hesi løgtingslóg ella reglum, við heimild í hesi løgtingslóg, er kravt, at eitt skjal, sum onnur enn Skráseting Føroya hava givið út, skal vera undirskrivað, kann hetta krav lúkast við at nýta tøkni, sum tryggjar eintýdda eyðmerking av tí, sum hevur givið skjalið út, sbr. tó stk. 2. Slík skjøl eru javnsett við skjøl við persónligari undirskrift.
Stk. 2. Landsstýrisfólkið kann áseta neyvari reglur um at víkja frá krøvum um undirskrift. Landsstýrisfólkið kann eisini áseta, at ikki kann verða vikið frá krøvum um persónliga undirskrift fyri ávís sløg av skjølum.

Kapittul 23
Almannakunngering

Nærri reglur um at lata inn, almannakunngering og víðkað almannakunngering fyri landspartafeløg o.a.

Almannakunngering

§ 184. Skráseting Føroya kunnger beinanvegin móttøku av ársfrásagnum, undantaksváttanum o.a., sum verður latið Skráseting Føroya í staðin, endaligar likvidatiónsroknskapir, umframt hálvársfrásagnir fyri landspartafeløg, sbr. tó § 303 í vinnufelagalógini. Staðfestir Skráseting Føroya í sambandi við eftirlit sambært §§ 190-193, at ein ársfrásøgn, o.a. inniheldur so álvarsamar skeivleikar ella manglar, at skjalið er grovt misvísandi, kann Skráseting Føroya taka skjalið aftur frá almannakunngering. Ein ársfrásøgn o.a., sum ikki er góðkend og grannskoðað, kann samsvarandi takast aftur frá almannakunngering.
Stk. 2. Skjølini eru alment atkomulig, sbr. tó § 186.

Nærri reglur um at lata inn og almannakunngera o.a.

§ 185. Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um at lata inn ársfrásagnir, undantaksváttanir o.a., sum verður latið Skráseting Føroya í staðin, endaligar likvidatiónsroknskapir sambært § 163, stk. 2, umframt partársfrásagnir fyri landspartafeløg sambært § 173, og fyri fyritøkur, sum hava virðisbrøv upptikin til handils á einum reguleraðum marknaði í Føroyum ella í einum ES/EBS-landi sambært § 174.

§ 186. Landsstýrisfólkið kann áseta reglur um almannakunngering av ársfrásagnum, undantaksváttanum o.a., sum verður latið Skráseting Føroya í staðin fyri endaligar likvidatiónsroknskapir umframt partársfrásagnir fyri landspartafeløg, og fyri fyritøkur, sum hava virðisbrøv upptikin til handils á einum reguleraðum marknaði í Føroyum ella í einum ES/EBS-landi.
Stk. 2. Landsstýrisfólkið kann áseta reglur um atgongdina hjá roknskaparbrúkarum til skjøl, sum skrásetingin hevur almannakunngjørt.
Stk. 3. Landsstýrisfólkið kann áseta reglur um umgerð av ársfrásagnum og avleiðingarnar av hesum.

§ 187. Landsstýrisfólkið kann áseta reglur um gjald fyri avrit av skjølum o.a., sum eru alment atkomulig sambært hesi løgtingslóg, fyri nýtslu av kt-skipan Skráseting Føroya, fyri ávísar veitingar sum ikki eru serligt prísásettar, umframt fyri rykkjaraskriv o.a., í sambandi við, at goldið er ov seint.
Stk. 2. Landsstýrisfólkið kann áseta reglur um ársgjald til Skráseting Føroya fyri umsiting og kanningarvirksemi sambært hesi løgtingslóg, fyri umsitingina av

vinnufelagaligu reglunum um kapitalfrágongd og lán til fyritøkuluttakarar og onnur lógarbrot í sambandi við kanning av ársfrásagnum umframt fyri umsitingina í sambandi við, at roknskaparstandardar verða gjørdir og at altjóða standardar verða góðkendir sambært § 159.
Stk. 3. Landsstýrisfólkið kann áseta reglur um, at fyritøkur, sum hava virðisbrøv upptikin til handils á einum reguleraðum marknaði í Føroyum ella í einum ES/EBS-landi, skulu gjalda ársgjald til Skráseting Føroya fyri eftirlitsvirksemi sambært § 191. Heruppií kann landsstýrisfólkið áseta reglur um støddina av gjaldinum, um uppkrevjing og um at gjalda rykkjaragjald í sambandi við, at goldið verður ov seint.

§ 188. Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um, at ávís skjøl kunnu undantakast frá kravinum í § 162, stk. 3, um, at skjøl skulu vera á føroyskum ella á donskum. Skráseting Føroya kann seta sum treyt, at fyritøkan skal lata inn váttaða týðing av skjølunum til føroyskt ella danskt seinni, um Skráseting Føroya metir hetta vera neyðugt.
Stk. 2. Landsstýrisfólkið kann áseta reglur um, á hvørjum máli fyritøkur, sum hava virðisbrøv upptikin til handils á einum reguleraðum marknaði í Føroyum ella í einum ES/EBS-landi skulu lata ársfrásagnir, partársfrásagnir umframt onnur skjøl, sum eru fevnd av hesi løgtingslóg, inn til Skráseting Føroya.
Stk. 3. Rættarmál viðvíkjandi innihaldinum í einari ársfrásøgn ella øðrum skjølum, sum skulu latast inn til Skráseting Føroya sambært hesi løgtingslóg, skulu leggjast fyri Føroya Rætt, og avgerð um at halda útreiðslur í sambandi við, at ársfrásøgnin ella onnur skjøl verða týdd sum liður í rættarmálinum, verður tikin samsvarandi føroyskari lóggávu.

Víðkað almannakunngering fyri landspartafeløg

§ 189. Landspartafeløg skulu, í seinasta lagi 14 dagar innan aðalfundurin verður hildin útflýggja avrit av felagsins ársfrásøgn til tey umboð fyri fjølmiðlarnar, sum biðja um hetta. Harumframt skulu landspartafeløg innan freistina í 1. pkt. útflýggja avrit av ársfrásøgnini til ein og hvønn, sum biður um hetta, á felagsins høvuðsskrivstovu, sbr. tó § 303 í vinnufelagalógin.

Kapittul 24
Eftirlit við ársfrásagnum o.a.

Almennar ásetingar um roknskapareftirlit Skráseting Føroya

§ 190. Skráseting Føroya hevur eftirlit við ársfrásagnum og møguligum váttanum frá góðkendum grannskoðara, sum hoyra til ársfrásøgnina, undantaksváttanir o.a., sum verða latnar Skráseting Føroya í staðin fyri ársfrásagnir, upplýsingar um nettosøluna sambært reglum, givnum við heimild í § 162, stk. 6, hálvársfrásagnir frá landspartafeløgum umframt partársfrásagnir frá fyritøkum, sum hava virðisbrøv upptikin til handils á einum reguleraðum marknaði í Føroyum ella í einum ES/EBS-landi, sum verða móttiknar við atliti til almannakunngering. Finanstilsynet hevur eftirlit við, at fyritøkur, sum hava virðisbrøv upptikin til handils á einum reguleraðum marknaði í Føroyum ella í Danmark, lúka standardar og reglur um upplýsingar í ársfrásagnum og partársfrásagnum sambært § 192.
Stk. 2. Eftirlitið kann verða framt í sambandi við, at viðkomandi skjøl eru latin Skráseting Føroya ella Finanstilsynet sambært § 192, og sum eftirfylgjandi váðagrundað eftirlit sambært § 193.
Stk. 3. Eftirlitið sambært § 193 kann harumframt verða framt sum tilvildarligt stakroyndaeftirlit.
Stk. 4. Eftirlit Skráseting Føroya sambært hesi løgtingslóg kann verða framt í sambandi við at eftirlit ella kanningar verða framd sambært aðrari lóggávu, sum er løgd til Skráseting Føroya at umsita.

Eftirlitið kann harumframt leggjast til rættis í samstarvi við aðrar myndugleikar, sum fremja eftirlit sambært lóggávuni fyri viðkomandi øki.

Eftirlit við ársfrásagnum og partársfrásagnum hjá børsskrásettum fyritøkum

§ 191. Finanstilsynet hevur eftirlit við, at fyritøkur, hvørs virðisbrøv eru upptikin til handils á einum reguleraðum marknaði í Føroyum, halda teir í stk. 2 og 3 nevndu standardar og reglur um at fráboða fíggjarligar upplýsingar í ársfrásøgnum og partársfrásøgnum. Í hesum sambandi virkar Skráseting Føroya sum skrivstovuhald hjá Finanstilsynet, og Finanstilsynet kann heimila Skráseting Føroya at virka sína vegna sambært § 83, stk. 3 í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om værdipapirhandel m.v.
Stk. 2. Finanstilsynet hevur eftirlit við, at ársfrásagnir og partársfrásagnir, sum fyritøkur í roknskaparflokki D, hvørs virðisbrøv eru upptikin til handils á einum reguleraðum marknaði í Føroyum hava gjørt, halda reglurnar viðvíkjandi fíggjarligari upplýsing í teimum altjóða roknskaparstandardunum sambært Evropatingsins og Ráðsins fyriskipan nr. 1606/2002 um at nýta altjóða roknskaparstandardar, við seinni broytingum, sbr. skjal 4, og § 160 ella reglur, sum eru ásettar við heimild í hesi løgtingslóg.
Stk. 3. Ársfrásagnir og partársfrásagnir, sum fyritøkur í roknskaparflokki A, hvørs virðisbrøv eru upptikin til handils á einum reguleraðum marknaði í Føroyum hava gjørt, og sum ikki einans verða nýttar til fyritøkunnar egnu nýtslu sambært § 3, stk. 2, eru eisini undir eftirliti hjá Finanstilsynet.
Stk. 4. Finanstilsynet hevur ikki eftirlit við, at freistir at lata Skráseting Føroya skjøl, við atliti til almannakunngering o.a. verða hildnar.
Stk. 5. Í sambandi við eftirlit sambært stk. 2 og 3 útinnur Finanstilsynet tær heimildir, sum liggja hjá Skráseting Føroya sambært §§ 192 og 193, § 199, stk. 1, nr. 2 og 3, og stk. 2, sambært § 83, stk. 2 í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om værdipapirhandel m.v. Harumframt útinnur Finanstilsynet heimildirnar sambært § 83, stk. 5, i anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om værdipapirhandel m.v.
Stk. 6. Um ein fyritøka, hvørs virðisbrøv eru upptikin til handils á einum reguleraðum marknaði í Føroyum, ikki heldur skyldur sínar sambært hesi løgtingslóg, kann Finanstilsynet geva viðkomandi fyritøku kravboð um at broyta viðurskiftini, heruppií áleggja fyritøkuni at almannakunngera broyttar upplýsingar ella ískoytisupplýsingar. Verður tað mett skynsamt, kann Finanstilsynet sjálvt almannakungera viðkomandi upplýsingar, almannakunngera kravboðini ella taka úr gildi ella strika viðkomandi virðisbrøv frá skrásetingini á keypsskálanum ella frá upptøkuni til handils á einum reguleraðum marknaði. Letur fyritøkan vera við at lúka kravboð eftir 1. pkt. kann Finanstilsynet sum tvingsilsráð áleggja limunum í leiðsuni dagligar ella vikuligar bøtur.

Móttøkueftirlit

§ 192. Skráseting Føroya fremur sjálvvirkandi eftirlit í sambandi við, at ársfrásagnir og onnur skjøl fyri fyritøkur, sum verða latin Skráseting Føroya, lúka krøvini, sum eru ásett í hesi løgtingslóg og reglur, sum eru ásettar við heimild í hesi løgtingslóg. Skráseting Føroya kann avvísa ársfrásagnir o.a. vegna villur ella manglar við talgildari bráðfeingisavgerð.
Stk. 2. Ársfrásagnir o.a., sum eru ávvístar sambært stk. 1, verða ikki almannakunngjørdar.

Eftirfylgjandi eftirlit Skráseting Føroya

§ 193. Skráseting Føroya hevur eftirlit við móttiknum ársfrásagnum og øðrum skjølum, sum skulu latast Skráseting Føroya sambært hesi løgtingslóg, við atliti

til at tryggja, at fylgjandi lóggáva verður hildin:
1) Henda løgtingslóg.
2) Bókhaldslógin.
3) Vinnufelagalógin.
4) Hvítvasklógin.
5) Grannskoðaralógin.
6) Vinnufyritøkulógin.
7) Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om erhvervsdrivende fonde.

Stk. 2. Skráseting Føroya hevur harumframt eftirlit við ársfrásagnum, sum eru gjørdar samsvarandi altjóða roknskaparstandardunum sambært § 160.

§ 194. Skráseting Føroya kann í serligum førum nýta uttanhýsis hjálp í sambandi við eftirlit við ársfrásagnum o.a. hjá fyritøkum eftir hesi løgtingslóg.

§ 195. Skráseting Føroya kann krevja, at ein fyritøka innan fyri eina nærri ásetta freist, skal fáa til vegar eina váttan frá einum góðkendum grannskoðara, einum advokati, ella frá øðrum sakkønum um, at upplýsingar ella frágreiðingar, sum fyritøkan hevur givið, ella sum eru latnar Skráseting Føroya eftir hesi løgtingslóg ella reglum, sum eru ásettar við heimild í hesi løgtingslóg, eru rættar.

Stk. 2. Tann, sum gevur váttan sambært stk. 1, skal í skjalinum vátta, at viðkomandi er óheftur fyritøkuni.

§ 196. Skráseting Føroya kann, tá ið tað verður mett skynsamt, almannakunngera, at eitt eftirlit sambært § 193 verður sett í verk ella er sett í verk. Skráseting Føroya kann harumframt almannakunngera úrslitið frá eftirlitinum.

Stk. 2. Almannakunngering sambært stk. 1 fer fram á heimasíðu Skráseting Føroya.

Stk. 3. Avgerð Skráseting Føroya um at lata eitt mál til kanningar hjá løgregluni, kann almannakunngerast á heimasíðu Skráseting Føroya. Navnið á fyritøkuni kann verða almannakunngjørt í hesum sambandi.

Stk. 4. Almannakunngering sambært stk. 1-3 kann tó ikki fara fram, um almannakunngering má metast at vera ein hóttan ímóti einari revsirættarligari kanning, sum er í gongd, ella um almannakunngering annars kann elva til ósamsvarandi stóran skaða.

Áheitan um upplýsingar

§ 197. Skráseting Føroya kann frá fyritøkuni, hennara núverandi leiðslu ella góðkenda grannskoðara krevja tær upplýsingar, sum eru neyðugar til tess at taka støðu til, um brot eru framd á ta í § 193, stk. 1, nevndu lóggávu og fyritøkunnar viðtøkur, ella um lógarbrotið er hildið uppat. Harumframt kann Skráseting Føroya frá fyritøkuni, hennara núverandi leiðslu ella góðkenda grannskoðara krevja tær upplýsingar, sum eru neyðugar til tess at taka støðu til, um ein ársfrásøgn, sum er gjørd eftir teimum altjóða roknskaparstandardunum, er gjørd samsvarandi standardunum sambært § 160.

Avleiðingar í sambandi við lógarbrot

§ 198. Skráseting Føroya kann í sambandi við eftirlit eftir hesi løgtingslóg ella reglum ásettar við heimild í hesi løgtingslóg:
1) átala lógarbrot,
2) krevja, at villur og manglar verða fingin í rættlag, og
3) krevja, at eitt lógarbrot verður steðgað.

Stk. 2. Skráseting Føroya kann áseta eina freist at rætta inn eftir boðunum sambært stk. 1, nr. 2 ella 3.

Partur XI
Tvingsilsbøtur, kæra, revsing og gildiskoma

Kapittul 25
Tvingilsbøtur

§ 199. Skráseting Føroya kann sum tvingilsmiðil áleggja limunum í

fyritøkunnar leiðslu dagligar ella vikuligar bøtur, um tey ikki:
1) rættstundis lata Skráseting Føroya tey skjøl í tí standi, sum er kravdur sambært §§ 162-173, ella í reglum, sum eru ásettar við heimild í hesi løgtinglóg,
2) taka eina áheitan um at útflýggja upplýsingar sambært § 197 til eftirtektar, ella
3) fylgja boðum, sum Skráseting Føroya hevur givið sambært § 198, stk. 1, nr. 2 og 3.

Stk. 2. Skráseting Føroya kann somuleiðis áleggja fyritøkunnar góðkenda grannskoðara tvingilsbøtur, um hann ella hon ikki útflýggjar upplýsingar sambært § 197.

Stk. 3. Tvingsilsbøtur sambært stk. 1, sum kunnu innheintast við panting, fara í landskassan.

Kapittul 26
Tvingsilsavtøka og striking

§ 200. Skráseting Føroya kann heita á skiftirættin um at avtaka eina fyritøku samsvarandi tí lóggávu, sum er galdandi fyri fyritøkuna, um hon ikki:
1) letur Skráseting Føroya eina váttan sambært § 195,
2) sendur Skráseting Føroya upplýsingar sambært § 197, ella
3) fylgir boðum, sum Skráseting Føroya hevur tikið sambært § 198, stk. 1, nr. 2 ella 3.

Stk. 2. Skráseting Føroya kann strika eina deild hjá einari útlendskari fyritøku úr skránni, um deildin ikki letur Skráseting Føroya eina váttan ella upplýsingar, ella ikki fylgir boðum sambært stk. 1, nr. 1-3. Viðvíkja viðurskiftini einum íognarfelagi ella einum kommanditfelagi, kann Skráseting Føroya strika skrásetingina av íognarfelagnum ella kommanditfelagnum úr skránni.

Stk. 3. Skráseting Føroya kann áseta eina freist, har fyritøkan ella deildin hjá útlendsku fyritøkuni innan hesa freist skal lúka eitt ella fleiri krøv sambært §§ 195 og 197 ella § 198, stk.1, nr. 2 og 3. Verða krøvini ikki eftirlíkað innan henda freist er liðin, kann Skráseting Føroya taka avgerð sambært stk. 1 ella 2.

Kapittul 27
Kæra

§ 201. Avgerðir, tiknar av Skráseting Føroya sambært løgtingslógini, reglum ásettum við heimild í løgtingslógini, roknskaparstandardum sambært §§ 159 og 160 ella Evropatingsins og Ráðsins fyriskipan nr. 1606/2002 um at nýta altjóða roknskaparstandardar, við seinni broytingum, sbr. skjal 4, kunnu kærast til Føroya Kærustovn í seinasta lagi 4 vikur eftir, at avgerðin er fráboðað viðkomandi, sbr. tó stk. 2 og 3.

Stk. 2. Avgerðir, sum Skráseting Føroya tekur sambært § 177, stk. 3, § 178, § 197 og § 200, stk. 1 og 2, umframt sýtan í sambandi við umsókn um at leingja freistir, kunnu ikki kærast til hægri fyrisitingarligan myndugleika.

Stk. 3. Avgerðir, sum Skráseting Føroya tekur sambært reglum, ásettar við heimild í § 181, kunnu ikki kærast til hægri fyrisitingarligan myndugleika.

Stk. 4. Avgerðir, tiknar av Finanstilsynet eftir hesi løgtingslóg, kunnu, burtursæð frá avgerðum sambært § 197, kærast til Erhvervsankenævnet í seinasta lagi 4 vikur eftir, at avgerðin er fráboðað viðkomandi sambært § 88, stk. 1, í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om værdipapirhandel m.v.

Kapittul 28
Revsing

§ 202. Brot á §§ 4-6, 9-19 og 21-155, § 161, stk. 2 og 3, § 189 og artikkul 4 í Evropatingsins og Ráðsins fyriskipan nr. 1606/2002 um at nýta altjóða roknskaparstandardar, við seinni broytingum, sbr. skjal 4, verður, um ikki harðari revsing er ásett í aðrari lóggávu, revsað við sekt. Sama er galdandi um ein fyritøka, sum hevur valt at nýta altjóða

roknskaparstandardarnar sambært § 160, stk. 1, brýtur forskriftir í standardunum, § 160, stk. 3, ella nærri reglur ásettar við heimild í § 160, stk. 4.
Stk. 2. Um ikki harðari revsing er ásett sambært revislógini, verða limir í fyritøkunnar ábyrgdarhavandi leiðslustovni sambært § 9 revsaðir við sekt, um teir hava latið vera við at latið ársroknskapin og ein møguligan samtaksroknskap grannskoða, uttan at treytirnar fyri hesum í § 157, stk. 2, eru loknar, ella um teir hava latið ein persón, sum ikki lýkur treytirnar fyri at geva váttanir í § 158, vátta ársroknskapin ella ein møguligan samtaksroknskap. Við somu revsing verður ein persónur revsaður, sum hevur givið váttanir til eina ársfrásøgn uttan at lúka treytirnar fyri hesum í § 158.
Stk. 3. Feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar kunnu revsast sambært reglunum í kapitli 5 í revsilógini.
Stk. 4. Í reglum, givnar við heimild í løgtingslógini, kann verða ásett, at brot á reglurnar ella treytir, givnar sambært reglunum, verður revsað við sekt.
Stk. 5. Landsstýrisfólkið kann í kunngerð áseta sektarrevsing fyri brot á forskriftir í roknskaparstandardum, sum eru ásettar sambært § 159, stk. 1.
Stk. 6. Tann, sum ikki ger eftir boðum frá eftirlitsmyndugleikunum sambært hesi løgtingslóg ella reglum, ásettar við heimild í hesari løgtingslóg, ella sum letur rangar ella villleiðandi upplýsingar til eftirlitsmyndugleikarnar, verður revsaður við sekt, um ikki hægri revsing er ásett sambært lóggávuni annars.
Stk. 7. Fyrningarfreistin fyri brot á ásetingarnar í løgtingslógini ella brot á reglur, sum eru ásettar við heimild í løgtingslógini, er 5 ár.

Kapittul 29
Gildiskoma o.a.

§ 203. Hendan løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2026 við virknaði fyri roknskaparár, sum byrja 1. januar 2026 ella seinni.
Stk. 2. Samstundis sum løgtingslógin fær gildi, fer anordning nr. 1355 af 9. december 2007 om ikrafttræden for Færøerne af årsregnskabsloven úr gildi. Tó verða reglur, ásettar við heimild í anordning om ikrafttræden for Færøerne af årsregnskabsloven, verandi í gildi, til reglur, ásettar við heimild í hesi løgtingslóg, koma í staðin, ella verða settar úr gildi.

Skjal 1

Allýsingar

Í hesi løgtingslóg skulu niðanfyrinevndu skiljast sum

A. Alment

1. Virkin marknaður:
   Ein marknaður har transaktiónir við ognum og skyldum fer fram við nóg stuttum millumbili og í nóg stórum vavi til at geva eina leypandi prísáseting.

2. Kapitalpartar:
   Partar í einum partafelagi (partabrøv), í einum smápartafelagi (smápartar), umframt partar í eginognini hjá øðrum fyritøkum.

3. Minnilutaáhugamál:
   Kapitalpartar í konsoliderøðum fyritøkum, sum onnur enn samtaksfyritøkurnar eiga.

4. Peningaligir postar:
   Tøkur peningur umframt ognir og skyldur, heruppií avsettar skyldur, sum verða goldnar í ávísum ella ásetiligum upphæddum.

5. Landspartafeløg:
   Partafeløg, har landið hevur sama samband til felagið, sum móðurfelag til dótturfelag sambært § 303, sbr. §§ 6 og 7 í vinnufelagalógini.

6. Leiðslan í fyritøkuni:
   Limirnir í evsta ábyrgdarhavandi leiðslustovni, sum røkja starv sum ávikavist evsta leiðsla og dagliga leiðsla eftir teimum lógum, viðtøkum, avtalum ella siðvenjum, ið eru galdandi fyri fyritøkuna. Í fyritøkum sum hava ein eftirlitsstovn ella eftirlitsráð, er eftirlitsstovnurin ella eftirlitsráðið fevnt av teimum ásetingum, sum eru galdandi fyri evsta leiðslustovnin. Er ongin serstøk leiðsla í fyritøkuni, eru persónligt ábyrgdarhavandi eigararnir ábyrgdarhavandi leiðsustovnurin.

7. Fyritøkuluttakari:
   Partaeigarar, smápartaeigarar ella onnur, sum eiga kapitalpartar í fyritøkuni.

8. Fyritøkukapitalur:
   Kapitalur, sum fyritøkuluttakararnir hava skotið inn í fyritøkuna. Í parta- og smápartafeløgum er fyritøkukapitalurin (felagskapitalurin) partapeningurin ávikavist smápartapeningurin.

9. Multilateralur handilsfasilitetur:
   Allýsingin av multilateralum handilsfasiliteti í § 5, nr. 20 í vinnufelagalógini.

10. Reguleraður marknaður:
    Allýsingin av einum regulerøðum marknaði í § 5, nr. 25 í vinnufelagalógini.

B. Samtøkur o.a.

1. Samtøka:
   Móðurfyritøkur og allar hennara dótturfyritøkur.

2. Móðurfyritøka:
   Fyritøka, ið hevur avgerandi ávirkan á eina ella fleiri dótturfyritøkur. Ein dótturfyritøka kann bert hava eina beinleiðis móðurfyritøku. Um fleiri fyritøkur lúka treytirnar í nr. 4, er tað bert tann fyritøka, sum veruliga útinnir avgerandi ávirkan á fyritøkunnar fíggjarligu og rakstrarligu avgerðir, sum kann metast at vera móðurfyritøkan.

3. Dótturfyritøka:
   Ein fyritøka, har móðurfyirtøkan hevur avgerandi ávirkan.

4. Avgerandi ávirkan í mun til eina dótturfyritøku:
   Avgerandi ávirkan er heimildin at stýra dótturfyritøkunnar fíggjarligu og rakstrarligu avgerðum. Avgerandi ávirkan í mun til eina dótturfyritøku fyriliggur, tá ið móðurfyritøkan beinleiðis ella óbeinleiðis, umvegis dótturfyritøkuna, eigur meira enn helvtina av atkvøðurættindunum í einari fyritøku, uttan so, at tað í serligum førum greitt kann vísast á, at hesi eigaraviðurskifti ikki eru avgerandi ávirkan.

   Eigur móðurfyritøkan ikki meira enn helvtina av atkvøðurættindunum í einari fyritøku, fyriliggur avgerandi ávirkan um móðurfyritøkan hevur
   1) Ræðisrætt yvir meira enn helvtini av atkvøðurættindunum gjøgnum avtalu við aðrar íleggjarar,
   2) heimild at stýra teimum fíggjarligu og rakstrarligu viðurskiftunum í einari fyritøku sambært viðtøkum ella avtalu,
   3) heimild at tilnevna ella seta frá meirilutan av limunum í evstu leiðsluni, og henda leiðsla hevur avgerandi ávirkanina í fyritøkuni, ella hevur
   4) ræðisrættin yvir veruliga meirilutanum av atkvøðunum á aðalfundinum, ella í felagsstovni, sum má javnmetast við aðalfundin, og tískil hevur ta veruligu avgerandi ávirkanina í fyritøkuni.

   Møgulig atkvøðurættindi og virknaðurin av møguligum atkvøðurættindum, heruppií tekningarrættir og keypsoptiónir til kapitalpartar, sum beinleiðis kunnu nýtast ella leggjast um, skulu takast við í metingina um, hvørt ein fyritøka hevur avgerandi ávirkan.

   Tá atkvøðurættindi verða gjørd upp í einari dótturfyritøku, skal síggjast burtur frá atkvøðurættindum, ið eru knýtt at kapitalpørtum, sum dótturfyritøkan ella dótturfyritøkur hennara eiga.

5. Leyst atknýttar fyritøkur:
   Fyritøkur, sum ikki eru dótturfyritøkur, men í hvørjum ein onnur fyritøka og hennara dótturfyritøkur hava týðandi ávirkan á fyritøkunnar rakstrarligu og fíggjarligu leiðslu. Ein fyritøka má haldast at hava týðandi ávirkan, um fyritøkan og hennara dótturfyritøkur saman eiga 20% ella meira av atkvøðurættindunum.

6. Kapitaláhugamál:
   Rættindi hjá einari fyritøku, ella hjá einari fyritøku og hennara dótturfyritøkum, til eginognina í einari aðrari fyritøku, tá ið endamálið við ræðisrættinum er at fremja fyritøkunnar egna virksemi umvegis varandi tilknýti til hina fyritøkuna. Rættindi yvir

eginognini í einari aðrari fyritøku má haldast at vera kapitaláhugamál, tá ið rættindini fevna um í minsta lagi 20% av eginognini í hini fyritøkuni.

7. Atknýttar fyritøkur:
   Fyritøkunnar dóttufyritøkur, teirra móðurfyritøkur og hennara dótturfyritøkur.

C. Staklutirnir í ársfrásøgnini

1. Ognir:
   Tilfeingi, sum fyritøkan hevur ræðið á sum úrslit av undanfarnum hendingum, og sum kunnu væntast at geva fyritøkuni fíggjarligar fyrimunir í framtíðini.

2. Støðisogn:
   Ognir, sum eru ætlaðar sum støðug ogn ella til nýtslu hjá fyritøkuni.

3. Ogn í umferð:
   Ognir, sum ikki eru støðisogn.

4. Stuttfreistaðar ognir
   Ein ogn skal í skjali 2, skema 2 flokkast sum stuttfreistað, um hon lýkur eina av hesum treytum:
   a) Ognin væntast realiserað, ella verður havd við sølu- ella nýtsluendamáli fyri eyga sum liður í fyritøkunnar vanligu rakstrarringrás.
   b) Ognin fyrst og fremst verður havd við handilsligum endamáli fyri eyga.
   c) Ogning væntast realiserað innan fyri 12 mánaðir eftir fíggjarjavnadagin.
   d) Ognin er tøkur peningur, og ognin ikki er avmarkað við treytum, soleiðis at hon ikki kann umbýtast ella nýtast til at gjalda eina skyldu, í minsta lagi 12 mánaðir eftir fíggjarjavnadagin.

5. Langfreistaðar ognir
   Ognir, sum ikki roknast at vera stuttfreistaðar ognir sambært nr. 4, roknast at vera langfreistaðar ognir.

6. Fíggjarligar ognir:
   Ognir sum eru
   a) tøkur peningur,
   b) rættindi sambært avtalu at móttaka tøkan pening ella aðra fíggjarliga ogn frá triðjamanni,
   c) rættindi sambært avtalu at býta fíggjarligar ognir ella skyldur um við triðjamann sambært treytum, sum kunnu vera góðar, ella
   d) rættindi yvir eginognini í einari aðrari fyritøku.

7. Skyldur:
   Fyritøkunnar verandi skyldur, sum eru ikomnar sum úrslit av undanfarnum hendingum, og har gjalding kann væntast at elva, at fyritøkan fer at lata framtíðar fíggjarligar fyrimunir av hondum.

8. Fíggjarligar skyldur:
   Skyldur sum eru

a) skyldur sambært avtalu at lata tøkupening ella aðrar fíggjarligar ognir til triðjamann, ella
b) skyldur sambært avtalu at býta fíggjarligar ognir ella skyldur við triðjamann sambært treytum, sum kunnu vera ringar.

9. Avsettar skyldur
Skyldur, sum ikki eru vísar við atliti til støddella gjaldkomutíð, og sum viðvíkja roknskaparárinum ella undanfarnum roknskaparárum.

10. Eventualognir:
Viðurskifti, sum eru til fíggjarjavnadagin sum úrslit av undanfarnum hendingum, sum kunnu elva framtíðar fíggjarligar fyrimunir fyri fyritøkuna, men har tað fyrst ber til at staðfesta, at ognirnar eru til eftir eina ella fleiri óvissar framtíðar hendingar, sum fyritøkan ikki hevur ræðið á.

11. Eventualskyldur:
a) Viðurskifti, sum eru til fíggjarjavnadagin sum úrslit av undanfarnum hendingum, sum kunnu elva, at fyritøkan fer at lata framtíðar fíggjarligir fyrimunir av hondum, men har tað fyrst ber til at staðfesta, at skyldurnar eru til eftir eina ella fleiri óvissar framtíðar hendingar, sum fyritøkan ikki hevur ræðið á, ella
b) skyldur, sum eru til fíggjarjavnadagin sum úrslit av undanfarnum hendingum, men har tað ikki er sannlíkt, at uppgerð vil elva, at fyritøkan fer at lata framtíðar fíggjarligar fyrimunir av hondum, ella
c) skyldur, har støddin á uppæddini ikki í neyðugan mun kann mátast álítandi.

12. Inntøkur:
Vøkstur í fíggjarligum fyrimunum í roknskapartíðarskeiðnum, sum eru tilgongd, ella ognir, sum eru farnar upp í virði ella skyldur eru farnar niður í virði, og sum elva, at eginognin veksur. Inntøkur fevna tó ikki um innskot frá eigarunum.

13. Nettosøla:
Søluvirðið av vørum og tænastuveitingum, o.a. frádrigið avsláttur í prísinum, meirvirðisgjald og annan skatt, sum er beinleiðis knýttur at søluupphæddini.

14. Útreiðslur:
Minking í fíggjarligum fyrimunum í roknskapartíðarskeiðinum, sum eru frágongd, ella ognir, sum hava verið fyri virðislækkingum, ella vøkstur í skyldum, og sum elva, at eginognin fellur. Útreiðslur fevna tó ikki um vinningsbýti ella útlutan til eigararnar.

D. Mátistøði o.a.

1. Amortiseraður kostprísur:
Amortiseraður kostprísurin er tað virði, sum ein fíggjarlig ogn ella ein fíggjarlig skylda er mátað til í sambandi við fyrstu innrokning
a) frádádrigið avdráttum,
b) samlaðu avskrivingini av muninum millum ta upprunaligt innroknaðu upphædd og ta upphædd, sum at enda fellur til gjaldingar, lagdari afturat ella drignari frá, og
c) frádrigið niðurskrivingum.

2. Dagsvirðið:
   Dagsvirðið er tann upphædd, sum ein ogn kann umbýtast fyri, ella sum ein skylda kann útlíknast við, við transaktiónum millum sínámillum óheftar partar.

3. Endurútveganarvirðið:
   Fyri eina ogn er endurútveganarvirðið tann prísur, sum skal gjaldast fyri at útvega eina ogn av sama slagi fíggjarjavnadagin.

4. Afturvinningarvirðið:
   Fyri eina ogn er afturvinningarvirðið tað hægsta virðið av kapitalvirðinum og søluvirðinum við mettum útreiðslum drignum frá.

5. Kapitalvirðið:
   Fyri eina ogn er kapitalvirðið afturdiskonteraða virðið (nútíðarvirðið) av teimum framtíðar nettoinngjaldingum, sum ognin fíggjarjavnadagin kann væntast at vinna inn við framhaldandi nýtslu til núverandi endamál. Kapitalvirðið á einari skyldu er afturdiskonteraða virðið (nútíðarvirðið) av framtíðar nettoúrgjaldingum, sum skulu gjaldast, so leingi skyldan stendur við.

6. Kostprísurin:
   Fyri eina ogn er kostprísurin tann upphædd, ið er goldin fyri ognina uttan mun til, um hetta er keypt frá einum parti uttanhýsis ella er framleitt innanhýsis. Kostprísurin á einari skyldu er tann upphædd, sum er móttikin sum samsýning fyri skylduna.

7. Nettorealisatiónsvirðið:
   Fyri eina ogn er nettorealisatiónsvirðið tær samanløgdu nettoinngjaldingarnar, sum ogning fíggjarjavnadagin væntandi fer at vinna inn sum liður í vanligum rakstri. Nettorealisatiónsvirðið á eini skyldu eru tær samanløgdu framtíðar nettoútgjaldingar, ið gjaldast skulu, so leingi skyldan stendur við.

8. Framleiðsluhátturin:
   Framleiðsluhátturin er ein inntøkuháttur, har inntøkur og útreiðslur verða innroknaðar í rakstrarroknskapinum so hvørt arbeiðið verður greitt úr hondum.

   Tá ið framleiðsluhátturin verður nýttur, verður arbeiði í gerð mátað í fíggjarjavnanum til uppgjørda søluvirðið av tí partinum av arbeiðinum, sum er greitt úr hondum. Søluvirðið av einum arbeiði í gerð er tann lutfalsligi parturin av tí í sáttmálanum ásetta prísinum ávikavist metta søluprísinum, sum er vunnin fyri tann partin av samlaða verktøkuarbeiðinum, sum er greitt úr hondum fíggjarjavnadagin.

   Fyri eina ogn er søluvirðið tann prísur, sum ognin kann seljast fyri fíggjarjavnadagin. Søluvirðið á eini skyldu er tann prísur, sum gjaldast skal fyri at sleppa burturúr skylduni fíggjarjavnadagin.

Skjal 2

Fíggjarjavna- og rakstrarroknskaparskema

1. Fíggjarjavnaskema í kontoháttí (roknskaparflokkur B, C og D)

OGN

STØÐISOGN

I. Immateriel støðisogn

1. Lidnar menningarverkætlanir, heruppií einkarættindi og líknandi rættindi, sum stava frá menningarverkætlanum

2. Útvegaðar konsessiónir, einkarættindi, loyvir, vørumerkir og líknandi rættindi

3. Goodwill

4. Menningarverkætlanir í gerð og undangjald fyri immateriella støðisogn

II. Materiel støðisogn

1. Grundøki og bygningar

2. Framleiðslutól og maskinur

3. Onnur støðisogn, rakstrargøgn og innbúgv

4. Materiel støðisogn í gerð og undangjald fyri materiella støðisogn

III. Fíggjarlig støðisogn

1. Kapitalpartar í atknýttum fyritøkum

2. Áogn hjá atknýttum fyritøkum

3. Kapitaláhugamál

4. Áogn hjá kapitaláhugamálum

5. Onnur virðisbrøv og kapitalpartar

6. Onnur áogn

7. Áogn hjá eigarum og leiðslu

OGN Í UMFERÐ

I. Vørugoymslur

1. Rávøra og hjálpitilfar

2. Vørur í gerð

3. Liðug vøra og handilsvøra

4. Undangoldin vøra

II. Áogn

1. Vøru- og tænastuáogn

2. Áogn hjá atknýttum fyritøkum

3. Áogn hjá kapitaláhugamálum

4. Onnur áogn

5. Ikki inngoldin fyritøkukapitalur

6. Áogn hjá fyritøkuluttakarum og leiðslu

7. Tíðaravmarkingar

III. Virðisbrøv og kapitalpartar

1. Kapitalpartar í atknýttum fyritøkum

2. Onnur virðisbrøv og kapitalpartar

IV. Tøkur peningur

SKYLDUR

EGINOGN

I. Fyritøkukapitalur

II. Meirvirði av felagskapitali

III. Tiltaksgrunnur fyri uppskrivingar

IV. Annar tiltakspeningur

1. Tiltakspeningur fyri nettouppskriving eftir innaravirðisháttinum

2. Tiltakspeningur fyri útlán og trygdarveðsetingar

3. Tiltakspeningur fyri ikki inngoldnan fyritøkukapital og yvirkurs

4. Tiltakspeningur fyri menningarútreiðslur

5. Tiltakspeningur fyri íverksetarafeløg

6. Annar lógarkravdur tiltakspeningur

7. Tiltakspeningur sambært viðtøkum

8. Annar tiltakspeningur

V. Fluttur vinngur ella hall

AVSETTAR SKYLDUR

1. Avsetingar til eftirlønir og líknandi skyldur

2. Avsetingar til útsettan skatt

3. Aðrar avsettar skyldur

LANGFREISTAÐ SKULD

1. Skuld, sum er tikin móti at geva út skuldarbrøv

2. Umbýtilig og vinningsbýtisgevandi skuldarbrøv

3. Kredittfeløg

4. Undangjald frá viðskiftafólkum

5. Vøru- og tænastuskuld

6. Veksilskuld

7. Skuld til atknýttar fyritøkur

8. Skuld til kapitaláhugamál

9. Onnur skuld

10. Tíðaravmarkingar

STUTTFREISTAÐ SKULD

1. Skuld, sum er tikin móti at geva út skuldarbrøv

2. Umbýtilig og vinningsbýtisgevandi skuldarbrøv

3. Kredittfeløg

4. Undangjald frá viðskiftafólkum

5. Vøru- og tænastuskuld

6. Veksilskuld

7. Skuld til atknýttar fyritøkur

8. Skuld til kapitaláhugamál

9. Onnur skuld, heruppií skyldugur skattur og sosialar tryggingar, o.a.

10. Tíðaravmarkingar

2. Fíggjarjavnaskema í kontohátti– býtt í lang- og stuttfreistaðar ognir og skyldur (roknskaparflokkur B, C og D)

OGN

LANGFREISTAÐ OGN

I. Immateriel ogn

1. Lidnar menningarverkætlanir, heruppií einkarættindi og líknandi rættindi, sum stava frá menningarverkætlanum

2. Útvegaðar konsessiónir, einkarættindi, loyvir, vørumerkir og líknandi rættindi

3. Goodwill

4. Menningarverkætlanir í gerð og undangjald fyri immateriella støðisogn

II: Materiel ogn

1. Grundøki og bygningar

2. Framleiðslutól og maskinur

3. Onnur støðisogn, rakstrargøgn og innbúgv

4. Materiel støðisogn í gerð og undangjald fyri materiella støðisogn

III. Fíggjarlig ogn

1. Kapitalpartar í atknýttum fyritøkum

2. Áogn hjá atknýttum fyritøkum

3. Kapitaláhugamál

Ársroknskaparlógin inniheldur reglur um innrokning og máting ("virðisáseting") av ognum, skyldum, inntøkum og útreiðslum hjá fyritøkum. Fyri minstu fyritøkurnar í roknskaparflokki A skal innrokning og máting gerast *"...systematisk og konsekvent i overensstemmelse med almindeligt anerkendte retningslinjer under hensyntagen til virksomhedens art og omfang."* Hetta skal gerast við fyriliti fyri aðalregluni um eina rættvísandi mynd, og samsvarandi grundleggjandi fortreytunum í lógini. Reglurnar viðvíkjandi innrokning og máting í ársfrásøgnini fyri fyritøkur í hægru roknskaparflokkunum eru nágreiniligari og meiri umfatandi. Fyri fyritøkur, sum skulu gera ársfrásøgn fyri roknskaparflokk B er til dømis ásett, at ognir skulu innroknast í fíggjarjavnan tá ið "*...det er sandsynligt, at fremtidige økonomiske fordele vil tilflyde virksomheden og aktivets værdi kan måles pålideligt*", meðan skyldur skulu innroknast "*...når det er sandsynligt, at fremtidige økonomiske fordele vil fragå virksomheden og forpligtelsens værdi kan måles pålideligt*", sbr. § 33 í ársroknskaparlógini. Eisini her eru ískoytisreglur fyri hægru roknskaparflokkarnar og samtøkur, sum koma afturat hesum krøvum.

Sambært § 21 í ársroknskaparlógini (§ 24 í uppskotinum) skal fyritøkan, uttan mun til roknskaparflokk, greiða frá teimum innrokningarháttum og teimum mátistøðum, sum eru nýtt í sambandi við postarnar í øllum staklutum í ársfrásøgnini, og skal harumframt serskilt geva nakrar ávísar upplýsingar, t.d. um eventualskyldur, veðsetingar og aðrar trygdarveitingar, o.a. Fleiri krøv um upplýsandi frágreiðingar í notunum ("notuupplýsingar") verða settar fyritøkum í roknskaparflokki B sambært galdandi § 53, eins og ásett eru krøv um serligar notuupplýsingar fyri hægru roknskaparflokkarnar í m.a. § 87, og fyri samtøkur í §§ 125-126.

Ársroknskaparlógin inniheldur harumframt nærri reglur um frágreiðing um nýttan roknskaparhátt, notur, virðisjavningar, fíggjarligar ognir, íløgufastognir, materiella og immateriella støðisogn, av- og niðurskrivingar, o.m.a.

Ársfrásøgnin skal setast upp samsvarandi formligu krøvunum til flokking og uppseting sambært §§ 19, 23-24, 79-81 og 103 í ársroknskaparlógini. Hetta merkir, at fíggjarjavnin og rakstraroknskapurin skulu setast upp í skema, sum eru lýst í skjali 2 til ársroknskaparlógina, og sum vísa viðkomandi høvuðs- og undirpostar. Endamálið er at tryggja standardisering av ársfrásøgnum, soleiðis at til ber at samanbera ársroknskapir hjá ymiskum fyritøkum og tvørturum vinnugeirar. Í nøkrum førum er loyvt at gera smávegis tillagingar, um serligu viðurskiftini hjá fyritøkuni gera tað neyðugt, eins og ískoytiskrøv og nakrir valmøguleikar eru ásettir fyri fyritøkur í hægru roknskaparflokkunum, sum skulu almannakunngera eina ársfrásøgn.

[11]Sambært uppskotnu § 25 skulu fyritøkur í roknskaparflokki B framhaldandi gera eina leiðslufrágreiðing, men kravið um eginpeningsuppgerð verður slept. Orsøkin til hetta er, at eginpeningsuppgerð fyri roknskaparflokk B ikki longur er eitt krav sambært nýggja roknskapardirektivinum hjá ES.

Í § 19 í ársroknskaparlógini (§ 22 í uppskotinum) er ásett, at fyritøkan skal taka tær ognir og skyldur við í ársroknskapinum, sum skulu innroknast fyri roknskaparflokkin, umframt eginognina í einum byrjunarjavna ta løtu, virksemið er byrjað. Er onki annað ásett í lóggávuni, verður virksemið hjá fyritøkuni mett at vera byrjað tá ið fyritøkan varð stovnað ella, um vinnuligt virksemi hevur verið í fyritøkuni frammanundan, tað tíðspunkt, har hetta virksemi skuldi verið talt uppí virksemið hjá fyritøkuni. Hendan regla um byrjanarjavnan er galdandi fyri allar roknskaparflokkar.

Í skjali 1 til ársroknskaparlógina eru allýsingar av nøkrum hugtøkum, sum verða nýtt afturvendandi í ársroknskaparlógini, til dømis dagsvirði, ogn, skuld, o.a. Tó eru dømir um, at hugtøk eru allýst í viðkomandi áseting í ársroknskaparlógini, har hugtøkini koma fyri, eins og nøkur hugtøk als ikki eru allýst. Í slíkum førum ber til at styðja seg til lýsingina av viðkomandi hugtøkum í IFRS, tí byrjanarstøðið í ársroknskaparlógini er, at hugtøkini eru lýst á samsvarandi IFRS.

Allýsingarnar í skjali 1, umframt formligu krøvini til flokking og uppseting samsvarandi fíggjarjavna- og rakstrarroknskaparyvirlitunum (skema) í skjali 2, eru sum byrjanarstøði bindandi fyri fyritøkur, sum skulu gera eina ársfrásøgn eftir ársoknskaparlógini. Sostatt skulu tær allýsingar og tann raðfylgja nýtast, sum eru ásettar í hesum skjølum. Brot á formligu krøvini kann merkja, at ársfrásøgnin verður mett ikki at lúka krøvini í ársroknskaparlógini.

1.2.8 Ikki-fíggjarligar frágreiðingar
Ársroknskaparlógin fevnir í høvuðsheitinum um krøv til fíggjarligar frágreiðingar hjá fyritøkum. Tó setir ársroknskaparlógin í støðum krav um upplýsingar, sum ikki eru av fíggjarligum slagi, til dømis í § 99 a í galdandi ársroknskaparlóg sum ásetir, at leiðslufrágreiðingin fyri stórar fyritøkur skal fevna um eina frágreiðing um samfelagsábyrgd, *Corporate Social Responsibility* (CSR). Leisturin, sum hevur verið galdandi higartil viðvíkjandi frágreiðinum um samfelagsábyrgd er sonevndi "comply-or-explain"-leisturin. Tað merkir, at fyritøkur, sum velja ikki at gera ein politikk fyri samfelagsábyrgd, skulu upplýsa um hetta í leiðslufrágreiðingini.

1.2.9 Altjóða roknskaparstandardarnir (IFRS)
Sambært ES-fyriskipan nr. 1606/2002 um at nýta altjóða roknskaparstandardar, hava fyritøkur, sum hava virðisbrøv upptikin til handils á einum reguleraðum marknaði, og sum eisini skulu gera ein samtaksroknskap, síðani 2005 havt skyldu til at gera samtaksroknskapin samsvarandi altjóða roknskaparstandardunum, *International Financial Reporting Standards* (IFRS).

Samstundis loyvir fyriskipanin limalondunum at krevja ella at loyva, at børsskrásettar fyritøkur, sum ikki gera samtaksroknskap, eisini skulu gera ein ársroknskap samsvarandi altjóða roknskaparstandardunum, og/ella at eisini ikki-børsskrásettar fyritøkur kunnu gera sín samtaksroknskap ella ársroknskap samsvarandi altjóða roknskaparstandardunum.

Í sambandi við, at ársroknskaparlógin varð sett í gildi í Føroyum í 2007, varð ES-fyriskipanin eisini sett í gildi sum skjal 4 til ársroknskaparlógina. Sostatt seta fyriskipan nr. 1606/2002 og ársroknskaparlógin í dag krav til fyritøkur, sum hava virðisbrøv upptikin til handils á einum skipaðum marknaði í ES/EBS, um at fylgja IFRS standardinum, í samtaksroknskapinum, ella í ársroknskapinum, um fyritøkan ikki er í einari samtøku. Harumframt kunnu fyritøkur, sum ikki hava skyldu til at nýta altjóða roknskaparstandardarnar, frítt velja at gera ársroknskap ella samtaksroknskap eftir teimum nevndu standardunum.

Um ein fyritøka skal ella hevur valt at nýta altjóða roknskaparstandardarnar, so skal fyritøkan fylgja øllum viðkomandi standardum, og í tann mun ársroknskaparlógin ikki samsvarar við altjóða standardarnar, skulu standardarnir takast fram um.

Nærri reglur um at nýta altjóða roknskaparstandardarnar eru ásettar í kunngerð til ársroknskaparlógina (*bekendtgørelse nr. 1381 af 11. december 2007*).

1.2.10 Grannskoðanarskyldan
Í § 135 í ársroknskaparlógini (§ 156 í uppskotinum) er ásett, at ársfrásøgnin fyri fyritøkur í roknskaparflokki B, C ella D ella samtaksroknskapurin skal grannskoðast av einum ella fleiri grannskoðarum, sum eru góðkendir sambært grannskoðaralógini[12], um fyritøkan fíggjarjavnadagin tvey fylgjandi roknskaparár fer upp um tvey av fylgjandi støddarmørkum:

Talva 3: Støddarmark fyri frával av grannskoðan

Roknskaparflokkur	**Fíggjarjavni**	**Nettosøla**	**Ársverk**
Frával av grannskoðan	1 mió. kr.	2 mió. kr.	12

Sum skilst er grannskoðan ikki kravd fyri minstu fyritøkurnar í roknskaparflokki B. Ein fyritøka, sum ikki hevur skyldu at lata ársfrásøgnina grannskoða, kann kortini velja at heita á ein góðkendan grannskoðara um at hjálpa fyritøkuni at seta ársroknskapin upp á rætta hátt eftir ársroknskaparlógini. Roknskaparhjálp er ikki at meta sum ein váttan við trygd, tó at grannskoðarin vanliga í sambandi við sítt fyrivarni greiðir frá, at roknskaparhjálpin er gjørd eftir viðurkendum altjóða standardum. Lóggávan setur ikki avmarkingar fyri, hvør kann veita roknskaparhjálp, men einans góðkendir grannskoðarar hava rætt til taka fyrivarni og at vísa til altjóða standardar í hesum sambandi.

Síðani 2016 hava minstu fyritøkurnar í roknskaparflokki B havt møguleika at velja at nýta avmarkaða váttanarstandard Skráseting Føroya (víðkað gjøgumgongd), heldur enn at velja eina fulla grannskoðan av ársfrásøgnini. Ein víðkað gjøgnumgongd er ein váttan við avmarkaðari trygd, har grannskoðarin fremur eitt avmarkað eftirlit við ársroknskapinum. Hetta er minni arbeiðskrevjandi og kostnaðarmikið enn ein full grannskoðan, og má í flestu førum haldast at vera hóskandi fyri minstu fyritøkurnar í roknskaparflokki B.

Fyritøkur í roknskaparflokki B kunnu, sum byrjanarstøði, velja víðkaða gjøgnumgongd heldur enn grannskoðan, um fyritøkan fíggjarjavnadagin í tvey fylgjandi roknskaparár ikki fer upp um tvey av fylgjandi støddarmørkum:

Talva 4: Støddarmørk fyri val av víðkaðari gjøgnumgongd

Roknskaparflokkur	**Fíggjarjavni**	**Nettosøla**	**Ársverk**
Víðkað gjøgnumgongd	12 mió. kr.	24 mió. kr.	15

1.2.11. Fyristingarligar reglur, eftirlitsreglur, o.a.
Kapittul 18-25 í ársroknskaparlógini (kapittul 22-29 í uppskotinum) inniheldur ymiskar fyrisitingarligar ásetingar og revsiásetingar. Nakrir høvuðstættir frá galdandi lóg eru lýstir niðanfyri.

Tað er Skráseting Føroya, sum umsitur ársroknskaparlógina, og eru allar fyritøkur, sum sambært vinnufelagalóggávuni hava skyldu til at lata seg skráseta hjá Skráseting Føroya, eisini

[12] "Góðkendur grannskoðari" er felagsheitið fyri skrásettar og løggildar grannskoðarar.

fevndar av ársroknskaparskylduni. Uppgávurnar hjá Skráseting Føroya sambært ársroknskaparlógini eru tískil í høvuðsheitinum at tryggja, at skrásettu fyritøkurnar lata myndugleikanum ársfrásøgn og møguligan samtaksroknskap rættstundis, og í tí standi sum krevst, bæði innihaldsliga og formliga.

Sambært § 138 í ársroknskaparlógini (§ 162 í uppskotinum), skulu fyritøkur í roknskaparflokki B, C og D uttan óneyðugt drál eftir at ársfrásøgning er góðkend, lata ársfrásøgnina inn til Skráseting Føroya til almannakunngering. Innlatingarfreistin er í seinasta lagi 6 mánaðir eftir at roknskaparárið er liðið, tó 4 mánaðir fyri fyritøkur í roknskaparflokki D. Víkjast kann ikki frá hesum freistum, uttan so, at talan er um fyritøku, sum er undir endurskipanarviðgerð ella trotabúsviðgerð eftir konkurslógini.

Ársfrásøgnin skal latast Skráseting Føroya talgilt í tí sniði, sum landsstýrisfólkið ásetir, tað er, sambært § 2 b, í *bekendtgørelse nr. 1385 af 11. december 2007*, í PDF-sniði og í XBRL-sniði[13]. XBRL-fílin skal gerast samsvarandi eini taksonomi, sum Skráseting Føroya hevur gjørt. Kravið um innlating í XBRL-sniði er tó ikki galdandi fyri íverksetarafeløg ella fyri feløg, sum gera ársfrásøgn ella samtaksroknskap sambært altjóða roknskaparstandardunum IFRS.

Í §§ 150-152 í ársroknskaparlógini (§ 177-179 í uppskotinum) er ásett, at um ársfrásøgnin ella undantaksváttanin ikki er latin Skráseting Føroya rættstundis, sendir Skráseting Føroya boð til fyritøkunnar evstu leiðslu við áheitan um at lata ársfrásøgnina inn. Verður ársfrásøgnin ikki latin Skráseting Føroya innan ta freist, sum er ásett, áleggur Skráseting Føroya í fyrstu syftu evstu leiðsluni eitt tvingsilsavgjald, sum nærri ásett í § 151 í ársroknskaparlógini.

Harumframt kann Skráseting Føroya, sambært § 163 í ársroknskaparlógini (§ 201 í uppskotinum), áseta eina freist á 4 vikur, og eftir hetta kann Skráseting Føroya, um ársfrásøgnin ikki er latin myndugleikanum, heita á skiftirættin um at tvingsilsavtaka fyritøkuna samsvarandi teimum reglum, sum eru galdandi fyri fyritøkuna.

Skráseting Føroya hevur leypandi eftirlit við, at ársfrásagnir hjá fyritøkum lúka krøvini sambært ársroknskaparlógini. Eftirlitið hjá Skráseting Føroya fevnir um innihaldsligu krøvini til ársfrásøgnina, og um formligu krøvini, heruppií krøv um rætta flokking og uppseting samsvarandi skjali 2, krav um grannskoðan av ársfrásøgnini, o.a.

Staðfestir Skráseting Føroya í sambandi við roknskapareftirlit, at brot eru framd á ársroknskaparlógina, kann myndugleikin sambært § 161 (§ 198 í uppskotinum) í ársroknskaparlógini gera av

1) at átala lógarbrotið,
2) at krevja, at villur og manglar verða fingin í rættlag, og/ella
3) at krevja, at lógarbrotið verður steðgað.

Avleiðingin verður ásett út frá einari ítøkiligari meting um, hvussu umfatandi brotið er. Í nøkrum førum vil tað vera nóg mikið at átala brotið, men í øðrum førum er neyðugt at krevja, at manglar verða fingnir í rættlag, og at nýta tvingsilsmiðlar í hesum sambandi. Er talan um fleiri ella umfatandi manglar í mun til innihaldsligu ella formligu krøvini, kann Skráseting Føroya eitt nú áleggja limum í evstu leiðsluni tvingsilsbót eftir § 162 í ársroknskaparlógini (§ 199 í uppskotinum), og/ella áseta eina freist at fáa manglarnar í rættlag eftir § 163.

[13] "eXtensible Business Reportin Language".

Avgerðir, tiknar av Skráseting Føroya, kunnu kærast til Føroya Kærustovn. Tó ber ikki til at kæra um eina sýtan av at leingja 6- ella 4-máðanar freistina at lata Skráseting Føroya ársfrásøgnina til almannakunngering.

Brot á flestu grundleggjandi innihaldsligu og formligu ásetingarnar í ársroknskaparlógini kunnu eftir § 164 (§ 202 í uppskotinum) revsast við bót, um ikki hægri revsing er uppiborin sambært revsilógini.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at seta í gildi eina nýggja ársroknskaparlóg á føroyskum máli, sum er tillagað samsvarandi teimum broytingum, sum eru gjørdar við nýggja roknskapardirektivinum hjá ES og við nýggjastu IFRS-standardunum. Mett verður eisini, at uppskotið sum heild ber við sær nakrar fyrisitingarligar lættar fyri føroyskar fyritøkur í mun til roknskaparlóggávuna, serliga fyri smáar fyritøkur.

Skotið verður upp at gera hesar høvuðsbroytingarnar í mun til galdandi lóg:

1) Lógarteksturin og skjal 1-2 í ársroknskaparlógini verða týdd til føroyskt, og nakrar ritstjórnarligar broytingar verða gjørdar.
2) Roknskaparreglurnar í ársroknskaparlógini verða tillagaðir nýggja roknskapardirektivinum hjá ES (direktiv 2013/34/EU, við seinni broytingum), umframt nýggjastu IFRS-standardunum. Byrjanarstøðið fyri ígildissetanina í Føroyum eru donsku lógaruppskotini um at broyta årsregnskabsloven, serliga lov nr. 738 af 01/06/2015 og lov nr. 1716 af 27/12/2018.
3) Støddarmørkini fyri roknskaparflokkarnar í ársroknskaparlógini verða hækkað til mest loyvdu støddarmørk sambært roknskapardirektivinum hjá ES. Í hesum sambandi verður víst til § 1, nr. 2-3 í lov nr. 480 af 22/05/2024, sum hækkar samsvarandi støddarmørk í årsregnskabsloven í Danmark.
4) Ymiskar aðrar broytingar, sí brot 1.3.4.

1.3.1. Ritstjórnarligar viðmerkingar

Galdandi ársroknskaparlóg í Føroyum er kongliga fyriskipanin frá 2006, sum er orðað á donskum máli. Ein rød av innihaldsligum broytingum eru gjørdar fram til 2016, og eru hesar broytingar orðaðar á føroyskum máli. Uttanríkis- og vinnumálaráðið metir, at tað er ein fyrimunur at gera eina nýggja ársroknskaparlóg, har bæði lógarteksturin og skjølini til lógina eru orðað á føroyskum máli.

Grundleggjandi er talan um somu lóg, sum er galdandi í dag, men við teimum broytingum og dagføringum, sum eru neyðugar fyri, at føroyska lóggávan á økinum fer at samsvara við lóggávuna í ES/EBS og við altjóða roknskaparstandardarnir IFRS. Tað skal viðmerkjast, at nakrar tillagingar eru gjørdar í mun til føroysk viðurskifti, eins og uppskotið ikki fult út setir allar reglurnar í donsku årsregnskabsloven ella nýggja roknskapardirektivinum í gildi í Føroyum. Hetta er serliga galdandi fyri reglurnar viðvíkjandi ikki-fíggjarligum frágreiðingum.

Serligu viðmerkingarnar til hetta uppskot eru gjørdar eftir sama leisti, sum varð nýttur, tá ið vinnufelagalógin varð fyrireikað í 2009-2010[14]. Hetta merkir, at serligu viðmerkingarnar í

[14] Løgtingsmál nr. 42/2010 – Uppskot til løgtingslóg um parta- og smápartafeløg (vinnufelagalógin). Uppskotið byggir á donsku selskabsloven, sum orðað við lov nr. 470 af 12/06/2009, sum er viðheft sum fylgiskjal til tað uppskotið.

hesum uppskoti vísa til samsvarandi áseting í donsku årsregnskabsloven við árslok í 2024, og at tað í hesum sambandi verður víst til annaðhvørt høvuðsásetingina í upprunaligu donsku årsregnskabsloven frá 2001, ella til ásetingina, sum hon er orðað við einum broytingarlógaruppskoti. Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur eisini gjørt ein ásetingarlykil, soleiðis at til ber at samanbera ásetingarnar í galdandi donsku årsregnskabslov frá 2024, við hetta uppskot.

Ársroknskaparlóggávan er serlóggáva av tekniskum slagi, sum er nógv merkt av altjóða standardum, sum í støðum eru rættiliga nágreiniligir. Brúkararnir eru í flestu førum yrkisfólk, heruppií góðkendir grannskoðarar, virkisráðgevar, roknskaparstarvsfólk, o.o., og geva serligu viðmerkingarnar til samsvarandi lóggávuna í Danmark í flestu førum eina rættiliga gjølla lýsing av, hvussu ásetingarnar skulu skiljast. Tað verður mett skynsamt at lóggeva soleiðis, at serligu viðmerkingarnar til årsregnskabsloven eisini frameftir skulu kunna nýtast sum tulkingaríkoyti í sambandi við møgulig ivamál um, hvussu hesar mongu teknisku ásetingar skulu skiljast. Eisini er tað sannlíkt, at tað frameftir fara at koma støður, har tað er neyðugt at kunna nýta onnur tulkingaríkoyti, til dømis viðkomandi ES-reglugerðir, altjóða roknskaparstandardarnar, roknskaparligar- ella løgfrøðiligar bókmentir, sum greina sambæriligu reglurnar í Danmark, o.tíl.

1.3.2 Nýggja roknskapardirektivið og IFRS – Nýggj krøv og linkingar
Eitt av høvuðsendamálunum við lógaruppskotinum er at tillaga lóggávuna samsvarandi nýggja roknskapardirektivinum hjá ES frá 2013, umframt at tillaga lóggávuna samsvarandi altjóða roknskaparstandardunum IFRS. Hetta verður gjørt sum liður í at tryggja, at føroyskar fyritøkur í sambandi við roknskapararbeiðið í størri mun kunnu velja at nýta, ella at styðja seg til, altjóða viðurkendar roknskaparstandardar. Hetta kann bera við sær fyrimunir í mun til marknaðir, har nýggjastu IFRS-standardarnir verða nýttir, samstundis sum roknskaparførslan verður smidligari fyri fyritøur, ið eru partur av samtøkum, sum nýta IFRS.

At reglurnar í nýggja roknskapardirektivinum hjá ES verða settar í gildi í Føroyum, merkir bæði fleiri krøv og fleiri linkingar av galdandi krøvum til fyritøkur í Føroyum. Sum heild verður tó mett, at talan er um linkingar av umsitingarligu krøvunum. Størsta uppskotna linkingin er hækkingin av støddarmørkunum, sum er lýst niðanfyri undir broti 1.3.3, og sum er galdandi fyri allar fyritøkur, burtusæð frá størstu fyritøkunum í roknskaparflokki C, stór og D. Tó eru nøkur onnur krøv og linkingar lýst í hesum broti, serliga linkingar fyri smáar fyritøkur í Føroyum.

1.3.2.1 Frágreiðandi upplýsingar í notunum
Í nýggja roknskapardirektivinum eru ásett nøkur krøv um, hvørjar upplýsingar smáar fyritøkur skulu geva í frágreiðandi notum til ársroknskapin. Samstundis gevur direktivið møguleika fyri, at ES-limalondini kunnu krevja upp til fimm eyka notuupplýsingar frá smáu fyritøkunum. Hesar fimm frágreiðandi upplýsingar eru upplýsingar, sum sambært roknskapardirektivinum verða kravdar frá miðalstórum og stórum fyritøkum. Umframt tær frágreiðandi upplýsingar, sum limalondini skulu krevja frá smáum fyritøkum, og tær upplýsingar, sum limalondini kunnu krevja, er tað ikki loyvt ES-limalondunum at seta fleiri krøv til upplýsingar frá smáum fyritøkum.

Sambært nýggja roknskapardirektivinum kunnu ES-imalondini heldur ikki krevja, at smáar fyritøkur í einari frágreiðandi notu skulu upplýsa um tal og nominella virðið á kapitalpørtum fyri hvønn flokk, tá ið fyritøkukapitalurin er býttur í fleiri flokkar. Mælt verður til, at galdandi § 75 ikki verður tikin við í uppskotinum, og at ein nýggj áseting verður orðað í § 91, sum svarar

til § 87 a í årsregnskabsloven. Uppskotna § 91 merkir, at miðalstórar og stórar fyritøkur í roknskaparflokki C og D framhaldandi skulu geva hesar upplýsingar, við nøkrum smávegis tillagingum.

Eisini verður skotið upp, at seta nøkur krøv um upplýsingar um dótturfyritøkur, atknýttar fyritøkur og móðurfyritøkur úr gildi fyri smáar fyritøkur. Hetta fevnir m.a. um kravið at upplýsa um ta móðurfyritøku, sum ger samtaksroknskap fyri størsta samtakið, har fyritøkan er dótturfyritøka.

Nýggja roknskapardirektivið ásetur, at noturnar skulu presenterast í somu raðfylgju, sum verður nýtt í rakstrarroknskapinum og í fíggjarjavnanum. Hetta krav verður mælt til at seta inn fyri fyritøkur í roknskaparflokki B, C og D í uppskotnu § 58 og § 147, stk. 5.

Viðvíkjandi krøvunum til miðalstórar og stórar fyritøkur eru krøvini framvegis minimumskrøv. ES/EBS-limalondini kunnu tískil seta fleiri krøv til hesar fyritøkur. Nýggja roknskapardirektivið ber tó við sær nakrar broytingar í mun til krøvini til notur í ársfrásøgnini fyri fyritøkur í roknskaparflokki C og D.

1.3.2.2 Avmarkaði notukrøv fyri smáfyritøkur
Nýggja roknskapardirektivið frá 2013 heimilar ES-londunum at áseta linkaðar reglur fyri sonevndar "smáfyritøkur". Talan er um fyritøkur, sum tvey fylgjandi roknskaparár, fíggjarjavnadagin, ikki eru farnar upp um tvey av fylgjandi støddarmørkum:

- Fíggjarjavna á 450.000 evrur
- Nettosølu á 900.000 evrur, ella
- Eitt miðaltal av heiltíðarsettum starvsfólkum á 10.

Skotið verður upp at áseta serligar reglur um hetta í §§ 26-27. Uppskotnu reglurnar merkja, at krøvini til frágreiðandi notur í ársroknskapinum verða linkaði fyri smáfyritøkur í roknskaparflokki B, sum lúka treytirnar fyri hesum.

1.3.2.3 Upplýsingar um áogn til góðar og trygdarveitingar
Sambært nýggja roknskapardirektivinum kunnu upplýsingar um áogn til góðar og trygdarveitingar fyri limir í leiðsluni einans krevjast fyri smáar fyritøkur, men harafturímóti ikki upplýsingar um lán til leiðsluna í móðurfyritøkuni ella persónar, ið eru serliga tætt knýttir at hesum leiðslulimum. Samstundis ásetur nýggja direktivið, at fleiri upplýsingar skulu gevast um hesi lán og trygdarveitingar. Tað skal m.a. upplýsast um upphæddir, sum eru avskrivaðar ella niðurskrivaðar. Mælt verður til, at galdandi áseting um áogn til góðar hjá leiðslulimum o.a. verður broytt samsvarandi.

1.3.2.4 Leiðslufrágreiðingin
Sambært uppskotinum skulu smáar fyritøkur gera eina leiðslufrágreiðing. Mælt verður til, at leiðslufrágreiðingin skal fevna um upplýsingar um egnar kapitalpartar og um fyritøkunnar høvuðsvirksemi.

1.3.2.5 Miðaltalið av heiltíðarsettum starvsfólkum í roknskaparárinum
Sambært nýggja roknskapardirektivinum skulu smáar fyritøkur upplýsa um miðaltalið av heiltíðarsettum starvsfólkum í roknskaparárinum. Mælt verður til, at hett krav verður ásett sum í § 74. Hinvegin krevur nýggja roknskapardirektivið, at upplýsingar skulu gevast um miðaltalið av ársverkum í roknskaparárinum, fyri flestu fyritøkur.

Royndirnar hjá føroysku grannskoðanarvinnuni eru, at tað kann vera serliga torført at gera miðaltalið av heiltíðarsettum starvsfólkum í roknskaparárinum upp í fyritøkum, sum virka í ávísum vinnugeirum, til dømis í fiskivinnuni. Skotið verður tískil upp, at landsstýrisfólkinum verður heimilað at áseta nærri reglur um, hvussu miðaltalið av ársverkum skal gerast upp, til dømis við atliti til at áseta ein felags leist, sum allar slíkar fyritøkur skulu fylgja.

Fyritøkur í roknskaparflokki C og D skulu sambært nýggja roknskapardirektivinum upplýsa serskilt um miðaltalið av starvsfólkum í roknskaparárinum, sum hava starvast í fyritøkuni, sum er pro-rata konsoliderað í samtaksroknskapinum. Mælt verður til, at hetta verður ásett í § 147, stk. 6.

1.3.2.6 Eginognaruppgerðin í smáum fyritøkum
Nýggja roknskapardirektivið loyvir ikki, at hildið verður fast í kravinum um, at smáar fyritøkur skulu gera eina eginpeningsuppgerð. Mælt verður til, at hetta ikki verður tikið við í uppskotinum.

1.3.2.7 "Óvanligir postar" (ekstraordinære poster)
Sambært § 30 í galdandi ársroknskaparlóg skal fyritøkan greiða frá "óvanligum" inntøkum og útreiðslum, sum stava frá hendingum, sum ikki hoyra til vanliga raksturin, og sum fyritøkan ikki væntar eru afturvendandi (DA: ekstraordinære poster).

Hugtakið er tikið burtur í nýggja roknskapardirektivinum. Mælt verður til, at galdandi krav um hetta í § 95, og lýsingin av hesum í § 30 í galdandi ársroknskaparlóg, ikki verður tikið við í hesum uppskoti.

1.3.2.8 Serligir postar
Meðan tað omanfyri undir punkt 1.4.4.7 verður skotið upp, at "óvanligir postar" ikki skulu takast við í uppskotinum, so verður tað í nýggja roknskapardirektivinum kravt, at upplýsingar skulu gevast um støddina og slagið av *serligum postum*. Ein serligur postur er ein inntøku- ella útreiðslupostur, hvørs stødd ella slag víkir munandi frá vanligu sveiggjunum í rakstrinum í fyritøkuni. Tískil verður mett, at upplýsingar um slíkar postar kann hava serligan týdning fyri roknskaparbrúkaran.

Til ber ikki at seta nágreinilig krøv fyri, nær ein postur er at meta sum serligur. Ein postur verður tó ikki í sjálvum sær serligur bert vísandi til, at posturin ikki hevur samband við kjarnuvirksemið hjá fyritøkuni. Sum dømi um postar, sum eftir umstøðunum kunnu metast at vera serligir, kunnu nevnast niðurskrivingar á ogn í umferð, sum eru størri enn vanligar niðurskrivingar (og afturføringar av somu), niðurskrivingar á støðisogn (og afturføringar), endurgjald og útreiðslur í samband við, at ein verksmiðja verður niðurlaðað ella at eitt leigumál verður sagt upp. Serligir postar skulu ikki setast sum ein serskildur postur í ársroknskapinum, men skulu innroknast í tí partinum av rakstrarroknskapinum, har teir mest sannlíkt hoyra til.

Skotið verður upp at áseta reglur um serligar postar í nýggju § 73, sum fevnir um fyritøkur í roknskaparflokki B, C og D.

1.3.2.9 Serligar reglur fyri dótturfyritøkur og miðalstórar samtøkur
Nýggja roknskapardirektivið gevur eisini møguleika fyri, at frítaka dótturfyritøkur frá skylduni at gera ársroknskap, og at frítaka miðalstórar samtøkur frá skylduni at gera samtaksroknskap, tó undir nærri ásettum treytum. Í Danmark valdi man ikki at nýta hesar møguleikar í fullum

líki, men var ein millumloysn vald í staðin, har krøvini til vavið av ársroknskapunum og samtaksroknskapunum vórðu linkaði. Mælt verður til, at hesin leistur verður fylgdur í Føroyum.

Sambært uppskotnu § 81 kunnu dótturfyritøkur, sum sambært § 7 eru miðalstórar fyritøkur, velja at gera ársfrásøgn sambært reglunum fyri roknskaparflokk B, um treytirnar í § 81 eru loknar. Um treytirnar fyri hesum eru loknar, kann dótturfyritøkan harumframt velja at nýta váttanarstandard Skráseting Føroya (víðkað gjøgnumgongd) heldur enn eina fulla grannskoðan. Dótturfyritøkur í roknskaparflokki D kunnu tó ikki velja gera ársfrásøgn sambært reglunum fyri roknskaparflokk B.

Miðalstórar samtøkur vilja framhaldandi verða fevndar av skylduni at gera samtaksroknskap. Tó verður skotið upp, at hækkingn av støddarmørkunum eisini skal fevna um samtøkur, soleiðis at fleiri samtøkur verða smáar samtøkur, og tískil ikki nýtast at gera samtaksroknsap, sbr. uppskotnu § 131.

1.3.2.10 Serligar reglur um leiðsluátekningina í minstu fyritøkunum
Sambært § 9 í galdandi ársroknskaparlóg skal leiðslan í fyritøkuni vátta, at ársfrásøgnin er gjørd samsvarandi krøvunum í ársroknskaparlógini, og hvørt ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av fíggjarligu viðurskiftunum í fyritøkuni. Hetta krav er galdandi uttan mun til fyritøkunnar stødd, og uttan mun til, at leiðslan í fyritøkuni einans er ein einstakur limur, t.d. ein stjóri, sum eisini eigur fyritøkuna. Í praksis merkir hetta, at allir limirnir í leiðsluni skulu undirrita ársfrásøgnina og dagfesta undirskriftina, t.d. í samband við leiðsluátekningina.

Direktiv 2004/109/EF við seinni broytingum (gjøgnumskygnisdirektivð) ásetir einans, at hetta er eitt krav fyri børsskrásettar fyritøkur. Leiðsluátekningin hevur heldur ikki nakran sjálvstøðugan løgfrøðiligan týdning, tí at ásett er í galdandi ársroknskaparlógini og í hesum uppskoti, at leiðslan ber ábyrgdina fyri ársroknskapinum.

Mælt verður til, at hetta krav verður sett partvís úr gildi, soleiðis at fyritøkur, hvørs ábyrgdarhavandi leiðslustovnur einans er ein einstakur limur, tá ársfrásøgnin verður góðkend, kunnu lata vera við at taka eina leiðsluátekning við í ársfrásøgnini, tó ikki, um fyritøkan skal gera ársfrásøgn fyri roknskaparflokk D. Leiðslan verður mett at hava góðkent ársfrásøgnina, tá ið ársfrásøgnin er latin inn til Skráseting Føroya, umvegis talgildu innlatingarskipanina. Talan er sostatt um ein umsitingarligan lætta fyri minstu fyritøkurnar, ið ikki hevur sjálvstøðugan týdning í mun til ein møguligan spurning um ábyrgd.

1.3.2.11 Serligt um tillagingar í mun til IFRS (innrokning og máting)
Tá ið årsregnskabsloven, sum liggur til grund fyri lóggávuni í Føroyum, varð samtykt í Danmark í 2001, var ætlanin, at lóggávan ikki skuldi forða fyritøkum í at nýta ásetingar um innrokning og máting (virðisáseting) sambært IFRS. Hetta mál varð rokkið innanfyri teir karmar, sum vóru møguligir sambært teimum ES-direktivum, sum tá vóru galdandi. Men IFRS er broytt við tíðini, eins og ávísir munir millum årsregnskabsloven frá 2001 og IFRS eru tiknir burtur leypandi.

Skotið verður tískil upp at gera eina rød av broytingum í kapitlinum í lógini um innrokning og máting (virðisáseting). Størsti parturin av hesum broytingum eru av tekniskum slagi, og eru endurgivnar niðanfyri:

- Immateriellar støðisognir kunnu sambært uppskotinum uppskrivast til dagsvirðið, um ognirnar verða handlaðar á einum virknum marknaði. Tað kann til dømis snúgva seg um kvotur, ella líknandi. Hugtakið "virkin marknaður" er allýstur í skjal 1.
- Krav við um, at mest loyvda avskrivingartíðarskeið skal vera 20 ár fyri immateriella støðisogn verður strikað, tí hetta samsvarar ikki við nýggja roknskapardirektivið. Í staðin skulu allar immateriellar støðisognir, heruppií goodwill, avskrivast yvir nýtslutíðarskeiðið. Har tað ikki ber til at gera eina álítandi meting av nýtslutíðarskeiðnum, t.d. sum við goodwill ella menningarverkætlanum, verður skotið upp at áseta nýtslutíðarskeiðið til 10 ár.
- Skotið verður upp at broyta ásetingarnar um, at fyritøkur, sum hava íløguvirksemi sum sítt høvuðsvirksemi, leypandi kunnu gera teirra íløguognir upp til dagsvirðið, soleiðis at tað ikki longur er er eitt krav, at fyritøkan hevur íløguvirksemi sum sítt høvuðsvirksemi. Frameftir kunnu allar fyritøkur velja at nýta ásetingina í samband við teirra íløguognir. Eisini verður skotið upp, at ásetingin verður avmarkað til íløgufastogn. Orsøkin til hetta er, at tað verður ikki mett ráðiligt at nýta dagsvirðið í størri mun enn loyvt er sambært IFRS. Harumframt loyvir nýggja roknskapardirektivið hjá ES ikki, at ásetingin verður nýtt viðvíkjandi fíggjarligum ognum, t.d. veðbrøv, partabrøv í dótturfyritøkum, o.a. Ásetingin eigur heldur ikki at kunna verða nýtt í samband við skuld, sum hoyrir til íløguvirksemið, tí hetta er ikki loyvt sambært direktivinum.
- Landbúnaðarfyritøkur kunnu gera teirra lívfrøðiligu ognir upp til dagsvirðið, sjálvt um landbúnaðarfyritøka ikki er høvuðsvirksemið hjá fyritøkuni.
- Skotið verður upp, at vørugoymslur ikki longur kunnu uppskrivast. Hetta er ein beinleiðis fylgja av nýggja roknskapardirektivinum.
- Uppskot til nýtslu av úrslitinum (vinningur/hall) kann heldur ikki longur innroknast sum ein skylda undir postinum «Uppskot til vinningsbýti». Ásetingin stavar frá donsku årsregnskabsloven frá 2001 (LSF 117 45), og ætlanin var tá, at hendan áseting einans skuldi vera galdandi í eini skiftistíð.

Við nýggja roknskapardirektivunum hjá ES er årsregnskabsloven í Danmark í ávísan mun tillagað IFRS. Skotið verður upp, at somu broytingar verða gjørdar í føroysku årsroknskaparlógini. Hetta merkir, at årsroknskapirnir hjá føroyskum fyritøkum skulu tillagast altjóða standardum, sum tryggjar eina høga góðsku, og at slíkir årsroknskapir kunnu nýtast av fyritøkum, sum virka á altjóða marknaðum, har IFRS-standardar eru vanligir.

1.3.3 Støddarmørkini í årsroknskaparlógini

1.3.3.1 Støddarmørk fyri roknskaparflokkarnar

Årsroknskaparlógin er sum áður nevnt skipað við einum spælikubbamyndli við roknskaparflokkunum A, B, C og D, og eru tað objektivu lyklatølini fíggjarjavni, nettosøla og miðaltalið av heiltíðarsettum starvsfólkum, sum eru avgerandi fyri, hvønn roknskaparflokk fyritøkan skal gera ársfrásøgn fyri.

Støddarmørkini í årsroknskaparlógini vórðu seinast broytt við løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2009 um at broyta årsroknskaparlógina, sum kom í gildi hin 1. januar 2010. Hetta svaraði í høvuðsheitinum til broytingarnar, sum vóru gjørdar í årsregnskabsloven í Danmark. Síðani eru støddarmørkini í Danmark hækkaði í 2015 í sambandi við, at årsegnskabsloven varð tillagað í mun til nýggja roknskapardirektivið, og eru støddarmørkini í Føroyum í 2025 sostatt lægri samanborið við í Danmark í 2015.

Í millumbilinum eru mest loyvdu støddarmørkini sambært ES-roknskapardirektivinum hækkaði enn eina ferð[15]. Orsøkin til hetta er, at høgur prístalsvøkstur hevur verið í ES-londunum síðani umleið 2020, og tað verður ikki mett rímiligt, at hetta skal bera við sær, at fleiri fyritøkur verða fevndar av strangari krøvum í ársroknskaparhøpi. Í Danmark vóru støddarmørkini í årsregnskabsloven broytt samsvararandi hesum mest loyvdu støddarmørkum í ES, við lógarbroyting á vári 2024[16].

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur mett um, hvussu støddarmørkini í ársroknskaparlógini í Føroyum eiga at verða skipað. Fyri strangari krøvum talar, at føroyski búskapurin er lítil samanborið við búskapin í eitt nú Danmark ella í ES-londunum, og at tørvur tískil kann vera á herdum krøvum. Til ber eisini at siga, at tað ikki neyðturviliga er eitt endamál í sjálvum sær, at vit í Føroyum nýta somu støddarmørk sum í Danmark og í ES.

Hinvegin eru støddarmørkini í stóran mun avgerandi fyri, hvussu nógvar umsitingarligar byrðar verða álagdar føroyskum fyritøkum í ársroknskaparhøpi, og kunnu eitt nú atlit til kappingarføri tala fyri, at reglurnar í Føroyum ikki eiga at vera strangari enn í Danmark og í ES. Eisini ber til at nevna, at innihaldsligu ískoytiskrøvini til hægru roknskaparflokkarnar í ársroknskaparlógini eru myndaði uppá fyritøkur, sum eru at meta sum miðalstórar ella stórar, í donskum og/ella í ES-høpi.

Uttanríkis- og vinnumálaráðnum kunnugt er tað ikki gjørd nøkur kanning av, hvør tørvurin er, ella av møguligum meirvirði, sum stendst av at hava strangari roknskaparlóggávu í Føroyum, samanborið við minstukrøvini í ES til sambæriligar fyritøkur. Talan er um umsitingarlig krøv, sum kunnu vera rættiliga krevjandi fyri føroyskar fyritøkur, sum kunnu blíva fevndar av reglunum fyri hægru roknskaparflokkarnar. Uttanríkis- og vinnumálaráðið metir ikki, at tað er skynsamt, at eitt nú nakrar fyritøkur í Føroyum, sum við somu lyklatølum í Danmark og í ES, vildu verið smáar ella miðalstórar fyritøkur, í Føroyum skulu vera kravdar eftir einari ársfrásøgn fyri miðalstórar ella stórar fyritøkur.

Skotið verður tískil upp at hækka støddarmørkini samsvarandi mest loyvdu støddarmørkum sambært ES-roknskapardirektivinum, soleiðis at fyritøkur frameftir skulu hava nakað hægri nettosølu og fíggjarjavna áðrenn tær koma í ein hægri roknskaparflokk, har krøvini til ársroknskapin eru meiri umfatandi. Uppskotið er víst í talvuni niðanfyri:

Talva 5: Galdandi støddarmørk, uppskot til støddarmørk og galdandi støddarmørk í Danmark

Lýsing	Fíggjarjavni	Nettosøla	Ársverk
Roknskaparflokkur D, børsskrásettar og landspartafeløg (reglurnar fyri landspartafeløg eru ikki settar í gildi)	N/A	N/A	N/A
Roknskaparflokkur C, stór FO 2009 **FO 2025** DK 2024	 >143 mió. kr. **>195 mió. kr.** >195 mió. kr.	 >286 mió. kr. **>391 mió. kr.** >391 mió. kr.	 >250 (galdandi)
Roknskaparflokkur C, miðal FO 2009	 143 mió. kr.	 286 mió. kr.	 250

[15]Sí direktiv (EU) 2023/2775 af 17. oktober 2023 om ændring af Europa-Parlamentets og Rådets direktiv 2013/34/EU for så vidt angår justeringer af størrelseskritetrierne for mikrovirksomheder, små, mellemstore og store 21 virksomheder eller koncerner (delegeret direktiv om forhøjelse af størrelsesgrænser).
[16] Sí lov nr. 480 af 22/05/2024.

FO 2025 DK 2024	**195 mió. kr.** 195 mió. kr.	**391 mió. kr.** 391 mió. kr.	(galdandi)
Roknskaparflokkur B FO 2009 **FO 2025** DK 2024	 36 mió. kr. **55 mió. kr.** 55 mió. kr.	 72 mió. kr. **111 mió. kr.** 111 mió. kr.	 50 (galdandi)

Ársroknskaparlógin ásetir harumframt støddarmørk fyri frávali av grannskoðan av ársfrásøgnini, umframt støddarmørk fyri at velja at nýta váttanarstandard Skráseting Føroya (víðkaða gjøgnumgongd) heldur enn grannskoðan. Hesi støddarmørk viðvíkja ikki beinleiðis innihaldsligu krøvunum, sum verða sett til ársfrásagnirnar hjá fyritøkunum, og er, hesi støddarmørk tískil viðgjørd fyri seg undir broti 1.3.5.

1.3.3.2 Støddarmørk viðvíkjandi grannskoðan av ársfrásøgnini
Ársroknskaparlógin inniheldur reglur um, at minstu fyritøkurnar í roknskaparflokki B kunnu velja grannskoðan av ársfrásøgnini frá, og at smáar fyritøkur í roknskskaparflokki B, har grannskoðan er kravd, í staðin kunnu velja at nýta avmarkaða váttanarstandard Skráseting Føroya (víðkaða gjøgnumgongd).

Til ber at siga, at meðan støddarmørkini fyri roknskaparflokkarnar eru avgerandi fyri, hvussu nógv innihaldslig krøv verða sett fyritøkunum, so eru støddarmørkini fyri frávali av grannskoðan og víðkaða gjøgnumgongd avgerandi fyri eftirlitið við, at upplýsingarnar í ársfrásøgnum hjá fyritøkum í roknskaparflokki B geva eina rættvísandi mynd.

Í Danmark vórðu støddarmørkini fyri frávali av grannskoðan hækkaði í 2010, til mest loyvdu støddarmørk sambært ES-roknskapardirektivinum[17]. Tá ið reglurnar um at nýta víðkaða gjøgnumgongd heldur enn grannskoðan vórðu settar í gildi í Danmark í 2012[18], var valmøguleikin gjørdur galdandi fyri allar fyritøkur í roknskaparflokki B. Tá ið víðkað gjøgnumgongd varð sett í gildi í Føroyum sum valmøguleiki í 2015, vórðu nøkur serføroysk støddarmørk sett í gildi, sum avmarkað hendan valmøguleika[19]. Hækkanin av serliga støddarmarkinum fyri frávali av grannskoðan elvdi til ávíst kjak í Danmark, serliga í mun til møgulig neilig árin á álitið á upplýsingarnar í ársfrásøgnunum hjá smáum fyritøkum. Eisini varð víst á møguliga óbeinleiðis neiliga ávirkan á eftirlitið við vinnufyritøkum á skatta- og avgjaldsøkinum. Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur skilt, at eftirmetingarnar vísa, at broytingarnar sannlíkt hava havt við sær færri neiligar avleiðingar fyri skattliga eftirlitið, enn hildið varð í 2009-2010, tó at tað ikki hevur borið til at koma fram til eina neyva niðurstøðu hesum viðvíkjandi.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur mett um tørvin at hækka hesi støddarmørk í Føroyum. Um hesi støddarmørk verða hækkaði, so er hugsandi, at fleiri fyritøkur í framtíðini fara at velja grannskoðan av ársfrásøgnini frá, og at fleiri fyritøkur fara at velja víðkaða gjøgnumgongd heldur enn grannskoðan. Verða støddarmørkini hækkaði nógv, so verður talið av fyritøkum høgt, tí flestu fyritøkurnar í Føroyum eru smáar fyritøkur í roknskaparflokki B. Hetta fer at bera við sær fleiri jaligar figgjarligar og umsitingarligar avleiðingar fyri eitt stórt tal av fyritøkum, sum til fulnar velja at nýta møguleikan at velja grannskoðan frá ella at nýta víðkaða gjøgnumgongd heldur enn fulla grannskoðan.

[17] Sí lov nr. 720 af 25/06/2010.
[18] Sí § 1, nr. 3 í lov nr. 1232 af 18/12/2012.
[19] Sí løgtingslóg nr. 50 frá 12. mai 2015 um broyting í ársroknskaparlógini.

Hinvegin kann tað ikki útihýsast, at møguligar hækkingar av hesum støddarmørkum fara at merkja, at góðskan á upplýsingunum í ársfrásøgnunum hjá minstu fyritøkunum lækkar, og at upplýsingarnar tískil ikki vera eins álítandi í framtíðini. Hetta kann hugsast at hava neilig árin á roknskapareftirlitið hjá Skráseting Føroya og, óbeinleiðis, á eftirlitið við skatta- og avgjaldsupplýsingunum hjá vinnufyritøkum. Havast skal eisini í huga, at hóast talan er um smáar fyritøkur í roknskaparflokki B, so fevnir hesin roknskaparflokkur um fleiri enn 95% av øllum fyritøkum, sum eru fevndar av ársroknskaparlógini.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið metir tað vera skynsamt, at vísa varsemi tá ið umræður støddarmørkini fyri eftirlitið við roknskaparupplýsingum hjá fyritøkum í roknskaparflokki B. Hetta ger seg galdandi bæði í mun til at loyva fleiri fyritøkum í roknskaparflokki B at velja grannskoðan av ársfrásøgnini frá, og í mun til at loyva smáum fyritøkum at nýta víðkaða gjøgnumgongd heldur enn grannskoðan. Í uppskotinum verður tískil skotið upp at gera eina millumloysn, soleiðis at hesi støddarmørk verða hækkaði. Øvut tí, sum er skotið upp viðvíkjandi støddarmørkunum fyri roknskaparflokkarnar, verður mælt til ikki at hækka hesi støddarmørk eins nógv sum í Danmark og í ES.

Uppskotið hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum sæst í talvuni niðanfyri.

Talva 6: Galdandi støddarmørk, uppskot til støddarmørk og galdandi støddarmørk í Danmark

Lýsing	**Fíggjarjavni**	**Nettosøla**	**Ársverk**
Frával av grannskoðara FO 2015 **FO 2025** DK/ES 2024	1 mió. kr. **1,25 mió. kr.** 4 mió. kr.	2 mió. kr. **2,5 mió. kr.** 8 mió. kr.	12 (galdandi)
Víðkað gjøgnumgongd FO 2015 **FO 2025** DK 2024	12 mió. kr. **15 mió. kr.** Roknskaparflokkur B	24 mió. kr. **30 mió. kr.** Roknskaparflokkur B	15 (galdandi) Roknskaparflokkur B

Galdandi støddarmørk í Føroyum fyri frával av grannskoðan og víðkaða gjøgnumgongd, eru ásett við løgtingslóg nr. 50 frá 12. mai 2015 um broyting í ársroknskaparlógini. Skotið verður upp at prístalsjavna støddarmørkini fyri fíggjarjavna og nettosølu samsvarandi prístalsvøkstrinum, sum hevur verið í Føroyum í tíðarskeiðnum frá februar 2015 til februar 2025. Hetta er gjørt omanfyri, og eru úrslitini rundaði upp.

1.3.4 Ymiskar aðrar broytingar

1.3.4.1 Serligar reglur um fíggjarligar inntøkur í holdingfeløg og íløgufyritøkur

Skotið verður upp at áseta í § 7, stk. 4, at í holdingfeløgum og íløgufyritøkum, har fíggjarligar inntøkur í minsta lagi svara til nettosøluna, skulu fíggjarinntøkur takast við í nettosøluna, tá ið metast skal um, hvønn roknskaparflokk, felagið ella fyritøkan skal gera ársfrásøgn fyri. Mett verður, at hetta er neyðugt, tí at talan kann vera um feløg og fyritøkur við munandi íløgum, men av tí, at eingin nettosøla er, og vanliga bert fá starvsfólk, verða hesar fyritøkur flokkaðar í roknskaparflokk B eftir galdandi reglum.

1.3.4.2 Upplýsingar um nettosøluna

Í § 32 í galdandi ársroknskaparlóg er ásett, at smáar og miðalstórar fyritøkur kunnu lata vera við at geva upplýsingar um nettosøluna. Orsøkin er, at mett verður, at alment innlit í

upplýsingar um nettosøluna kunnu hava neiligar avleiðingar fyri hesar fyritøkur, heruppií í mun til teirra kappingarstøðu. Undantaksásetingin er objektiv, t.e. at allar fyritøkur, sum ikki fara upp um ávís støddarmørk kunnu velja at nýta undantakið, uttan at skula grundgeva fyri hesum við ítøkiligum viðurskiftum.

Upplýsingar um nettosøluna eru, saman við upplýsingum um figgjarjavnan og miðaltalið av heiltíðarsettum starvsfólkum í fyritøkuni avgerandi fyri, hvønn roknskaparflokk fyritøkan skal gera ársfrásøgn fyri, hvørji innihaldslig krøv verða sett til ársfrásøgnina, um hon skal grannskoðast, o.a. Í løtuni fær Skráseting Føroya tó ikki upplýsingarnar um nettosøluna fyri smáar og miðalstórar fyritøkur, og hetta merkir, at stovnurin noyðist at krevja leiðsluna í fyritøkum eftir upplýsingunum, so hvørt fyritøkur verða tiknar út til stakroyndaeftirlit.

Skotið verður upp at áseta í § 161, stk. 6, at heimilað verður landsstýrisfólkinum at áseta nærri reglur um, at smáar og miðalstórar fyritøkur, sum ikki hava upplýst um nettosøluna í rakstrarroknskapinum, skulu lata Skráseting Føroya upplýsingar um nettosøluna. Í Danmark verður hetta gjørt á tann hátt, at fyritøkur, sum velja ikki at almannakunngera upplýsingarnar í ársfrásøgnini, skulu lata Erhvervsstyrelsen eitt serskilt skjal, har nettosølan verður upplýst. Uppskotið ber við sær, at landsstýrisfólkið kann gera av at áseta líknandi reglur í kunngerð, heruppií í hvørjum talgildum sniði upplýsingarnar skulu latast Skráseting Føroya. Tó er endalig avgerð enn ikki tikin um, hvør leistur eigur at verða nýttur.

Uppskotið hevur ikki til endamáls at skúgva til viks tey atlit, sum liggja til grund fyri, at smáar og miðalstórar fyritøkur kunnu velja ikki at almannakunngera upplýsingar um nettosøluna í ársfrásøgnini. Tískil er neyðugt at áseta, at um landsstýrisfólkið ger av at brúka heimildina, so verða upplýsingarnar um nettosøluna latnar Skráseting Føroya í trúnaði, og eru reglurnar í løgtingslóg um innlit í fyrisitingina ikki galdandi fyri upplýsingar um nettosøluna. Hetta fyri at tryggja, at eitt nú kappingarneytar heldur ikki frameftir kunnu fáa innlit í upplýsingarnar um smáar og miðalstórar fyritøkur, sum ikki eru kravdar í ársfrásøgnini.

Landsstýrisfólkið kann harumframt áseta nærri reglur um tagnarskyldu fyri starvsfólk hjá Skráseting Føroya í hesum sambandi, og um revsing fyri brot á hesa tagnarskyldu.

Um ein fyritøka, sum nýtir undantaksheimildina, ikki letur Skráseting Føroya upplýsingarnar um nettosøluna samsvarandi teimum reglum, sum eru galdandi, so kann hetta merkja, at ársfrásøgnin verður avvíst, heruppií sjálvvirkandi í sambandi við talgilda innlating, og/ella at Skráseting Føroya kann nýta vanligu mannagongdirnar til tess at fáa kravdar upplýsingar til vegar, heruppií áleggja tvingilsavgjald, tvingsilsbót ella, um ongi onnur ráð eru, heita á skiftirættin um at tvingsilsavtaka felagið ella fyritøkuna.

1.3.4.3 Kravið um føroyskt ella danskt mál í ársfrásøgnini

Eftir galdandi ársroknskaparlóg skulu ársfrásagnir og onnur skjøl verða orðað á føroyskum ella á donskum máli. Hetta skal helst síggjast í tí ljósi, at sambært § 11 í heimasstýrislógini er føroyskt høvuðsmálið í Føroyum, men danskt kann nýtast í "almennum viðurskiftum", eins væl og føroyskt. Ársfrásagnir, sum verða latnar Skráseting Føroya til almannakunngeringar, skulu sostatt orðast á føroyskum ella á donskum, ella í minsta lagi eisini á einum av hesum málum.

Kravið um at nýta føroyskt ella danskt mál í ársfrásøgnini er galdandi fyri allar fyritøkur, heruppií fyri smáar og miðalstórar fyritøkur, sum eru skrásettar í Føroyum. Fyri hesar fyritøkur

er tað helst eisini viðkomandi at seta sum treyt, at ársfrásøgnin skal vera orðað á einum av hesum málum, tí flestu roknskaparbrúkararnir mugu haldast at vera føroyingar.

Ein serstøk avbjóðing stingur seg tó upp viðvíkjandi størstu fyritøkunum í roknskaparflokki D, sum eru skrásettar í Føroyum, men sum eisini eru skrásettar á einum keypsskála uttanlands. Í slíkum førum er tað vanligt, at viðkomandi land og keypsskáli seta sum treyt, at ársfrásøgnin skal vera orðað á enskum máli, eins og roknskaparbrúkararnir hjá slíkum fyritøkum vanliga nýta og skilja enskt mál.

Í løtuni eru tríggjar fyritøkur, sum eru skrásettar í Føroyum, sum eisini eru skrásettar á keypsskálum í útlandinum, og av hesum eru einans tvær fyritøkur fevndar av ársroknskaparlógini[20]. Hesar fyritøkur skulu vanliga gera eina ársfrásøgn á enskum máli, sum verður latin myndugleikunum og keypsskálanum í hesum landi, og síðani lata Skráseting Føroya eina ársfrásøgn á føroyskum ella á donskum máli. Tað hevur víst seg at vera rættiliga avmarkandi fyri hesar fyritøkur, at ofta rættiliga umfatandi ársfrásagnirnar, bæði skulu orðast á enskum og á føroyskum. Í praksis kann hetta merkja, at fyritøkurnar mugu seta munandi umsitingarliga orku av til at týða ensku ársfrásøgnina, sum frammanundan er latin keypsskálanum og er almannakunngjørd, til føroyskt. Til samanberingar kann nevnast, at allar danskar fyritøkur kunna nýta enskt mál í ársfrásøgnini og líknandi skjølum.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið metir, at ársroknskaparlóggávan í Føroyum eigur at geva fyritøkum, sum eru skrásettar í Føroyum, so góðar sømdir sum til ber, í mun til at vera skrásettar á keypsskála. Til ber ikki at broyta reglurnar, sum eru galdandi í tí landi, sum føroyskar fyritøkur eru skrásettar á keypsskála í, men til ber at broyta reglurnar í ársroknskaparlógini, soleiðis at fyritøkur, sum eru skrásettar í Føroyum, og sum eisini eru skrásettar á einum keypsskála, fáa somu sømdir, sum eru galdandi fyri fyritøkur, sum eru skrásettar í eitt nú Danmark, sí § 138, stk. 3 í donsku årsregnskabsloven

Skotið verður tískil upp at áseta í § 188, stk. 2, at landsstýrisfólkinum verður heimilað at áseta reglur um, á hvørjum máli fyritøkur og samtøkur, sum hava virðisbrøv upptikin til handils á einum reguleraðum marknaði í Føroyum ella í einum ES/EBS-landi, skulu lata ársfrásagnir, partaársfrásagnir umframt onnur skjøl eftir ársroknskaparlógini til Skráseting Føroya á. Við uppskotnu broytingini verður latið upp fyri, at landsstýrisfólkið kann gera av, at fyritøkur, sum eru skrásettar í Føroyum, og sum eisini eru skrásettar á einum keypsskála, skulu kunna velja at nýta enskt mál heldur enn føroyskt, á sama hátt sum líknandi danskar fyritøkur kunnu velja at nýta enskt mál heldur enn danskt.

1.3.4.4 Serligt um eftirlitið við fyritøkum, sum hava virðisbrøv upptikin til handils á einum reguleraðum marknaði í Føroyum

Ásett er í § 159 a í galdandi ársroknskaparlóg, at Fondsrådet (í dag Finanstilsynet) hevur eftirlit við fyritøkum, sum hava virðisbrøv upptikin til handils á einum reguleraðum marknaði *í Føroyum*. Keypsskálar (børsar) o.tíl. eru tó fevndir av fíggjarlóggávuni, sum er ikki-yvirtikið málsøki. Samsvarandi áseting í galdandi donsku årsregnskabslov (§ 161 a) ásetir eins og galdandi áseting í føroysku ársroknskaparlógini, at Finanstilsynet hevur eftirlit við slíkum fyritøkum, men at Erhvervsstyrelsen, sum svarar til Skráseting Føroya, eisini hevur fleiri eftirlitsuppgávur í hesum sambandi, og í støðum kemur í staðin fyri Finanstilsynet.

[20]P/F Bakkafrost og P/F Atlantic Petroleum eru fevndar av ársroknskaparlógini, meðan P/F Føroya Banki er fevndur av lov om finansiel virksomhed.

Ásetingin hevur í løtuni ikki praktiskan týdning, tí ongin reguleraður marknaður (keypsskáli/børsur, o.tíl) er í Føroyum, og tískil heldur ikki nøkur fyritøka, sum er skrásett á einum slíkum marknaði. Grundarlagið fyri slíkum virksemi í Føroyum er helst lítið. Tó metir Uttanríkis- og vinnumálaráðið seg ikki við vissu kunna útihýsa, at hendan eftirlitsáseting ikki kann vera viðkomandi í framtíðini. Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur tískil skotið upp, at galdandi áseting í § 159 a verður týdd til føroyskt, og at "Fondsrådet" verður broytt til "Finanstilsynet". Tó skal fyrivarni takast fyri, av tí at talan er um málsøki, sum ikki er yvirtikið, skal uppskotni leisturin sendast ríkismyndugleikunum til støðutakan.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Samanumtikið verður skotið upp at gera hesar broytingar:

- Nýggj ársroknskaparlóg verður orðað á føroyskum máli.
- Ársroknskaparlógin verður tillagað til nýggja roknskapardirektivið hjá ES (direktiv 2013/34/EU, við seinni broytingum), umframt nýggjastu IFRS-standardar. Hendan broyting fevnir um fleiri roknskapartekniskar broytingar, sum eitt nú eru umrøddar í brotinum omanfyri.
- Nakrir umsitingarligir lættar verða gjørdir fyri fyritøkurnar, heruppií serliga at støddarmørkini í ársroknskaparlógini verða hækkað. Frameftir skal eitt sindur meira til, fyrr enn føroyskar fyritøkur verða fevndar av mest umfatandi ískoytiskrøvunum í ársroknskaparlógini. Fyri holdingfeløg og íløgufyritøkur, har fíggjarligar inntøkur í minsta lagi svara til nettosøluna, skulu fíggjarinntøkur tó takast við í nettosøluna, tá ið metast skal um, hvønn roknskaparflokk, felagið ella fyritøkan skal gera ársfrásøgn fyri.
- Allar fyritøkur, sum eru fevndar av ársroknskaparlógini, skulu frameftir lata upplýsingar um miðaltalið av heiltíðarsettum starvsfólkum í roknskaparárinum.
- Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um, at fyritøkur, sum eru fevndar av ársroknskaparlógini, frameftir lata Skráseting Føroya upplýsingar um nettosøluna. Komið er enn ikki á mál við endaliga leistinum fyri, hvussu hendan fráboðan kann fara fram, men Uttanríkis- og vinnumálaráðið leggur seg eftir at finna eina skynsama loysn, ið ikki er ov byrðandi fyri fyritøkurnar, sum skulu fráboða upplýsingarnar.
- Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur fyri fyritøkur, sum eru skrásettar á einum keypsskála, frameftir kunnu lata ársfrásøgnina inn til Skráseting Føroya á enskum máli.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið hevur verið til ummælis hjá Felagnum Føroyskir Grannskoðarar, Advokatfelag Føroya, Vinnuhúsinum, Skráseting Føroya, Grannskoðaraeftirlitinum, Tryggingareftirlitinum, TAKS, Fíggjarmálaráðnum, P/F Atlantic Petroleum, P/F Bakkafrost, Felaganum Peningastovnar, Finanstilsynet og hjá føroysku peningastovnunum.

Harumframt hevur uppskotið ligið frammi á heimasíðuni hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum og á ummælisportalinum.

Inn komu hesi ummælisskriv:

1.5.1 Felagið Føroyskir Grannskoðarar

Felagið Føroyskir Grannskoðarar tekur yvirskipað undir við uppskotinum, og hevur nakrar innihaldsligar viðmerkingar. Eitt nú ynskir felagið at tað eigur at verða nágreinað í § 7 í

uppskotinum um ásetingin merkir, at verandi almennu partafeløg eru at meta sum landspartafeløg, og harvið verða fevnd av ásetingunum í lógaruppskotinum um roknskaparflokk D og hálvársfrásøgn.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur hesar viðmerkingar til ummælisskrivið frá Felagnum Føroyskir Grannskoðarar:

Flestu viðmerkingarnar eru tiknar til eftirtektar.

Viðvíkjandi spurninginum um landspartafeløg er tað fatanin hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, at almennu partafeløgini (landspartafeløgini) einans koma inn undir reglurnar í roknskaparflokki D og krav um hálvársfrásøgn um hetta er ásett við heimild í § 303 í vinnufelagalógini. Slíkar reglur eru ikki ásettar í løtuni, og koma almennu partafeløgini tískil ikki undir hesar reglur, hvørki eftir galdandi ársroknskaparlóg ella eftir hesum uppskoti.

Viðvíkjandi vali av at nýta hugtakið "fyritøkukapitalur" heldur enn "felagskapitalur" skal Uttanríkis- og vinnumálaráðið viðmerkja, at í uppskotinum er valt hugtakið "fyritøka" heldur enn "felag" (kapitalfelag). Orsøkin til hetta er, at mett verður at "fyritøkukapitalur" er breiðari hugtak sum endurspeglar, at ikki einans kapitalfeløg eru fevnd av ársroknskaparlógini. Í allýsingini av hugtakinum í skjali 1 til uppskotið (síða 59) verður tó eisini sipað til hugtakið "felagskapitalur" tá ið umræður kapitalfeløg. Uttanríkis- og vinnumálaráðið heldur tískil, at hóast formliga hugtakið er "fyritøkukapitalur" sambært skjali 1 og 2 til uppskotið, so kann "felagskapitalur" í praksis nýtast í ársfrásøgnum og øðrum skjølum fyri kapitalfeløg í staðin.

1.5.2. Føroya Arbeiðsgevarafelag/Vinnuhúsið
Yvirskipað tekur Føroya Arbeiðsgevarafelag undir við, at ársroknskaparlógin verður dagførd og orðað á føroyskum máli.

Føroya Arbeiðsgevarafelag tekur undir við, at støddarmørkini í Føroyum ikki skulu vera lægri enn galdandi støddarmørk í ES og í Danmark, soleiðis at strangari roknskaparkrøv verða sett til føroyskar fyritøkur samanborið við fyritøkur við somu stødd í hesum londum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag viðmerkir, at í Danmark kunnu allar fyritøkur í roknskaparflokki B velja víðkaða gjøgumgongd heldur enn fulla grannskoðan, og at eftirmetingin hjá Erhvervsstyrelsen frá 2018 vísir, at hetta sannlíkt ikki hevur borið við sær neiligar avleiðingar fyri góðskuna í roknskaparupplýsingunum, og at hetta hevur spart donskum fyritøkum áleið 1,6 mia. kr. í grannskoðaraútreiðslum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag tekur somuleiðis undir við, at ársfrásøgnin og onnur skjøl kunnu vera á øðrum máli enn føroyskum og donskum, men heldur at hetta átti at verið galdandi fyri allar fyritøkur, og ikki einans fyri børsskrásettu fyritøkurnar. Harumframt átti broytingin viðvíkjandi málkravinum at verið ásett beinleiðis í løgtingslógini, heldur enn í kunngerð, sum skotið verður upp.

Føroya Arbeiðsgevarafelag metir tað harumframt vera skilagott, at reglurnar um burðardygdarfrágreiðingar ikki verða tiknar við í uppskotið í hesum umfari, eitt nú vísandi til, at ES er farið í holt við at endurskoða sínar reglur á hesum øki við atliti til at gera tær minni umsitingartungar fyri fyritøkur.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur hesar viðmerkingar til ummælisskrivið frá Føroya Arbeiðsgevarafelag:

Uppskotið ber við sær, at fleiri broytingar verða gjørdar í føroysku ársroknskaparlógini, soleiðis at reglurnar um figgjarligar frágreiðingar fyri vinnurekandi fyritøkur í Føroyum í høvuðsheitinum fara at samsvara við reglurnar, sum eru galdandi í ES og í Danmark.

Samstundis hevur dentur verið lagdur á, at umsitingarligu byrðarnar fyri føroyskar fyritøkur sum heild skulu gerast færri samanborið við galdandi ársroknskaparlóg, hetta eitt nú við at hækka støddarmørkini fyri roknskaparflokkarnar. Hini støddarmørkini, t.e. mørkini fyri at kunnu velja víðkaða gjøgnumgongd heldur enn fulla grannskoðan, umframt støddarmørkini fyri frávali av grannskoðan av ársfrásøgnini, verða somuleiðis hækkaði, tó at tað er rætt, at krøvini á hesum øki framvegis verða eitt sindur strangari samanborið við eitt nú í Danmark.

Í sambandi við fyrireikingina av uppskotinum hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið fyrihildið seg til tær eftirmetingarnar, sum vórðu gjørdar í Danmark, eitt nú tá ið nevndu støddarmørk vórðu hækkaði. Stundir hava ikki verið til at kanna nærri, í hvønn mun hesi viðurskifti eru neyvt sambærilig við viðurskiftini í Føroyum, men yvirskipað kann viðmerkjast, at ársroknskaparlóggávan hongur neyvt saman við aðrari lóggávu á vinnufelagaøkinum, og eru fleiri broytingar gjørdar á hesum øki í Danmark seinastu árini, sum ikki eru framdar í Føroyum. Uttanríkis- og vinnumálaráðið metir, at hetta talar fyri, at fara hóvliga fram, tá ið tað nú verður skotið upp at gera rættiliga nógvar broytingar á ársroknskaparøkinum. Um roknskapar- og grannskoðarakrøvini til føroysku fyritøkurnar skulu linkast enn meira enn tað, sum verður skotið upp í hesum uppskoti, so metir Uttanríkis- og vinnumálaráðið at hetta eigur at verða viðgjørt í einum størri høpi, har hædd eisini verður tikin fyri teimum broytingum, sum eru gjørdar á vinnufelagaøkinum í Danmark. Í hesum sambandi er eisini neyðugt at atlit verða tikin til, at figgjarligar upplýsingar um vinnurekandi fyritøkur í Føroyum skulu vera álítandi, at nøktandi eftirlit er við slíkum frágreiðingum, og at skipanin á roknskaparøkinum ikki verður fyri ov nógvum broytingum samstundis.

Viðvíkjandi málkravinum er tað áskoðanin hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, at tørvurin á t.d. at kunna velja enskt mál heldur enn føroyskt mál í ársfrásøgnum og øðrum skjølum, ikki er tann sami, tá ið talan er um stórar fyritøkur, sum eru skrásettar á keypsskála uttanlands, og sum vanliga hava skyldu at lata keypsskálanum ársfrásagnir og onnur skjøl á enskum máli, samanborið við vanligu føroysku fyritøkuna í roknskaparflokki B, har slíkt krav ikki er galdandi. Mett verður, at fyri flestu fyritøkurnar í Føroyum er roknskaparbrúkarin føroyingar og føroyskar fyritøkur, og kann tað vera rættiliga ymiskt, hvussu góðan kunnleika hesi hava til eitt nú enskt roknskaparmál.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur framhaldandi ta áskoðan, at støddarmørkini fyri vali av víðkaðari gjøgnumgongd og frávali av grannskoðan av ársfrásøgnini, umframt málkravið ikki eiga at verða fyri fleiri broytingum enn teimum, sum skotið verður upp í hesum umfari. Mett verður, at hesir spurningar krevja eina nærri viðgerð og gjarna at uppskotna skipanin hevur verið virkin í eina tíð, soleiðis at ein eftirmeting kann verða gjørd, heruppií av tørvinum á at gera fleiri linkingar á roknskapar- og grannskoðanarøkinum í Føroyum, og hvussu hetta atlit skal vektast upp ímóti teimum atlitum, sum eru umrødd omanfyri.

1.5.3. Advokatfelag Føroya
Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur sent uppskotið til ummælis hjá Advokatfelag Føroya. Advokatfelag Føroya hevur sent uppskotið til ummælis hjá føroyskum advokatunum.

Bjørn á Heygum, advokatur, viðmerkir, at hann metir tað vera skynsamt, at reglurnar um ymiskar ikki-fíggjarligar frágreiðingar í ársfrásøgnum verða tiknar við í uppskotinum. Annfinn V. Hansen, advokatur, sigur seg vera samdan við Bjørn á Heygum og leggur afturat, at hann ikki dugir at síggja sakligar grundgevingarnar fyri, hví føroysku mørkini fyri grannskoðanarskyldu ikki fylgja somu mørkum sum í donsku årsregnskabsloven.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur hesar viðmerkingar:
Víst verður til viðmerkingarnar til ummælisskrivið frá Føroya Arbeiðsgevarafelag, brot 1.5.2.

1.5.4. Finanstilsynet
Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur samskift við Finanstilsynet um partarnar av uppskotinum, har sipað verður til "Fondsrådet", sum í dag svarar til Finanstilsynet. Finanstilsynet tekur fyrivarni fyri, at teksturin er orðaður á føroyskum, men metir annars ikki, at myndugleikin hevur viðmerkingar til uppskotnu broytingarnar.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur hesar viðmerkingar:
Talan er um málsligar/ritstjórnarligar broytingar, og ætlanin er sostatt ikki, at hetta skal bera við sær innihaldsligar broytingar í mun til galdandi ársroknskaparlóg. Víst verður annars til umrøðuna í broti 1.3.4.4. í uppskotinum.

1.5.5. Felagið Peningastovnar
Felagið Peningastovnar hevur ikki viðmerkingar til uppskotið.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum
2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ikki stórvegis fíggjarligar avleiðingar fyri landið. Uppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

Skráseting Føroya hevur ábyrgdina av myndugleikauppgávunum sambært galdandi ársroknskaparlóg. Í stóran mun inniheldur uppskotið somu ásetingar sum galdandi ársroknskaparlóg, og tí hevur uppskotið ikki stórvegis fíggjarligar avleiðingar fyri Skráseting Føroya.

Uppskotið ber við sær, at galdandi orðalisti og skipan fyri roknskapir, sum verður brúktur, tá ið ársroknskapir skulu latast inn talgilt (*taksonomi*), skal dagførast. Hetta merkir eingangsútreiðslur til serkøna ráðgeving, sum má fáast til vegar uttanhýsis, t.d. roknskaparserfrøðing og kt-ráðgeva (XBRL-arkitekt). Tað ber í løtuni ikki til at gera útreiðslurnar upp álítandi. Tó verður mett, at útreiðslurnar rúmast innanfyri verandi fíggjarkarmar hjá Skráseting Føroya.

Væntast kann, at Skráseting Føroya má seta meira orku av til roknskapareftirlit, tá nýggja ársroknskaparlógin fær gildi, sí frágreiðing í kap. 2.2.2. Harvið hevur uppskotið við sær nakað av fíggjarligum avleiðingum fyri Skráseting Føroya.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Skotið verður upp, at allar fyritøkur skulu upplýsa um miðaltalið av heiltíðarsettum starvsfólkum í roknskaparárinum, og at fyritøkurnar harumframt skulu lata Skráseting Føroya upplýsingar um nettosøluna. Talan er um upplýsingar um tvey av teimum trimum lyklatølum,

sum verða nýtt í sambandi við støddarmørkini í ársroknskaparlógini. Tískil verður mett, at hetta fer at styrkja roknskapareftirlitið hjá Skráseting Føroya.

Skotið verður upp at prístalsviðgera støddarmarkið fyri frávali av grannskoðan. Hetta merkir, at eitt sindur fleiri fyritøkur enn áður fara at kunna velja grannskoðan av ársfrásøgnini frá, og kann hetta hugsast at ganga út yvir góðskuna í upplýsingunum í ársfrásøgnini. Sostatt kann væntast, at Skráseting Føroya má seta meira umsitingarliga orku av til roknskapareftirlit.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Uppskotið hevur avleiðingar fyri vinnuna, í høvuðsheitinum fyri tær fleiri enn 4200 vinnurekandi fyritøkur, sum eru skrásettar hjá Skráseting Føroya. Avleiðingarnar eru økt krøv á summum økjum, og linkaði krøv á øðrum økjum. Yvirskipað er metingin hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum tó, at talan er um umsitingarligar lættar fyri flestu fyritøkurnar, sum eru skrásettar hjá Skráseting Føroya.

Millum øktu krøvini kann nevnast, at skotið verður upp, at allar fyritøkur frameftir skulu fráboða upplýsingar um miðaltalið av heiltíðarsettum starvsfólkum í roknskaparárinum (ársverk), at landsstýrisfólkið kann áseta reglur um, at fyritøkur, sum ikki upplýsa um nettosøluna í ársfrásøgnini, skulu lata Skráseting Føroya upplýsingar um nettosøluna, og at holdingfeløg og íløgufyritøkur, har fíggjarligar inntøkur í minsta lagi svara til nettosøluna, skulu taka fíggjarinntøkur við í nettosøluna, tá ið metast skal um, hvønn roknskaparflokk, felagið ella fyritøkan skal gera ársfrásøgn fyri.

Fleiri roknskapartekniskar ásetingar verða tillagaðar í mun til ES-roknskapardirektivið, og til IFRS-standardarnar. Tað er trupult at meta um, hvørt hesar broytingar ítøkiliga merkja fleiri ella færri umsitingarligar byrðar fyri føroyskar fyritøkur. Tó skulu nakrar umsitingarligar byrðar væntast fyri fyritøkur, sum í einari skiftistíð skulu tillaga sín roknskaparpraksis eftir nýggju reglunum. Kortini verður mett, at fleiri fyrimunir eru við at tillaga roknskaparlóggávuna til ES-roknskapardirektivið og nýggju IFRS-standardarnar, samanborið við ikki at gera tað.

Størsta einstaka linkingin í uppskotinum er uppskotna hækkingin av støddarmørkunum fyri roknskaparflokkarnar. Hendan broyting merkir, at tað frameftir skal meira til fyri at ein fyritøka verður fevnd av ískoytiskrøvunum, sum verða sett fyritøkum í roknskaparflokki C, miðal og C, stór. Krøvini til grannskoðan av ársfrásøgnini eru eisini meiri umfatandi, tá ið talan er um hægru roknskaparflokkarnar. Tískil kunnu summar fyritøkur fara at uppliva eina sparing í útreiðslunum til grannskoðan av ársfrásøgnini.

Prístalsviðgerðin av støddarmørkunum fyri frávali av grannskoðan kann fara at merkja nakrar umsitingarligar og fíggjarligar lættar fyri minstu fyritøkurnar í roknskaparflokki B. Fyri fyritøkur, sum liggja omanfyri hetta støddarmark, fer prístalsviðgerðin av støddarmarkinum fyri víðkaða gjøgnumgongd at vera ein fyrimunur. Hetta er sjálvsagt treytað av, at fyritøkurnar velja at nýta hesar møguleikar.

Aðrar linkingar, sum lagt verður upp til eru at fyritøkur, hvørs ábyrgdarhavandi leiðslustovnur einans er ein einstakur limur, tá ársfrásøgnin verður góðkend, kunnu lata vera við at taka eina leiðsluátekning við í ársfrásøgnini, at krøvini til frágreiðandi notur í ársroknskapinum fyri "smáfyritøkur" í roknskaparflokki B verða avmarkaði, og at landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um, at fyritøkur, sum eru skrásettar á einum keypsskála, kunnu lata ársfrásøgnina til Skráseting Føroya á eitt nú enskum máli.

Samanumtikið verður mett, at uppskotið merkir umsitingarligar lættar fyri flestu fyritøkurnar, sum eru smáar fyritøkur í roknskaparflokki B, serliga fyri minstu fyritøkurnar í roknskaparflokki B. Fyri fyritøkur í roknskaparflokki C, miðal, kemur uppskotið at merkja, at tað skal meira til fyri at fyritøkan kemur upp í roknskaparflokk C, stór. Mett verður, at talan er um ein lætta, eisini hóast hetta fyrst og fremst verður viðkomandi fyri tær fyritøkur, sum verða raktar av hækkingini av støddarmarkinum, ella sum frammanundan lógu tætt uppat markinum.

Fyri størstu fyritøkurnar í roknskaparflokki C, stór fer uppskotið einans at bera við sær umsitingarligar lættar fyri tær fyritøkur, sum liggja tætt við niðara støddarmarkið fyri roknskaparflokkin. Tilsamans 34 fyritøkur gjørdu ársfrásøgn eftir reglunum fyri roknskaparflokk C, stór í 2023. Tað er ikki givið, at allar hesar fyritøkur framhaldandi skulu gera ársfrásøgn eftir reglunum fyri roknskaparflokk C, stór, um støddarmørkini verða hækkaði.

Fyri fyritøkur í roknskaparflokki D verður uppskotið mett at bera við sær umsitingarligar lættar, serliga viðvíkjandi uppskotnu broytingini av málkravinum í ársroknskaparlógini.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella sosialar avleiðingar fyri eitt ávíst øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir t.d. sosialar avleiðingar ella aðrar avleiðingar.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Lógaruppskotið fevnir ikki um øki, sum eru fevnd av millumtjóðasáttmálum, ið Føroyar hava skyldu at fylgja.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

1) Hoyvíkssáttmálin
Uppskotið verður mett at vera í samsvari við Hoyvíkssáttmálan.

2) Evropeiski mannarættindasáttmálin, EMRS
Uppskotið verður mett at vera í samsvari við Evropeiska mannarættindasáttmálan.

3) Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek
Uppskotið verður mett at vera í samsvari við Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

2.9. Markaforðingar
Uppskotið hevur ikki við sær kendar markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið inniheldur somu reglur um revsing, tvingsilsavgjøld, tvingsilsbøtur og tvingsilsavtøku, sum í dag eru ásettar í ársroknskaparlógini.

Sambært § 164 í ársroknskaparlógini kunnu brot á reglurnar í ársroknskaparlógini, ella reglum givnum við heimild í løgtingslógini, revsast við sekt, um ikki hægri revsing er uppiborðin sambært revsilógini. Revsirættarliga ábyrgdin í sambandi við at gera og lata ársfrásøgnina inn til Skráseting Føroya, liggur sum byrjanarstøði hjá leiðsluni í fyritøkuni, uppskotnu § 9 og allýsingini í skjali 1, A, nr. 6. Tað kann tó ikki heilt útihýsast, at tað í nøkrum førum verður viðkomandi at revsa fyritøkuna sjálva í sambandi við brot. Feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar, kunnu tískil revsast sambært reglunum í kapittul 5 í revsilógini.

Limir í leiðsluni og/ella nevndini kunnu eitt nú revsast við sekt, um so er, at teir hava latið vera við at latið ársroknskapin og ein møguligan samtaksroknskap grannskoða, uttan at treytirnar fyri hesum eru loknar. Somuleiðis kunnu hesir persónar revsast við sekt um so er, at teir hava latið ein persón, sum ikki er góðkendur grannskoðari sambært grannskoðaralógini, vátta ársroknskapin ella ein møguligan samtaksroknskap. Persónurin ella persónarnir, sum hava latið slíkar váttanir, verða somuleiðis revsaðir við sekt. Sum dømi um brot á revsilógina, sum kunnu vera viðkomandi í sambandi við ársroknskaparlógina, kunnu eitt nú nevnast ásetingarnar um skuldarsvik ella fíggjarsvik. Eisini eru ásetingarnar í revsilógini viðkomandi í førum, har tað í ársroknskaparlógini er krav um váttan frá leiðsluni.

Fyrningarfreistin í sambandi við brot á ársroknskaparlógina og reglur, sum eru ásettar við heimild í ársroknskaparlógini, er 5 ár.

Ársroknskaparlógin inniheldur ikki reglur um fyristingarligar sektir. Tó kann Skráseting Føroya, við heimild í § 151 og § 162 í galdandi ársroknskaparlóg, áleggja fyritøkum og limum í evstu leiðsluni tvingsilsavgjøld ella tvingsilsbøtur, um hesi ikki halda skyldur sínar sambært ársroknskaparlógini. Talan er ikki um revsing, men um tvingsilsinntriv, sum hava til endamáls at fáa leiðsluna í fyritøkuni at akta boðum, ella at fáa ávís viðurskifti í rættlag. Tey viðurskifti, sum kunnu elva, at Skráseting Føroya áleggur fyritøkum ella limum í evstu leiðsluni tvingsilsavgjald ella tvingsilsbót eru millum annað, at fyritøkan ikki letur Skráseting Føroya ársfrásøgnina inn rættstundis ella í tí standi, sum er kravdur sambært ársroknskaparlógini, ella at fyritøkan ikki vil lata Skráseting Føroya upplýsingar, sum myndugleikin hevur heimild til at krevja. Avgjøld og bøtur, sum eru persónlig, kunnu innheintast við panting í fútarættinum.

Fleiri mál eru á hvørjum ári, har fyritøkur ikki lata Skráseting Føroya ársfrásøgnina rættstundis, ella í tí standi, sum er kravdur sambært ársroknskaparlógini. Tískil eru eisini fleiri mál, har fyritøkur ikki fáa hesi viðurskifti í rættlag innan ta freist, sum Skráseting Føroya ásetir eftir § 151, og tískil verða tvingsilsavgjøld áløgd. Mett verður, at reglurnar, sum eru umrøddar omanfyri, eru neyðugar til tess at tryggja, at fyritøkur halda skyldur sínar sambært ársroknskaparlógini. Tískil verður mett neyðugt at føra hesar reglur víðari við uppskotnu § 178 og § 199.

Galdandi ársroknskaparlóg heimilar Skráseting Føroya at heita á skiftirættin at avtaka fyritøkur, sum ikki halda nakrar grundleggjandi skyldur sambært ársroknskaparlógini, heruppií at lata ársfrásøgn inn rættstundis, og í tí standi, sum er kravdur eftir ársroknskaparlógini. Avtøka fer fram eftir reglunum, sum eru galdandi fyri fyritøkuna sambært tí lóggávu, sum er galdandi fyri fyritøkuna, tað er serliga vinnufelagalógin, vinnufyritøkulógin og lov om erhvervsdrivende fonde, sí eitt nú § 225 í vinnufelagalógini. Fyri fíggjarfyritøkur eru tær tillagingar galdandi, sum eru ásettar um avtøku av slíkum fyritøkum sambært løgtingslóg um tryggingarvirksemi, og lov om finansiel virksomhed. Skotið verður upp, at hetta verður ført víðari við uppskotnu § 200.

2.11. Skattir og avgjøld
Eftir galdandi ársroknskaparlóg kann Skráseting Føroya sum tvingilsmiðil áleggja likamligum og løgfrøðiligum persónum tvingsilsavgjald ella tvingsilsbøtur, um hesi ikki halda skyldur sínar mótvegis Skráseting Føroya. Í høvuðsheitinum er talan um, at fyritøkur ikki lata Skráseting Føroya eina ársfrásøgn ella eina undantaksváttan, ella at farið verður út um tær freistir, sum eru ásettar í lógini, og sum evsta leiðslan ella deildarleiðarin sambært lógini bera ábyrgdina fyri.

Tvingsilsavgjaldið, sum kann verða álagt evstu leiðslu og hvørjum deildarleiðara í skrásettum fyritøkum, um ársfrásøgnin ella undantaksváttanin fyri felagið er móttikin eftir freistina í áheitanini, er í mesta lagi 3.000 kr. fyri hvønn leiðslulim ella deildarleiðara, og verður hetta avgjald lækkað við møguligum tvingilsbótum, sum viðkomandi hevur rindað í sama tíðarskeiði, fyri ikki at lata ársfrásøgn ella undantaksváttan inn til Skráseting Føroya.

Til tess at tryggja, at evsta leiðslan og deildarleiðarar í skrásettum fyritøkum framhaldandi halda skyldur sínar mótvegis Skráseting Føroya, verður skotið upp, at verandi heimildir verða tiknar við í hesum uppskoti sum § 179 og § 199.

2.12. Gjøld
Eftir galdandi ársroknskaparlóg kann landsstýrisfólkið áseta nærri reglur um gjald fyri avrit av skjølum o.a. sum eru alment atkomulig sambært ársroknskaparlógini, fyri nýtslu av kt-skipan Skráseting Føroya, fyri ávísar veitingar sum ikki eru serligt prísásettar, umframt fyri rykkjaraskriv o.a. í sambandi við, at goldið er ov seint.

Landsstýrisfólkið kann eisini áseta reglur um ársgjald til Skráseting Føroya fyri umsiting og serligt kanningarvirksemi, fyri umsitining av vinnufelagaligu reglunum um kapitalfrágongd og lán til fyritøkuluttakarar og onnur lógarbrot í sambandi við kanning av ársfrásøgnum umframt fyri umsitingina í sambandi við, at roknskaparstandardar verða gjørdir og at altjóða standardar verða góðkendir.

Landsstýrisfólkið kann harumframt áseta reglur um, at fyritøkur, sum hava virðisbrøv upptikin til handils á einum regulerøðum marknaði í Føroyum ella í einum ES/EBS-landi, skulu gjalda ársgjald til Skráseting Føroya fyri serligt eftirlitsvirksemi í hesum sambandi. Heruppií kann landsstýrisfólkið áseta reglur um støddina av gjaldinum, um uppkrevjing og um at gjalda rykkjaragjald í sambandi við, at goldið verður ov seint.

Eftirlit Skráseting Føroya er inntøkufíggjað. Tískil verður mett neyðugt at føra hesar heimildir víðari í hesum uppskoti.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Galdandi ársroknskaparlóg áleggur løgfrøðiligum persónum skyldur, heruppií at fyritøkur, sum eru fevndar av ársroknskaparlógini skulu gera ársfrásøgn fyri undanfarna roknskaparárið. Harumframt skulu fyritøkur, undantikið minstu fyritøkurnar í roknskaparflokki B, lata ársfrásøgnina grannskoða av einum grannskoðara, sum er góðkendur sambært grannskoðaralógini. Um fyritøkan ikki heldur skyldur sínar sambært ársroknskaparlógini, so kann hetta bera við sær fylgjur, sum nevndar undir broti 2.10, sum sambært § 8 í galdandi ársroknskaparlóg (§ 9 í uppskotinum) kunnu gerast galdandi beinleiðis mótvegis likamligu persónunum í leiðsluni í fyritøkuni. Sostatt áleggur galdandi ársroknskaparlóg eisini likamligum persónum skyldur.

Lógaruppskotið førir hesar reglur víðari, og ásetir harumframt nøkur krøv til upplýsingar í ársfrásøgnini, sum leggjast afturat, heruppií at fráboða upplýsingar um miðaltalið av heiltíðarsettum starvsfólkum í roknskaparárinum, og at landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um at fráboða upplýsingar um nettosøluna.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?

Galdandi ársroknskaparlóg heimilar landsstýrisfólkinum at áseta nærri reglur um ymisk viðurskifti, sum viðvíkja ársroknskapinum hjá teimum fyritøkum, sum eru fevndar av kongligu fyriskipanini. Flestu av hesum heimildum eru nýttar í kunngerðunum (bekendtgørelse 1378, 1381, 1834 og 1385), sum vórðu lýstar í sambandi við, at kongliga fyriskipanin varð sett í gildi í Føroyum í 2007. Hesar reglur snúgva seg eitt nú um almannakunngering og um at lata ársfrásøgn inn til Skráseting Føroya, heruppií í talgildum sniði, um hálvársfrásagnir fyri børsskrásettar fyirtøkur, um at nýta altjóða roknskaparstandardar, og um ávís serlig undantøk frá reglunum í lógini.

Harumframt inniheldur galdandi ársroknskaparlóg eitt nú heimildir at áseta nærri reglur um talgilt samskifti við myndugleikarnar, um nýtslu av altjóða roknskaparstandardum, og at víkja frá ásetingum í løgtingslógini í tann mun hetta er neyðugt, til tess at kunna nýta altjóða roknskaparstandardar, um um hálvársfrásagnir fyri landspartafeløg, o.a.

Uppskotið førir galdandi heimildir víðari, og heimilar harumframt landsstýrisfólkinum eitt nú at áseta nærri reglur um útrokning av talinum av heiltíðarsettum starvsfólkum í fyritøkuni, og um at gera frávik fyri ávísar vinnubólkar í hesum sambandi, um at lata Skráseting Føroya upplýsingar um nettosøluna, og um á hvørjum øðrum málum enn føroyskum og donskum, børsskrásettar fyritøkur kunnu lata ársfrásøgnina fyri fyritøkuna inn.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?

Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn uttan rættarúrskurð.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?

Neyðugt er at gera nakrar broytingar í aðrari lóggávu, heruppií grannskoðaralógini, løgtingslóg um serligar treytir fyri lógarálagdari grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga, vinnufelagalógini, vinnufyritøkulógini, og anordning om iktraftræden for Færøerne af lov om erhvervsdrivende fonde. Uppskot til løgtingslóg um broyting í nevndu løgtingslógum verður lagt fyri Løgtingið samstundis til viðgerðar sum hetta uppskot.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja

Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Tá ið vinnufelagaøkið var yvirtikið í 2007 var politisk semja um, at lóggávan á økinum skuldi leggja seg uppat lóggávuni í okkara grannalondum. Ársroknskapar- og vinnufelagalóggávan, sum varð sett í gildi eftir 2007, hevði fyrimynd í samsvarandi lóggávu í Danmark, sum leggur seg tætt uppat ES-lóggávuni á økinum. Danska lóggávan varð sett í gildi í Føroyum, við nøkrum fáum tillagingum til serlig føroysk viðurskifti. Fyrimunurin við hesum leisti er, at føroysku myndugleikarnir í sínari málsviðgerð kunnu styðja seg til ta siðvenju, sum er ment í Danmark, har lutfalsliga fleiri roknskapar- og vinnufelagalig mál verða viðgjørd av fyrisitingini.

Flestu ásetingarnar stava frá upprunaligu årsregnskabsloven frá 2001. Til ber at finna upprunaligu viðmerkingarnar til flestu ásetingarnar í 2000/1 LSF 138, sum er viðheft sum fylgiskjal 1. Í nøkrum førum eru upprunaligu ásetingarnar í årsregnskabsloven frá 2001 broyttar áðrenn kongliga fyriskipanin varð sett í gildi í Føroyum í 2007, og er tað tá broytta ásetingin, sum er sett í gildi í Føroyum.

Samanberingargrundarlagið er ásetingin í uppskotinum, og tilsvarandi áseting í galdandi donsku årsregnskabslov. Um tað í serligu viðmerkingunum einans verður víst til upprunaligu viðmerkingarnar til uppskotið frá 2001, ella til eitt løgtingsmál, so er talan sum byrjanarstøði ikki um innihaldssligar broytingar samanborið við viðkomandi áseting í galdandi årsroknskaparlóg í Føroyum. Í tann mun serligar tillagingar eru gjørdar til føroysk viðurskifti, er hetta nevnt í viðmerkingini til einstøku greinina.

Til § 1 (Lógarinnar virkisøki, grundleggjandi krøv, o.a.)

§ 1 svarar til § 1 í årsregnskabsloven, sum orðað við *lov nr. 448 af 07/06/2001 om erhvervsdrivende virksomheders aflæggelse af årsregnskab m.v.* (L 448 2001)[21]. Víst verður til upprunaligu viðmerkingarnar til § 1 í 2000/1 LSF 138 (fylgiskjal 1).

Til § 2

§ 2 svarar til § 2 í årsregnskabsloven. Víst verður til upprunaligu viðmerkingarnar til § 2 í 2000/1 LSF 138 (fylgiskjal 1).

Til § 3

§ 3 svarar til § 3 í årsregnskabsloven. Víst verður til upprunaligu viðmerkingarnar til § 3 í 2000/1 LSF 138 (fylgiskjal 1).

Til § 4

[21] L 448 2001 (årsregnskabsloven) er høvuðslógin, sum anordning nr. 1355 af 9. december 2007 om ikrafttræden for Færøerne af årsregnskabsloven er grundað á.

§ 4 svarar til § 4 í årsregnskabsloven. Víst verður til upprunaligu viðmerkingarnar til § 4 í 2000/1 LSF 138 (fylgiskjal 1). Ásetingin er broytt samsvarandi L 738 2015[22]. Víst verður til viðmerkingarnar til broytingina í § 1, nr. 3-7 í 2014/1 LSF 117 (fylgiskjal 2).

Til § 5
§ 5 svarar til § 5 í årsregnskabsloven. Víst verður til upprunaligu viðmerkingarnar til § 5 í 2000/1 LSF 138 (fylgiskjal 1). Ásetingin er broytt samsvarandi L 738 2015. Víst verður til viðmerkingarnar til broytingina í § 1, nr. 8 og 9 í 2014/1 LSF 117 (fylgiskjal 2).

Til § 6
§ 6 svarar til § 6 í årsregnskabsloven. Víst verður til upprunaligu viðmerkingarnar til § 6 í 2000/1 LSF 138 (fylgiskjal 1).

Til § 7
§ 7 svarar til § 7 í årsregnskabsloven. Víst verður til upprunaligu viðmerkingarnar til § 7 í 2000/1 LSF 138 (fylgiskjal 1). Ásetingin er broytt samsvarandi L 480 2024[23]. Víst verður til viðmerkingarnar til broytingina í § 1, nr. 2-3 í 2023/1 LSF 107 (fylgiskjal 3).

Til § 8
§ 8 svarar til § 7 a í årsregnskabsloven. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 1, nr. 4 í løgtingsmáli nr. 43/2010 (fylgiskjal 4).

Til § 9
§ 9 svarar til § 8 í årsregnskabsloven. Víst verður til upprunaligu viðmerkingarnar til § 8 í 2000/1 LSF 138 (fylgiskjal 1).

Til § 10
§ 10 svarar til § 9 í årsregnskabsloven. Ásetingin er broytt samsvarandi L 516 2008.
Víst verður til viðmerkingarnar til § 1, nr. 6-9 til 2007/2 LSF 100 (fylgiskjal 5).

Til § 11
§ 11 er nýggj og svarar til § 9 a, sum orðað við L 738 2015. Víst verður til upprunaligu viðmerkingarnar til § 9 a í § 1, nr. 25 í 2014/1 LSF 117 (fylgiskjal 2).

Til § 12 (Skylda at gera ársfrásøgn)
§ 12 svarar til § 10 í årsregnskabsloven. Víst verður til upprunaligu viðmerkingarnar til § 10 í 2000/1 LSF 138 (fylgiskjal 1).

Til § 13 (Upplýsing um frával av grannskoðara)
§ 13 svarar til § 10 a í årsregnskabsloven. Víst verður til § 1, nr. 2 í løgtingsmáli nr. 105/2014 (fylgiskjal 6).

Til § 14 (Grundleggjandi krøv)
§ 14 svarar til § 11 í årsregnskabsloven. Víst verður til § 1, nr. 8-10 í løgtingsmáli nr. 151/2008 (fylgiskjal 7).

[22] Lov nr. 738 af 01/06/2015.
[23] Lov nr. 480 af 22/05/2024.

Til § 15
§ 15 svarar til § 12 í årsregnskabsloven. Víst verður til upprunaligu viðmerkingarnar til § 12 í 2000/1 LSF 138 (fylgiskjal 1).

Til § 16
§ 16 svarar til § 13 í årsregnskabsloven. Ásetingin er broytt samsvarandi L 738 2015 og L 1716 2018[24]. Víst verður til § 1, nr. 28-29 í 2014/1 LSF 117 (fylgiskjal 2), og til § 1, nr. 3 í 2018/1 LSF 99 (fylgiskjal 8).

Til § 17
§ 17 svarar til § 14 í årsregnskabsloven. Tó er stk. 1 av ritstjórnarligum ávum býtt upp í tvey stykkir. Víst verður til upprunaligu viðmerkingarnar til § 14 í 2000/1 LSF 138 (fylgiskjal 1).

Til § 18
§ 18 svarar til § 15 í årsregnskabsloven. Tó er stk. 3 av ritstjórnarligum ávum býtt upp í tvey stykkir. Víst verður til upprunaligu viðmerkingarnar til § 15 í 2000/1 LSF 138 (fylgiskjal 1).

Til § 19
§ 19 svarar til § 16 í årsregnskabsloven. Víst verður til upprunaligu viðmerkingarnar til § 16 í 2000/1 LSF 138 (fylgiskjal 1). Ásetingin er broytt við L 99 2004[25]. Víst verður til § 1, nr. 12 í 2003/1 LSF 71 (fylgiskjal 10).

Til § 20 (Raðfylgja av staklutum, o.a.)
§ 20 svarar til § 17 í årsregnskabsloven. Víst verður til upprunaligu viðmerkingarnar til § 17 í 2000/1 LSF 138 (skjal 1), og til viðmerkinginar til broytingarnar í § 1, nr. 4-5 í 2018/1 LSF 99 (fylgiskjal 8).

Til § 21 (Roknskaparflokkur A)
§ 21 svarar til § 18 í årsregnskabsloven. Tó er stk. 1 av ritstjórnarligum ávum býtt upp í tvey stykkir. Víst verður til upprunaligu viðmerkingarnar til § 18 í 2000/1 LSF 138 (fylgiskjal 1), og til broytingina í § 1, nr. 15 í 2007/2 LSF 100 (fylgiskjal 5).

Til § 22
§ 22 svarar til § 19 í årsregnskabsloven. Ásetingin er broytt samsvarandi L 738 2015. Víst verður til viðmerkingarnar til § 1, nr. 31-32 í 2014/1 LSF 117 (fylgiskjal 2).

Til § 23
§ 23 svarar til § 20 í årsregnskabsloven. Ásetingin er broytt samsvarandi L 738 2015. Víst verður til viðmerkingarnar til § 20 í § 1, nr.33 í 2014/1 LSF 117 (fylgiskjal 2).

Til § 24
§ 24 svarar til § 21 í årsregnskabsloven. Víst verður til upprunaligu viðmerkingarnar til § 24 í 2000/1 LSF 138 (skjal 1). § 21, stk. 2, nr. 1 varð sett úr gildi við L 245 2006. Víst verður til § 1, nr. 9 í 2005/1 LSF 50 (fylgiskjal 16).

Til § 25 (Roknskaparflokkur B)

[24] Lov nr. 1716 af 27/12/2018.
[25] Lov nr. 99 af 18/02/2004.

§ 25 svarar til § 22 í årsregnskabsloven. Ásetingin er broytt samsvarandi L 738 2015 og L 480 2024. Víst verður til viðmerkingarnar til § 1, nr. 34-46 í 2014/1 LSF 117 (fylgiskjal 2), og til viðmerkingarnar til § 1, nr. 7 í 2023/1 LSF 107 (fylgiskjal 3).

Til §§ 26-27
§§ 26-27 svara til § 22 a-b í årsregnskabsloven, sum orðaðar við L 738 2015. Víst verður til upprunaligu viðmerkingarnar til § 22 a-b í § 1, nr. 36 í 2014/1 LSF 117 (fylgiskjal 2). § 22 a er harumframt broytt við L 1716 2018 og við L 480 2024. Víst verður til viðmerkingarnar til broytingarnar í § 1, nr. 6 í 2018/1 LSF 99 (fylgiskjal 8) og í § 1, nr. 8 í 2023/1 LSF 107 (fylgiskjal 3).

Til § 28
§ 28 svarar til § 23 í årsregnskabsloven. Víst verður til upprunaligu viðmerkingarnar til § 24 í 2000/1 LSF 138 (fylgiskjal 1) og til § 1, nr. 37-40 í 2014/1 LSF 117 (fylgiskjal 2).

Til § 29
§ 29 svarar til § 24 í årsregnskabsloven. Víst verður til upprunaligu viðmerkingarnar til § 24 í 2000/1 LSF 138 (fylgiskjal 1).

Til § 30
§ 30 svarar til § 25 í årsregnskabsloven. Víst verður til upprunaligu viðmerkingarnar til § 25 í 2000/1 LSF 138 (fylgiskjal 1).

Til § 31
§ 31 svarar til § 26 í årsregnskabsloven. Ásetingin er broytt samsvarandi L 738 2015. Víst verður til viðmerkingarnar til § 1, nr. 41 í 2014/1 LSF 117 (fylgiskjal 2).

Til § 32
§ 32 svarar til § 27 í årsregnskabsloven. Víst verður til upprunaligu viðmerkingarnar til § 27 í 2000/1 LSF 138 (fylgiskjal 1).

Til § 33
§ 33 svarar til § 28 í årsregnskabsloven. Víst verður til upprunaligu viðmerkingarnar til § 28 í 2000/1 LSF 138 (fylgiskjal 1).

Til § 34
§ 34 svarar til § 29 í årsregnskabsloven. Víst verður til upprunaligu viðmerkingarnar til § 29 í 2000/1 LSF 138 (fylgiskjal 1).

Til § 35
§ 35 svarar til § 31 í årsregnskabsloven. Ásetingin er broytt samsvarandi L 738 2015. Víst verður til viðmerkingarnar § 1, nr. 43 í 2014/1 LSF 117 (fylgiskjal 2).

Til § 36
§ 36 svarar til § 32 í årsregnskabsloven. Ásetingin er broytt samsvarandi L 642 2020. Víst verður til viðmerkingarnar til § 1, nr. 1 í 2019/1 LSF 110 (fylgiskjal 9)

Til § 37

§ 37 svarar til § 33 í årsregnskabsloven. Ásetingin er broytt samsvarandi L 738 2015 og L 1716 2018. Víst verður til viðmerkingarnar til § 1, nr. 44-45 í 2014/1 LSF 117 (fylgiskjal 2), og til viðmerkingarnar til § 1, nr. 7-8 í 2018/1 LSF 99 (fylgiskjal 8).

Til § 38 og § 39
§§ 38-39 svara til § 35 a-b í årsregnskabsloven, sum orðaðar við løgtingslóg nr. 69 frá 27. mai 2011. Galdandi § 35 c, um kravdan tiltakspening fyri íverksetarafeløg, er sett inn í uppskotnu § 39, stk. 3. Víst verður til upprunaligu viðmerkingarnar til §§ 35 a-c í § 1, nr. 10 í løgtingsmáli 43/2010 (fylgiskjal 4).

Til § 40
§ 40 svarar til § 36 í årsregnskabsloven. Ásetingin er broytt samsvarandi L 738 2015. Víst verður til viðmerkingarnar til § 1, nr. 47 í 2014/1 LSF 117 (fylgiskjal 2).

Til § 41
§ 41 svarar til § 37 í årsregnskabsloven. Ásetingin er broytt samsvarandi L 738 2015 og L 1716 2018. Víst verður til viðmerkingarnar til § 1, nr. 48-51 í 2014/1 LSF 117 (fylgiskjal 2), og til viðmerkingarnar til § 1, nr. 10 í 2018/1 LSF 99 (fylgiskjal 8).

Til § 42
§ 42 svarar til § 37 a í årsregnskabsloven. Ásetingin stavar frá L 738 2015, og er broytt samsvarandi L 1716 2018. Víst verður til upprunaligu viðmerkingarnar til § 37 a í § 1, nr. 52 í 2014/1 LSF 117 (fylgiskjal 2), og til viðmerkingarnar til broytingina í § 1, nr. 11 í 2018/1 LSF 99 (fylgiskjal 8).

Til § 43
§ 43 svarar til § 38 í årsregnskabsloven. Ásetingin er broytt samsvarandi L 738 2015. Víst verður til viðmerkingarnar til § 1, nr. 53-56 í 2014/1 LSF 117 (fylgiskjal 2).

Til § 44
§ 44 svarar til § 39 í årsregnskabsloven. Ásetingin er broytt samsvarandi L 1716 2018. Víst verður til viðmerkingarnar til § 1, nr. 11-12 í 2018/1 LSF 99 (fylgiskjal 8).

Til § 45
§ 45 svarar til § 40 í årsregnskabsloven. Ásetingin er broytt samsvarandi L 738 2015. Víst verður til viðmerkingarnar til § 1, nr. 57 í 2014/1 LSF 117 (fylgiskjal 2).

Til § 46
§ 46 svarar til § 41 í årsregnskabsloven. Ásetingin er broytt samsvarandi L 738 2015 og L 480 2024. Víst verður til viðmerkingarnar til § 1, nr. 58-62 í 2014/1 LSF 117 (fylgiskjal 2), og til viðmerkingarnar til § 1, nr. 10 í 2023/1 LSF 107 (fylgiskjal 3).

Til § 47
§ 47 svarar til § 42 í årsregnskabsloven. Ásetingin er broytt samsvarandi L 738 2015. Víst verður til viðmerkingarnar til § 1, nr. 63-64 í 2014/1 LSF 117 (fylgiskjal 2).

Til § 48
§ 48 svarar til § 43 í årsregnskabsloven. Ásetingin er broytt samsvarandi L 738 2015. Víst verður til viðmerkingarnar til § 1, nr. 65-66 í 2014/1 LSF 117 (fylgiskjal 2).

Til § 49
§ 49 svarar til § 43 a í årsregnskabsloven. Ásetingin er broytt samsvarandi L 738 2015 og L 1716 2018. Víst verður til viðmerkingarnar til § 1, nr. 59 í 2014/1 LSF 117 (fylgiskjal 2), og til viðmerkingarnar til § 1, nr. 14-20 í 2018/1 LSF 99 (fylgiskjal 8).

Til § 50
§ 50 svarar til § 44 í årsregnskabsloven, sum orðað í L 738 2015. Víst verður til viðmerkingarnar til § 44 í § 1, nr. 67 í 2014/1 LSF 117 (fylgiskjal 2).

Til § 51
§ 51 svarar til § 45 í årsregnskabsloven. Víst verður til upprunaligu viðmerkingarnar til § 45 í 2000/1 LSF 138 (fylgiskjal 1).

Til § 52
§ 52 svarar til § 46 í årsregnskabsloven. Víst verður til upprunaligu viðmerkingarnar til § 46 í 2000/1 LSF 138 (fylgiskjal 1).

Til § 53
§ 53 svarar til § 47 í årsregnskabsloven. Ásetingin er broytt samsvarandi L 738 2015. Víst verður til viðmerkingarnar til § 1, nr. 69-70 í 2014/1 LSF 117 (fylgiskjal 2).

Til § 54
§ 54 svarar til § 49 í årsregnskabsloven. Ásetingin er broytt samsvarandi L 738 2015 og L 1716 2018. Víst verður til viðmerkingarnar til § 1, nr. 72-78 í 2014/1 LSF 117 (fylgiskjal 2), og til viðmerkingarnar til § 1, nr. 21-26 í 2018/1 LSF 99 (fylgiskjal 8).

Til stk. 3
§ 49, stk. 3 í årsregnskabsloven ásetir, at inntøkur og útreiðslur, sum verða innroknaðar beinleiðis á eginognina, skulu innroknast til dagsvirðið, sum verður uppløyst, tá ið tær innroknaðu upphæddirnar verða seldar ella afturførdar. Hetta merkir, at fyritøkur leypandi skulu meta um dagsvirðið fyri viðkomandi ognir og skyldur, og hvør broyting skal skrásetast rætt undir einum serskildum posti undir eginognini (dagsvirðisgoymslan).

Royndirnar eru, at smáar og miðalstórar fyritøkur í Danmark hava trupult við fylgja hesum kravi, eins og virðið á upplýsingunum fyri hesar fyritøkur ofta er avmarkað. Skotið verður tískil upp, at ein tillaging verður gjørd, soleiðis at uppskotna § 54, stk. 3 einans verður galdandi fyri størstu fyritøkur í roknskaparflokki C, stór og fyri fyritøkur í roknskaparflokki D. Mett verður, at uppskotna tillagingin er í samsvari við artikkul 8 í nýggja roknskapardirektivi hjá ES, sum heimilar ES-limalondunum at áseta linkaði krøv fyri t.d. smáar og miðalstórar fyritøkur.

Til § 55
§ 55 svarar til § 50 í årsregnskabsloven. Ásetingin er broytt samsvarandi L 738 2015. Víst verður til viðmerkingarnar til § 1, nr. 79 í 2014/1 LSF 117 (fylgiskjal 2).

Til § 56
